| | **Býráðsfundur**<br>24. april 2024 | Blað nr.: 309<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# GERÐABÓK

**Dato:** 24. april 2024 **Kl**. 17:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 71/24 – 108/24**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Kristianna Winther Poulsen
Súna Mørk
Bjørg Dam
Jákup Dam
Annika Olsen
Birgir Nielsen
Súsanna Olsen
Turið Horn
Gunnar Djurhuus

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðfríð Jacobsen
Bogi Jacobsen
Hermann Mortensen
David Andresen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Jóan Petur Hentze

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 71/24 | 24/01954-1 | Gunvør Balle berst frá at møta á býráðsfundi 24. apríl 2024 | 312 |
| 72/24 | 24/00063-1 | Mál beind í nevndir 2024 | 313 |
| 73/24 | 23/04834-12 | Afturkeyp av óbygdum grundstykki. Matr.nr. 91ac, Kollafjørður. | 315 |
| 74/24 | 23/04836-8 | Óbygt grundstykki. Matr.nr. 91p, Kollafjørður. | 317 |
| 75/24 | 24/01528-3 | Matr. nr. 135pt, Hoyvík. Eigari søkir um loyvi til víðarisølu. | 319 |
| 76/24 | 24/01732-3 | Matr.nr. 255ea, Kirkjubøur,Argir. Eigarar vilja selja stykkið aftur til Tórshavnar kommunu. | 321 |
| 77/24 | 24/02091-1 | Nevndarlimur til Visit Tórshavn 2024 | 323 |
| 78/24 | 22/00894-1 | Hølisloysn til nýggja hádeild í Sankta Frans skúla | 325 |
| 79/24 | 24/02073-1 | Framleigusáttmáli við Tórshavnar Golffelag um felagshús á Glyvursnesi | 337 |
| 80/24 | 21/02924-1 | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrium | 339 |
| 81/24 | 23/03453-2 | Nýggjur durur til fimleikahøllina í skúlanum á Argjahamri | 349 |
| 82/24 | 23/06296-4 | Svimjihøllin 2024 – Prísskipan og upplatingartíðir | 353 |
| 83/24 | 24/01809-2 | Bráðfeingis skiftirhølir til Hoyvíksvøllin | 358 |
| 84/24 | 24/00702-1 | Tillagingar av Miðstovninum | 361 |
| 85/24 | 21/02624-2 | Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging | 364 |
| 86/24 | 22/00329-1 | Sethúsaútstykking á Velbastað – partur av matr. nr. 51a | 371 |
| 87/24 | 23/03315-20 | Lendisgøta til Stórutjørn | 378 |
| 88/24 | 23/05192-3 | Skipan av Dr. Jakobsensgøtu | 380 |
| 89/24 | 23/07213-2 | Umsókn til ummælis um keyp av uppískoytisstykki av matr. nr. 11a og 49a til samanlegging við matr. nr. 72, Kaldbak | 385 |
| 90/24 | 24/02102-1 | Fríðkan av býnum, Kongaminni o.a. | 387 |
| 91/24 | 23/03517-6 | Byggiverkætlan á matr. nr. 40g, 40h, 40i og 42i, Argir, Heiðagøta | 389 |
| 92/24 | 15/00969-1 | Útstykking á Hamrabø matr. nr. 91a, Kollafirði | 391 |
| 93/24 | 14/05161-3 | Útstykking á Kongavarða til grundstykkir á matr. nr. 255a, Argir | 396 |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>24. april 2024 | Blað nr.: 311<br>Formansins merki: |


| | | | |
|---|---|---|---|
| 94/24 | 21/01680-5 | Hosufóðring av kloakkum | 402 |
| 95/24 | 23/05952-4 | Ferðslutrygd við gonguteigar kring Skúlan við Løgmannabreyt - og við gonguteigin á Kongabrúnni | 407 |
| 96/24 | 24/00552-1 | Fleiri koyritímar til bussleiðina | 409 |
| 97/24 | 23/03516-2 | Útstykking á Signabø | 413 |
| 98/24 | 24/01451-1 | Umbøn um eykajáttan til kontu 7110 | 418 |
| 99/24 | 17/03154-1 | Orkupolitikkur | 421 |
| 100/24 | 23/00658-1 | Parkeringstunnil | 436 |
| 101/24 | 24/01740-1 | Nýkeyp av kontu 8375 í 2024 | 441 |
| 102/24 | 22/07222-13 | Heildarætlan fyri matr. nr. 1235a, 1378, 1233a og b | 443 |
| 103/24 | 23/03101-1 | Broyting av serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina | 446 |
| 104/24 | 24/01596-1 | Bíðirúm í Hesti | 449 |
| 105/24 | 24/02032-1 | Ársroknskapur fyri Tórshavnar kommunu 2023 | 451 |
| 106/24 | 24/02033-1 | Framflytingar fyri roknskaparárið 2023 | 453 |
| 107/24 | 24/00061-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2024 | 455 |
| 108/24 | 23/03546-1 | Framtíðartryggja eldraøkið - reingerðartænastan | 457 |

**Til viðgerðar**

## 71/24 Gunvør Balle berst frá at møta á býráðsfundi 24. apríl 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 71/24 | 24/01954-1 |

**Málslýsing**
Gunvør Balle hevur boðað frá, at henni berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Gunnar Djurhuus, eru loknar.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Tikið til eftirtektar.

# 72/24 Mál beind í nevndir 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 3/24 | 24/00063-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 27/24 | 24/00063-1 |
| 3 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 51/24 | 24/00063-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 72/24 | 24/00063-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

# 73/24 Afturkeyp av óbygdum grundstykki. Matr.nr. 91ac, Kollafjørður.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.04.2024 | 95/24 | 23/04834-12 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 73/24 | 23/04834-12 |

**Upprunin til málið.** Óbygt grundstykki. Byggifreistin er farin, og er eigari sinnaður til at lata grundstykkið innaftur til kommununa.

**Lýsing av málinum.**

Matr.nr. 91ac, Kollafjørður. ( Í útstykking á Hamrabøi )
Vídd 504 m². Grundstykkið er ógrivið.
Søluprísur 236.885,04 kr.
Skeytið er tinglýst 13.12.2018

**Lógir, ásetingar o.a.**

- Kommunustýrislógin
- Kunngerð nr. 122 frá 22 desember 2000 um alment útboð av kommunalari ogn.
- Tinglýstir servituttir
- Reglugerð fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til privatan bústað.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Kortskjal. Tinglýst skeyti.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>24. april 2024 | Blað nr.: 316<br><br>Formansins merki: |

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 6175 | | Keyp og søla | | | | | 236.885,04 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 236.885,04 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0 |

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at keypa stykkið aftur fyri upprunaligan sølupris kr. 236.885,04 og at luta stykkið útaftur sambært reglugerð.

Tá kommunan lat upp fyri tilmelding um 3 grundstykki í Hamrabøi tann 7. mars 2024 varð boðað frá, at um fleiri stykki komu inn seinni, vórðu tey tikin við í lutakastið. Tí verður mælt til at hetta grundstykkið verður við í lutakastinum. Somuleiðis verður mælt til at grundstykki, ið eru eftir aftaná lutakastið er avgreitt, verða seld á heimasíðuni hjá kommununi.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

# 74/24 Óbygt grundstykki. Matr.nr. 91p, Kollafjørður.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.04.2024 | 96/24 | 23/04836-8 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 74/24 | 23/04836-8 |

**Upprunin til málið.** Óbygt grundstykki. Byggifreistin er farin, og er eigari sinnaður til at lata grundstykkið innaftur til kommununa.

**Lýsing av málinum**

Matr.nr. 91p, Kollafjørður. ( Í útstykking á Hamrabøi )
Vídd 522 m²
Grundstykkið er ógrivið.
Søluprísur 245.345,22 kr.
Skeytið er tinglýst 31.01.2019

**Lógir, ásetingar o.a.**

- Kommunustýrislógin
- Kunngerð nr. 122 frá 22 desember 2000 um alment útboð av kommunalari ogn.
- Tinglýstir servituttir
- Reglugerð fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til privatan bústað.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Kortskjal. Tinglýst skeyti.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

| | Býráðsfundur<br>24. april 2024 | Blað nr.: 318<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 6175 | | Keyp og søla | | | | | 245.345,22 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 245.345,22 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0 |

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at keypa stykkið aftur fyri upprunaligan søluprís kr. 245.345,22 og at luta stykkið útaftur sambært reglugerð.

Tá kommunan lat upp fyri tilmelding um 3 grundstykki í Hamrabøi tann 7. mars 2024 varð boðað frá, at um fleiri stykki komu inn seinni, vórðu tey tikin við í lutakastið. Tí verður mælt til at hetta grundstykkið verður við í lutakastinum. Somuleiðis verður mælt til at grundstykki, ið eru eftir aftaná lutakastið er avgreitt, verða seld á heimasíðuni hjá kommununi.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>24. april 2024 | Blað nr.: 319<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 75/24 Matr. nr. 135pt, Hoyvík. Eigari søkir um loyvi til víðarisølu.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.04.2024 | 93/24 | 24/01528-3 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 75/24 | 24/01528-3 |

**Upprunin til málið.** Eigari søkir um loyvi til víðarisølu matr.nr. 135pt, Hoyvík.

**Lýsing av málinum:**
Matr.nr. 135pt. Grundstykkið við næstan liðugt bygdum sethúsum.
Eigarar keyptu grundstykkið fyri 1,4 mill. kr.  Skeytið varð tinglýst 28.04.2023.

Í uppruna tinglýsta skeytinum eru álagdir servituttir um bygging, og um at keypari ikki hevur loyvi til at selja stykkið viðari, fyrr enn keyparin hevur búð í privatu húsunum í 3 ár. Tórshavnar býráð kann loyva frávik frá hesum, um haldgóð grundgeving fyriliggur.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** 24/01528-2.  Kortskjal, mynd av húsum. Tinglýstur servituttur um byggifreist bústaðarskyldu.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:** Vísandi til at verandi eigarar hava keypt grundstykkið til marknaðarprís, mælir kommunustjórin til at loyva víðarisølu av matr.nr. 135pt,Hoyvík, við nærum liðugt bygdum sethúsum, og at frávíkja sín forkeypsrætt í hesum føri.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

# 76/24 Matr.nr. 255ea, Kirkjubøur,Argir. Eigarar vilja selja stykkið aftur til Tórshavnar kommunu.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.04.2024 | 94/24 | 24/01732-3 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 76/24 | 24/01732-3 |

**Upprunin til málið.** Eigarar av grundstykkinum keypa sær hús, og ynskja tí at selja kommununi óbygda grundstykkið aftur.

**Lýsing av málinum.**
Matr.nr. 255ea, Kirkjubøur,Argir. Skeytið er tinglýst 18.03.2021 Søluprísur kr. 626.262,- kr.

Eigarar keypa sethús og ynskja tískil at selja kommununi stykkið aftur.

Sambært tinglýstum servituttum, rindar eigarin tinglýsingarkostnaðn av afturkeyps skeytinum, og hevur kommunan tí ongar útreiðslur í hesum sambandi.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Kortskjal.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐

| | **Býráðsfundur**<br>24. april 2024 | Blað nr.: 322<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

Lokað verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 6175 | | Keyp og søla. |

| **Játtast á:** | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 626.262,00 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0 |

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at keypa grundstykkið aftur fyri kr. 626.262,00 og at luta stykkið útaftur sambært reglugerð um útlutan av sethúsagrundstykkjum í Tórshavnar kommunu.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

# 77/24 Nevndarlimur til Visit Tórshavn 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 77/24 | 24/02091-1 |

**Upprunin til málið**

Býráðið skal velja ein nevndarlim og ein tiltakslim í 2024 í nevndina fyri Visit Tórshavn. Felagið Tórshavn (Visit Tórshavn) hevur havt aðalfund tann 16. Apríl 2024. Nevndarlimur Sóley H. Hammer og tiltakslimur Annita á Fríðriksmørk standa fyri vali í nevndina.

Umframt val av føstum limi og varalim fyri hendan, skal nýggjur varalimur veljast fyri Theresu Turidardóttir Kreutzmann, sum hevur tikið við sum stjóri í Visit Norðoy.

**Lýsing av málinum**

Nevndin hjá Felagnum Tórshavn telur fimm limir, sum sita tvey ár í senn. Annaðhvørt ár standa tveir nevndarlimir fyri vali, og annaðhvørt ár standa tríggir limir fyri vali.

Tveir nevndarlimir verða valdir beinleiðis av Tórshavnar kommunu og tríggir verða valdir av Felagnum Tórshavn á aðalfundi. Teir nevndarlimirnir, ið Tórshavnar kommuna velur, og tveir av nevndarlimunum, ið Felagið Tórshavn velur, skulu vera persónar, sum eru leiðarar ella stjórar innan ferðavinnu, handilsvinnu, matstovu vinnu og møguliga aðra vinnu, sum hevur ein viðkomandi leiklut í ferðavinnu høpi. 3. nevndarlimurin, sum Felagið Tórshavn velur, umboðar Felagið Tórshavn, og kann verða valdir millum limir felagsins ella umboðandi almennan ella privatan stovn, savn, mentanarlív ella líknandi.

Nevndarlimir kunnu ikki vera býráðslimir. Nevndarlimir kunnu verða valdir aftur.
Fyri hvønn nevndarlim verður tiltaksnevndarlimur valdur.
Nevndin skipar seg sjálva við formanni og næstformanni.

Nevndin er viðtøkufør, tá í minsta lagi tríggir limir eru á fundi, harav ein skal vera formaðurin.

Samgongan valdi í 2023 nevndarlim og tiltakslim. Í 2024 er tað andstøðan, sum skal velja lim og varalim.

Hesi sita í nevndini í dag:

1. Henny á Líknargøtu, Smyril Line – Forkvinna
2. John Mikkelsen, Gist og Vist
3. Herleif Hammer, Tjóðsavnið
4. Sóley Heradóttir Hammer, Hugskotið/Tórshavnar Kommuna
5. Eirik Suni Danielsen, Tórshavnar Kommuna

Tiltakslimir:

1. Oddfríð Petersen, Smyril Line
2. Petrine Nólsoy Larsen
3. Helgi Dahl Michelsen, Tjóðsavnið
4. Annita á Fríðriksmørk, vegna Tórshavnar Kommunu
5. Theresa Turiðardóttir Kreutzmann, vegna Tórshavnar Kommunu

Í ár standa Sóley Heradóttir Hammer, stjóri í Hugskotinum, og Annita á Fríðriksmørk (varalimur) fyri vali sum umboð fyri Tórshavnar kommunu.

Eisini skal nýggjur varalimur veljast fyri Theresu Turidardóttir Kreutzmann, ið hevur tikið við sum stjóri í Visit Norðoy.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:** Deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni og kommunustjórin mæla til, at Býráðið velur lim og tveir varalimir í nevndina fyri Felagið Tórshavn.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Atkvøtt varð um at velja Sóley Heradóttir Hammer sum lim og Annitu á Fríðriksmørk sum varalim í nevndina fyri Visit Tórshavn.

Atkvøtt varð eisini um at velja Rók Tummasarson sum varalim í nevndina fyri Visit Tórshavn í staðin fyri Theresu Turidardóttir Kreutzmann.

Uppskotini vórðu einmælt samtykt.

# 78/24 Hølisloysn til nýggja hádeild í Sankta Frans skúla

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 10.03.2022 | 26/22 | 22/00894-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 07.04.2022 | 29/22 | 22/00894-1 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 12.05.2022 | 37/22 | 22/00894-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 248/22 | 22/00894-1 |
| 5 Trivnaðarnevndin | 25.10.2022 | 70/22 | 22/00894-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 26.10.2022 | 273/22 | 22/00894-1 |
| 7 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 235/22 | 22/00894-1 |
| 8 Trivnaðarnevndin | 09.02.2023 | 9/23 | 22/00894-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 32/23 | 22/00894-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 23.02.2023 | 67/23 | 22/00894-1 |
| 11 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 44/23 | 22/00894-1 |
| 12 Trivnaðarnevndin | 22.02.2023 | 20/23 | 22/00894-1 |
| 13 Trivnaðarnevndin | 26.01.2024 | 5/24 | 22/00894-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 21.02.2024 | 28/24 | 22/00894-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 28.02.2024 | 50/24 | 22/00894-1 |
| 16 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 32/24 | 22/00894-1 |
| 17 Trivnaðarnevndin | 11.03.2024 | 12/24 | 22/00894-1 |
| 18 Fíggjarnevndin | 13.03.2024 | 61/24 | 22/00894-1 |
| 19 Fíggjarnevndin | 20.03.2024 | 76/24 | 22/00894-1 |
| 20 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 57/24 | 22/00894-1 |
| 21 Fíggjarnevndin | 23.04.2024 | 108/24 | 22/00894-1 |
| 22 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 78/24 | 22/00894-1 |

**Upprunin til málið**
Samtykt hjá býráðnum 24. feb. 2022 í máli 21/02652 Dagføring av skúlabygnaðinum í Tórshavnar kommunu um at stovnseta hádeild (8.fl og 9.fl) í Sankta Frans skúla – at byrja frá skúlaárinum 2023/24.

**Lýsing av málinum**
Samtyktin inniber at pr. skúlaársbyrjan 2023/24 skal skúlin rúma tveimum 8. fl. og frá 2024/24 tveimum 8. fl. og tveimum 9.fl.  Í sambandi við eina hádeild er eisini tørvur á ymiskum hjáhølum eitt nú til bólkaarbeiði, goymsluhøli, betri fakstovuhentleikar, tænastuhentleikar v.m. Umframt – alt eftir staðseting v.m. – hentleikar til starvsfólk. Um talan er um eina varandi hølisloysn og alt eftir, hvussu og hvar bygningurin verður bygdur kann roknast við einum fermetratalið á minst 800 m2 (við fyrivarni!).

Í kommunuætlanin frá 2020 stendur viðv. Sankta Frans skúla:
*"Innan nøkur ár verður væntandi farið undir høvuðsumvæling og útbygging av skúlanum. Tørvur er á betri parkeringsviðurskiftum."*
og
*"Fleiri dagføringar og neyðugar umvælingar standa eisini fyri framman. Fremstir í røðini eru Hoyvíkar skúli og Sankta Frans skúli."*

Sostatt er greitt, at tað er skilagott at hava framtíðar høvuðsumvælingar í huga nú farið verður undir at útvega hølisloysn til hádeildina. Hetta serliga tí at verandi høvuðsbygningur er frá 1931 og 1956 og tískil í nógvum førum ikki uppfyllir nútíðar krøv til bygningar sbrt. BK17. Forskúla/frítíðarskúlabygningurin er frá 2013. Hóast høgan aldur á høvuðsbygninginum so er hann í lutfalsliga góðum standi.

Gerast skal eisini vart við, at ætlan um dagføring v.m. av Hoyvíkar skúla er útsett fleiri ferð og raðfest fremri enn dagføring av høvuðsbygninginum hjá Sankta Frans skúla.

**Øki**
Skúlabygningarnir liggja í einum D3 øki. Har er galdandi at byggistigið má innan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki í D2 og D3 ikki fara upp um 0,25 og nýtslustigið ikki fara upp um 0,5. Skúlabygningarnir liggja á einum øki, ið er 6.985 m2 og byggistigið er á umleið 0,30 og nýtslustigið á umleið 0,59. Sostatt er greitt at byggisamtyktin ikki sum útgangsstøði loyvir meiri bygging á økinum. Harumframt er øki beint upp at D1 øki, ið er skógfriðað. Sostatt er sum útgangsstøði neyðugt at útvega annað lendi til tørvin. Í økinum er í høvuðsheitum tveir møguleikar – annar er at byggja út ella um á verandi øki og í øðrum lagi at byggja á økinum dagstovnurin Stella Maris heldur til. Hartil kemur spurningurin um møguliga eyka parkeringpláss. Hesir møguleikarnir kunnu innibera broytingum í byggisamtykt.

**Tíðarperspektiv**
Sum heild má tað ganga skjótt og væl um tað skal eydnast at hava eina varandi hølisloysn klára til skúlaársbyrjan 2022/23 og eigur tí eisini at vera umhugsað onkur fyribils loysn, ið verður brúkt inntil tann varandi loysnin fyriliggur. Helst eru onkrir møguleikar tí viðv. bæði viðv. fyribilshølum og evt. í nærøkinum.

Umsitingin kann – alt eftir samtykt í hesum máli – fara undir her í mars 2022 at gera eina kravseting til ein komandi og varandi hølisloysn og koma við boðum uppá staðsetingar. Á fundinum kemur umsitingin at geva metingar viðv. kostnaði av fyribils hølisloysn og varandi hølisloysn.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin, leiðarin á bygningsdeildini og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at taka støðu til um farast skal:
a). fyrst undir fyrireikingar av eini varandi hølisloysn ella
b). eini fyribilsloysn, meðan ein verandi verður fyrireikað.

**Trivnaðarnevndin 10. mars 2022:** Samtykt at taka undir við punkt a) í tilmælinum.

**Ískoyti**:
Síðani samtyktina seinast er umsitingin farin undir fyrireikingar av eini kravfesting og virksemislýsing til eina komandi hølisloysn og hevur viðgjørt møguligar staðsetingar.

Eitt verkætlanartoymið er skipað við umboðum fyri trivnaðarfyrisitingina og teknisku fyrisiting, og er verkætlanarleiðari settur. Tveir fundir hava verið við skúlaleiðslu og umboð fyri starvsfólk í skúlanum, og í vikuni verður fundur við frítíðarskúlan.

**Staðsetingar**
Umsitingin metir, at mest upplagda staðseting til eina útbygging av Sankta Frans skúla er á stykkinum har dagstovnurin Stella Maris liggur – t.e. matr. 807b. Fremsti fyrimunurin er at har ber til at byggja at kalla ótarnað hvat viðv. verandi skúla- og frítíðarskúlavirksemi. Umframt at bygging har sum útgangsstøði ikki viðførir tørv á broyting ella fráviki frá byggisamtyktini. Um stykkið hjá TK á matr. 807g verður tikið við ber til at byggja eina bygning á 700-900 m2. í t.d 2 hæddum. Matr. 807g liggur tó, í mun til matr. 807b, í sethúsaøkið sbrt. almennu byggisamtyktini. Fyribils metingin er at hetta fermetratalið er nøktandi uttan 807g.

Alternativt skal byggjast í verandi øki har skúlin er. Har kunnu ymsar loysnir hugsast t.d. byggja omaná verandi forskúla- og frítíðarskúlabygningi ella taka burtur verandi fimleikahøll og byggja nýggja fimleikahøll/felagshøli og 2 hæddir omaná. Báðar hesar loysnirnar krevja broytta byggisamtykt vegna, at bæði byggi- og nýtslustigini eru rokkin, umframt tilgongd í mun til skógfriðingina við Viðarlundina, ið er næsti granni. Eisini eru arkitektonisk/estetisk atlit til verandi serstaka og søguliga skúlabygningin, og serstøku Mariukirkjuna og Kerit vestanfyri.

Tískil vil tað innibera eina longri tilgongd uppá umleið 6 mánaðir, og tí ikki vist um tað letur seg gera. Vansin í hesum báðum førum er, at talan er um bygging inn í einum virknum skúlaøki, og kemur tað at viðføra týðandi ampa og helst, at forskúla- og frítíðarskúlavirksemi má flytast úr hølunum, meðan tað mesta av byggingini fer fram.

Eitt heilt annað alternativ, ið eisini er umrøtt, er at keypa Sankta Jósefs barnagarðin og lata nýggjan dagstovn byggja á økinum hjá Stella Maris og so innrætta Sankta Jósefs barnagarð til skúla.

Hetta krevur í fyrsta lagi samráðingar við katólsku kirkjuna í Belgia, ið varðar av stovninum, og vil so aftur krevja aðra bygging, áðrenn farast kann undir tillaging av bygninginum til skúla. Tískil má roknast við at tilgongdin tekur longri tíð.

Í sambandi við útbygging má roknast við kravi frá byggivaldinum sbrt. BK17 um fleiri parkeringspláss. Skúlin fær við eini hádeild – umleið 12 nýggj starvsfólk (lærarar og onnur innan tænastuøkið). TK er í samskifti við KFUK um møguleikan fyri at gera 22 parkeringspláss niðast á trøðni hjá KFUK. Serskilt mál verður lagt fyri nevnd um tað.

**Slag av virksemi**
Umrøtt hevur verið hvørt tað hevði verið ein fyrimunur heldur at bygt nýggj høli til grunddeildina (forskúla – 3 fl.) ella partar av henni og møguliga frítíðarskúlan ístaðin fyri at byggja nýtt til hádeildina (8-9 fl. og evt. 7 fl.). Mett verður at tað avgjørt er nakað, ið skal greinast nærri komandi tíðina. Mett verður at fyrimunurin við at byggja nýtt til grunddeildina hinmegin Varðagøtu er, at grunddeildin ikki í ein stóran mun hevur tørv á fakhølum v.m. í høvuðsbygninginum eins og hádeildin hevur. Tá ein endalig niðurstøða fyriliggur um staðseting vil umsitingin koma við endaligum tilmæli um tann spurningin. Um nýggju hølini verða bygd til grunddeildina, skal smábarnaskúlin dagførast til 8-9 fl. ella annað, sum í dag er í høvuðsbygninginum. 7 fl. er vanliga partur av hádeildini, og tí er tað fyrimunur, men ikki treyt, at 7 fl. eisini hevur flokshøli har hádeildin er.

**Innihald/funktiónir v.m.**
Komið er væl áleiðis við at greina neyðugar funktiónir til ymisk hølir og virksemi í eini hádeild og ymiskar avleiddar tillagingar, ið eru neyðugar í verandi bygningum sambandi við fakhøli (t.d. alis- og evnafrøði), felagshøli, hjáhøli, útiøki v.m. Hetta alt í sambandi við nú- og framtíðartørv innan skúlavirksemi.

Um tað hinvegin verður avgjørt at byggja til nýggja grunddeild er lutfalsliga skjótt at broyta uppá tilgongdina, men vil tað framvegis innibera ymiskar tillagingar í sambandi við fakhøli v.m., umframt umstøður til fleiri starvsfólk. Harumframt er innleiðandi farið undir greiningar í mun til hentleikar í skúlagarðinum.

**Ávegis kostnaðarmeting**
Á fundinum verður greitt frá ávegis kostnaðarmeting fyri nýbygging.

Havast skal eisini í huga, at Sankta Frans skúli, óansæð omanfyristandandi, yvir komandi árini hevur tørv á játtanum til vanligt viðlíkahald og dagføringar, umframt at skúlin eigur at fáa atkomuviðurskiftini, eisini fyri rørslutarnað, upp til nútíðarkrøvini. Hetta skal neyturviligvís ikki verða partur av verkætlanin við hølum til hádeild, men at tann byggiskráin sum verður gjørd til ítøkiligu verkætlanina tekur hædd fyri omanfyristandandi.

**Tíðarætlan**
Sbrt. býarsamtyktini frá 24. februar 2022 ynskir býráðið, at "... Sankta Frans skúli verður tvísporaður skúli frá forskúla til 9. flokk frá skúla árinum 2023/2024, ...".

Verkætlanartoymið metir, at tað óansæð val av omanfyri lýstu møguleikum, verður sera torført at fáa úvega eitt liðugt byggjarí/hølisloysn til skúlabyrjan eftir summarsteðgin 2023. Skal málið røkkast eigur tað í tilgongdini beinanvegin at kannast at útvega fyribilshølir, í eitt fyribilstíðarskeið, sum verður fram til minst jólini 2023 ella allarhelst summarfrítíðina 2024.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekturin, deildarleiðarin á bygningsdeildini og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til:

a). at samtykkja at útbygging av Sankta Frans skúla skal vera á matr. 807b.
b). at umrøða hvørt grunddeild ella hádeild skal byggjast á matr. 807b, við atliti til at umsitingin kemur við neyvari tilmæli um tað til komandi fund.

Málið verður beint í býráðið umvegis mentamálanevndina, byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 07. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmæli a) um at útbyggingin av Sankta Frans skúla verður á matr. nr. 807b treytað av góðkenning frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum. Tilmælið b) varð umrøtt.

**Ískoyti:**
UMMR hevur hin 8. apríl 2022 góðkent, at Sankta Frans skúli frá skúlaárinum 2023/24 verður tvísporaður frá forskúla til og við 9 frá skúlaárinum 2023/24. Somuleiðis er góðkent, at Skúlin á Fløtum verður trýsporaður frá forskúla til og við 6. flokk og fýra sporaður frá 7. til 9. Flokk frá skúlaárinum 2023/24.

Trivnaðarnevndin samtykti 7. apríl 2022 at staðseta nýggju skúlaloysina til Sankta Frans á matr.nr. 807b, sum í dag er Stella Maris Vøggustova. Í málslýsingini framgongur, at krøv verða sett til at útvega fleiri parkeringspláss í tí sambandi.

Samskifti hevur verið við KFUK um nýtt parkeringspláss á teirra øki framvið Varðagøtu. Samskifti hevur eisini fevnt um ynski frá KFUK um betran av almennu atgongdini til KFUK-húsið og brúkinum av KFUK-bønum.

KFUK ynskir at varðveita og menna KFUK-bøin sum virksemisøki hjá KFUK og samstundis gera hann lutvíst atkomuligan fyri gjøgnumgongd hjá almenninginum, umframt gera ovara partin vælegnaðan til kavaskreiðing. Eisini ynskir KFUK at fáa skipaði og nøktandi parkeringsviðurskifti til egið virksemi og í økinum í sambandi við kommunala stovns- og skúlavirksemi, umframt almenna parkering.

Út frá tørvinum hjá bæði KFUK og kommununi er gjørt uppskot til avtalu um atgongd og brúksrætt til partar av økinum, meðan kommunan átekur sær uppgávuna at fremja og rinda fyri ávís verkløg, sí uppskot til avtalu. Endalig tilsøgn fyriliggur ikki frá KFUK.

KFUK hevur áhuga í at gera avtalu við kommunuan nú í sambandi við, at felagsskapurin fyllir 100 ár í juni. Avtalan hevur fíggjarligan kostnað við sær fyri kommununa, eingin ítøkilig kostnaðarmeting fyriliggur. Játtan er ikki tøk til útinnan av avtaluni, men eigur at verða tikið sum liður í ætlaða skúlabyggingini.

**Skjal**
- Uppskot til brúks- og samstarvavtalu millum KFUK og Tórshavnar kommunu

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin, býarverkfrøðingurin, býararkitekturin, deildarleiðarin á bygningsdeildini og deildarleiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla nevndini til at samtykkja at gera brúks- og samstarvsavtalu við KFUK og at heimilia umsitingini at fáa til vega kostnaðarmeting sum grundarlag fyri seinni viðgerð av játtan og verkætlan.
**Trivnaðarnevndin 12. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, samtykkir at bjóða arbeiðið út í total arbeiðstøku við einum fíggjarkarmi á í mesta lagi 30 mió. kr.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, tekur ikki undir við málinum tí málið ikki er nóg væl lýst.

**Ískoyti:**
í sambandi við málið um dagføring av skúlabygnað mál nr. 21/02652 sendi Tórshavnar kommuna Uttanríkis og mentamálaráðnum umsókn um broytingar í bygnaðinum viðvíkjandi Sankta Frans skúla, og verður í svari frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum boðað frá, at ráðið góðkennir ætlaðu broytingina, at Sankta Frans skúli frá skúlaárinum 2023/24 verður tvísporaður frá forskúla til og við 9. flokki.

**Bygningur til hádeild**
Tosað hevur verið um, at nýggi bygningurin kundi verið til grunddeildina og frítíðarskúla til forskúla, men í samráð við skúlan er niðurstøðan, at mælt verður til, at nýggi bygningurin verður bygdur til hádeildina, tvs. 7., 8. og 9. flokk, og at høli til alis- og evnafrøði verður í nýggja

bygninginum, heldur enn at dagføra núverandi høli í høvuðsbygninginum, sum er til alisfrøði og til lívfrøði, til krøvini til alis- og evnafrøði í 8. og 9. flokki. Frítíðarskúlin í Sankta Frans ynskir at verða í lítla bygninginum i skúlagarðinum, heldur enn at flyta saman við grunddeildini í nýggjan bygning, sum eftir ætlan verður bygdur á økinum hjá Stella Maris.

7. flokkur verður roknaður sum partur av hádeildini, og nýggju skúlarnir í Tórshavnar kommunu eru bygdur soleiðis, at hvør deild hevur flokshøli í eind fyri seg. Tríggjar deildir eru í stóru skúlunum, tær eru grunddeild 1-3. fl., miðdeild 4.- 6. fl. og hádeild 7-9. fl. Í skúlum við forskúla, er forskúlin partur av grunddeildini. At deildirnar eru í somu eind, ger tað høgligari at arbeiða tvørtur um floksmørk, at skipa tiltøk á deildini, at samstarva bæði hjá næmingum og starvsfólkum og ikki minst at kenna seg sum eina eind.

At flokshølini hjá 7. flokki verða í nýggja bygninginum, gevur pláss fyri serflokkum í Sankta Frans skúla.

**Hølistørvur**
Samskift er við skúlastýrið og skúlans leiðslu um hølistørvin til tvísporaða hádeild 7.-9. fl., tvs. 6 flokkar. Harumframt skal gerast ein stova til alis- og evnafrøði. Aftrat koma aðrar vanligar hølisumstøður til starvsfólkarúm, næmingauppihald, ves, goymsla. Talan eru væntandi um byging uml. 1.100 fermetrar.

**Staðseting**
Skúlabygningurin verður bygdur á matr.nr. 807b. Ætlanin er, at aktomuviðurskifti og parkering verður frá Varðagøtu og til matr.nr. 807g, ið er kommunal ogn. Í hesum sambandi er ætlanin at gera avtalu við KFUK um verandi vegatkomu frá Varðagøtu um keyp og nýtslurætt til KFUK til parkering á matr.nr. 807g. Samskift verður eisini við ognina mat.nr. 807f um at keypa 220 m2 av stykkinum at leggja aftrat 807g. Fyrsta stig er at taka bygningin á matr.nr. 807b niður.

Hesar avtalur hava eisini týdning fyri tíðarætlanina og viðgerðina av byggisamtyktini fyri økið, sum má broytast, sí niðanfyri.

**Heimildir**
Sambært fólkaskúlalógini §57, stk. 4 góðkennir landsstýrimaðurin øll byggimál og allar útbyggingarætlanir, ásetur reglur byggimálum viðvíkjandi, og hvussu ein fólkaskúli verður innrættaður.

**Útiøki**
Útiøkini hjá skúlum skulu lagast til ymsu aldursbólkarnar, og nú hádeild verður í Sankta Frans skúla, er umráðandi, at umstøðurnar í skúlagarðinum vera góðar og eggja til spæl, læring og sosiala samveru. Útiøkið skal vera fjølbroytt og gjørt til ungfólk í aldrinum 13-16 ár. Útiøkið eigur at vera góður karmur um spæl, rørslu og uttandura læringsrúm, tað skal vera stimbrandi hjá næmingum og stuðla teimum í at røra seg. Hetta hevur týdning fyri trivnað, læru, motorik, vælveru og heilsa hjá tí einstaka.

**Byggisamtykt**
Sambært almennu byggisamtyktini kunnu ávikavist byggistigið og nýtslustigið, í D3-umráði, verða í mesta lagi 25 % og 50 % av grundøkjavíddini. Roknast kann við, at uml. 500-600 fermetrar fara til parkering. Útiøkini verða tí, um byggingin er í tveimum hæddum, uml. 1.600-1.700 fermetrar. Tað eru uml. 10 – 12 fermetrar fyri hvønn næming. Í verandi SFS eru uml. 14 fermetrar fyri hvønn næming. Danskar vegleiðingar viðmæla minst 50 fermetrar. Í Eystursskúlanum og Skúlanum á Fløtum eru ávikavist 21 og 31 fermetrar. Ein grundgeving fyri at tað kann góðtakast at hava so lítið útiøki til hádeildina í SFS er, at beint sunnan fyri skúla er trøðin hjá KFUK, sum í skúlatíðini kann verða tøk hjá næminginum í hádeildini.

Grundøkjavíddin skal økjast uml. 220 m2, har tað eftir uppskotinum er neyðugt við broyting í byggisamtyktini, tá A1 øki til sethús og D3 øki til almennar bygningar verða løgd saman.

**Tíðarætlan**
Fyrsta stigið verður at víðka um grundøkjavíddina, har Stella Maris er, so pláss verður til ein nýggjan skúlabygning. Umráðandi er eisini at fáa gjørt eina avtalu við KFUK um vegatkomuna frá Varðagøtu til KFUK, so hendan vegatkoman eisini verður til nýggja skúlabygningin. At avgreiða hesi viðurskifti hevur skund, tí tað er ein fyritreyt fyri, at býarskipanardeildin kann byrja tilgongd at broyta bygginsamtyktina fyri part av A1-økinum, vestan fyri matr.nr. 807b, so hesin partur verður partur av D3-økinum, líka sum matr.nr. 807b har Stella Maris er. Er einki óvæntað, tekur ein byggisamtyktarbroyting vanliga uml. 6 mánaðir at avgreiða.

Meðan omanfyri nevnda er í gongd, kann fyrireikingarbeiðið gerast til niðurtøkuna av verandi bygningi. Sambært niðurstøðu hjá leiðsluni, frá 20.01.2022, ið byggir á tilmæli frá uttanhýsis ráðgevum, loysir tað seg ikki at umvæla og dagføra verandi bygning.

Møguligt er eisini í sama tíðarskeiði at fremja sjálvt niðurtøkuarbeiðið umframt at umleggja og endurnýggja gomlu kloakkleiðingina sum liggur oman í gjøgnum grundøkið, har verandi bygningur stendur.

**Ætlað mannagongd og útbjóðing**
Tilgongdin at gera byggiskrá og avgreiða brúkaraviðurskiftini, herundir endaligt rúmskema, kann eisini fara fram í sama í sama tíðarskeiðið. Tað er í hesum sambandi umráðandi at fáa nágreinað alla útgerð, tekniskar skipanir, krøv til yvirflatur v.m. í rúmskema í byggiskrá. Byggiskráin skal haraftrat vísa til viðkomandi reglugerðir, kunngerðir, normar, SBI-vegleiðingar, aðrar vegleiðingar og krøv til arbeiðsumhvørvi. Herundir fastleggja málbar góðskustig.

Útbóðingartilfarið skal tryggja, at býarskipanarlig atlit verða tikin til umhvørvið á staðnum, t.d. at varðveita stóran part av verandi grótgarði og størru trøini. Eisini metir bygningsdeildin, at heildarbeiðstøkan, eins og í Skúlanum á Fløtum, ikki skal fevna um list, kunningarskelti, leyst innbúgv, teldur, skermar o.l. útgerð.

Á fíggjarnevndarfundi 19. okt. 2022 varð samtykt, "...at bjóða arbeiðið út í total arbeiðstøku...". Hetta er at skilja sum heildararbeiðstøka. Her metir tekniska umsitingin, at leisturin eigur at verða soleiðis, at tíð og játtan beinanvegin eru tøk.

**Kostnaðarmeting**
Ein kostnaðarmeting er viðheft. Kostnaðarmetingin byggir á framskrivaðan fermetrakostnað fyri endaliga kostnaðin fyri Skúlan á Fløtum. Afturat er íroknað kostnaður fyri ymiskt, sum kemur afturat í hesi verkætlanini, samanborið við Skúlan á Fløtum.

Eingin játtan er sett av til fyrireiking til útboð. Kostnaðarmetingin at gera útbjóðingartilfar, sum inniheldur byggiskrá við rúmskema, nágreining av útgerð, tekniskum skipanum, krøv til yvirflatur v.m., umframt at vísa til viðkomandi reglugerðir, kunngerðir, normar, SBI-vegleiðingar, aðrar vegleiðingar og krøv til arbeiðsumhvørvi, herundir at fastleggja málbar góðskustig, og at útbóðingartilfarið tryggjar, at býarskipanarlig atlit verða tikin til umhvørvið á staðnum er mett til kr. 0,5 mió.

Eisini er eitt uppskot til tíðarætlan fyri 2022 og 2023, ætlanin er eisini viðheft.

**Hjáløgd skjøl:**
SFS kostnaðarmeting Uppskot 1 20221024
Rúmskema í gerð Fyribils 20220920
Tilmæli frá býarskipanardeildini í sambandi við hádeild til Sankta Frans skúla
Uppskot til tíðarætlan

Skjølini eru í skjalamappu 22/00894-23

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin, leiðarin á bygningsdeildini og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at samtykkja:

a) at bygningur til hádeild hjá Sankta Frans skúla verður bygdur á 807b og 807g,
b) at gera útbjóðingartilfar, sum inniheldur byggiskrá og kravspesifikatión til skúlabygningin v.m. sum lýst omanfyri, og at bjóða arbeiðið út í heildararbeiðstøku,
c) at gera útbjóðingartilfar, at bjóða út og at taka av tilboði og gera sáttmála um arbeiðið at taka niður bygningin á matr.nr. 807b,
d) at játta kr. 0,5 mió av tøkum løgukarmi 4175 LK 41014 Dagføring, Skúlin við Løgmannabreyt, og stovna nýggja løgukontu 4176 Hádeild Sankta Frans skúli til at gera útbjóðingartilfarið pkt. b) og c), og
e) at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at viðgera broyting í byggisamtykt fyri økið.

Og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 25. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við pkt. a) og e), og at bjóða út í heildararbeiðstøku byggingina av skúlabygningi uml. 1.100 m2 umframt útiøki v.m., innanfyri ein karm uppá kr. 30 mió, harímillum at gera byggiskrá við kravspesifikatión, og at taka niður og burturbeina verandi bygning á matr.nr. 807b, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 26. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við Trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at byggja skúlabygning v.m. til hádeild varð bjóðað út til tveir arbeiðstakarar – Articon og HVT. Eitt tilboð kom inn, tað er frá HVT, og sum lýsir uppskot teirra til bygning, innrætting og funktiónir, byggitilfar v.m.

Í løtuni eru samráðingar um sáttmála við HVT, og ætlanin er, at býráðið kann samtykkja sáttmála og játta fíggingina til byggingina á næsta fundi.

Á fundinum verður kunnað um innkomna uppskotið til skúlabygning.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka kunningina til eftirtektar.

**Trivnaðarnevndin 09. februar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Málið útsett.

**Ískoyti:**
Við støði í uppskotinum og tilboðnum frá HVT Sp/f til nýggja hádeild til Sankta Frans skúla er samráðst um heildararbeiðstakarasáttmála. Sáttmálaupphæddin er kr. 28,125 mió u/mvg.

Skúlin hevði bert eina viðmerking til bygningsuppskotið, og tað var at fáa gjørt eitt reingerðarrúm eitt sindur størri. Hædd verður tikið fyri tí í prosjekteringini. Í samráðingunum er lendisarbeiðið eisini útgreinað.

Kloakkarbeiðið og parkeringsøkið fer í stóran mun at ganga fyri seg uttan fyri arbeiðstøkumarkið hjá HVT. Tað sæst aftur í kostnaðarmetingini sum byggiharraveiting, tvs. kostnaður aftrat sáttmálaupphæddini. Verandi rottangi verður tømdur og burturbeindur. Verandi høvuðskloakk, ið gongur í gjøgnum matr 807b, skal umleggjast, áðrenn jørð og kloakkarbeiði byrjar. Nýggja kloakleiðingin frá bygninginum verður bundin í nýtt reinsiverk. Parkeringsplássi verður avhendað til byggiharran planerað við 0-75 við regnavatnsleiðingum og vegristum.

Haraftrat eru vanligar byggiharraútreiðslur í sambandi við bygging, t.e. óvæntað, prís- og lønarvøkstur, byggiharraleiðsla og prosjektumsiting, listprýði 1,5%, lásaskipan, høvuðsreingerð, innbúgv, útbúnaður, útgerð til úiøkið og mvg.

Samlaða kostnaðarmetingin fyri alt omanfyri nevnda er kr. 40.808.000, sí hjáløgdu kostnaðarmeting.

Sambært tíðarætlanini verður byggiplássið fyrireikað frá 6. mars 2023, og byrjað verður at taka niður Stella Maris-bygningin frá 22. mars 2023. Øll byggingin av hádeildini skal verða liðug og handað byggiharranum í seinasta lagi 8. juli 2024.

Í løgujátattanini til byggingina av hádeildini fyri 2023 eru játtaðar kr. 20 mió. Skal verkætlanin, sum hon nú fyriliggur eftir samráðingarnar, og har øll neyðug viðurskifti eru tikin við, skulu játtast kr. 20,8 mió aftrat. Skotið verður upp, at hetta verður fíggjað í løgujáttanini fyri 2024.

Skjøl:
-Heildararbeiðstakarasáttmáli
-Dagførd tilboðsmappa
-Kostnaðarmeting

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at samtykkja uppskotið til heildararbeiðsstøðusáttmála við HVT Sp/f uppá kr. 28,125 mió u/mvg, og at samlaða verkætlanin heldur seg innanfyri ein kostnaðarkarm uppá kr. 40.808.000 v/mvg.

Mælt verður í hesum sambandi til at játta kr. 19.425.000 av kontu 4176 Nýbygging skúlar, løgukarmi LK41018 til løgukontu L41018 Framhaldsdeild í Sankta Frans skúla, og at írestandi játtan kr. 20.808.000 verður fíggjað í løgujáttanini fyri 2024, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 22. februar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. februar 2023:** Ein meiriluti Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekksteina tekur undir við Trivnaðarnevndini við teirri broyting, at játtaðar verða kr. 38 mió. til verkætlanina og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, tekur undir við Trivnaðarnevndini og beinir málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Elsu Berg um at tikið verður undir við uppruna tilmælinum um at játta kr 40 mió umframt at játta kr. 500.000 til sólorku í 2024, ið fall við 5 atkvøðum fyri, 7 ímóti og 1 blankari.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg. Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Kristianna Winther Poulsen, Súna Mørk og Bjørg Dam

Blankt atkvøddi: Birgir Nielsen.

Síðani varð atkvøtt um samtyktina hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Síðani býráðssamtyktina 23. februar 2023 er heildararbeiðs-tøkusáttmáli gjørdur við HVT, arbeiðið er komið væl ávegis. Arbeiðið hevur sum heild gingið væl, bygningurin varð reistur og fyribils innilokaður á heysti 2023.

Verkætlanarleiðarin hevur, í samráð við stýris- og prosjektbólkin arbeitt við, at fáa til vega eitt fullfíggja yvirlit yvir allar veitingar og eyðmerkja møguligar avbjóðingar. Hetta í mun til tørvin hjá skúlanum og eisini fyri at fáa til vega neyðugar góðkenningar frá avvarandi myndugleikum, so eitt endaligt nýtsluloyvið kann fáast, tá heildararbeiðstakarin avhendar bygningin tann 8. juli 2024.

Við støði í skipanar-/prosjektuppskoti um atkomu, parkeringstørvi og keyp av lendi er gjørd munnlig avtala við nevndina í KFUK, sum verður løgd fyri aðalfund teirra til støðutakan í mars. Avtalan er fortreyt fyri nýtsluloyvi. HVT gevur tilboð um veitingar og arbeiði, so sum at endurnýggja KFUK-brekkuna, parkerings-pláss, gyrðingar og stuðlamúrar. Eisini íroknað gøtuljós, leiðingar í lendi, kantsteinar asfalt og skráar. Sí meira niðanfyri.

**Aftrat eru hesar uppgávur avgreiddar:**

- Greinað allar veitingar, sum eru aftrat heildararbeiðstøkuni.
- Liðugtgerð av rúmskemuðum og nágreiðan krøvini øll til øll rúmini.
- Eyðmerkt tørvin viðv. CTS-stýringum og ABA-anleggið við atliti at inniumhvørvið, trygd og at stýra orkunýtsluni.
- Avtalað er gjørd við Fjarhitafelagið um fyribils orkuskipan, luft til vatn, staðseting av hesi, og tíðspunkt tá Fjarhitafelagið skal veita orku til nýggja bygningin.
- Arbeitt verður við krøvum til internet og fiburnet, harundir krøvini til Skúlanet.
- Listprýðisarbeiðið er sett i gongd.
- Kostnaðarmetingin fyri byggingina er endurskoðað og dagførd, har nýggjastu tilboðini og avtaluseðlarnar frá HVT eru tiknir við.

**Støðan og átrokandi uppgávur at avgreiða ultimo januar 2024**

- Heildararbeiðstakarin skal ikki seinkast í at fáa til vega allar neyðugar tilfarsveitingar, herundir eisini neyðugar tilfarsveitingar í sambandi við tilkeypini. Hetta soleiðis, at alt er gjørt fyri, at heildararbeiðstakarin kann avhenda byggiharranum ein fullfíggjaðan skúlabygning, íroknað tilkeypini, í seinasta lagi 8. juli 2024.
- Tilboð uppá fullfíggjaða liðugtgerð av alis- og evnafrøðisstovu, íroknað alt fast innbúgv eisini til at atknýtta goymslurúmið.
- Í februar 2024 skulu fáast til vega tilboð uppá fast innbúgv til øll rúm, her í íroknað talgildar undirvísingarskíggjar.
- Í februar/mars 2024 verður skipað fyri útboði og lisitatión uppá leyst innbúgv. Hetta soleiðis at leysa innbúgvið verður veitt og uppsett í skúlanum í viku 29, vikuna eftir avhendingina.
- Ískoytissáttmáli til heildararbeiðstøkusáttmálan verður gjørdur við heildararbeiðstakaran um lendi- og lendisfestisarbeiðið í sambandi KFUK-brekkuna og parkeringina, sbrt. tilboði frá heildararbeiðstakaranum, dagf. 09.01.2024. Her er sera átrokandi, at projekteringsarbeiðið byrjar beinanvegin, fyri at leiðslan kann avgreiða avtaluna við KFUK.

**Skjøl:**

- Dagførd kostnaðarmeting, revisión C, dagf. 25.01.2024.
- Dagførd tíðarætlan fram til skúlabyrjanina miðjan august 2024.
- Endaligt skipanaruppskot til KFUK-brekkuna, parkeringviðurskiftir v.m.

**Samanumtøka:**
Verkætlanin, og viðlagda dagførda kostnaðarmetingin, revisión C, fevna nú um allar neyðugar veitingar til tess, at skúlin lýkur allar neyðugar treytir og krøv.

Verkætlanin og dagførda kostnaðarmetingin fevna eisini um allarflestu veitingar í skulu til, fyri at KFUK-brekkan og parkeringsviðurskiftini verða nøktandi hjá bæði KFUK og nýggja skúlabygninginum, og sum er fortreyt fyri nýtsluloyvi. Kostnaður íroknað lendiskeyp er uml. kr. 5,5 mió.

Haraftrat eru aðrar uml. kr 4 mió til sjálvan bygningin, sum fevnir um eina røð av postum, har teir størstu CTC-stýringar og ABA (kr. 0,75 mió) eru alis- evnafrøðisstovan (uml. 0.7 mió), og keyp av lendi (kr. 0,756 uttan tinglýsing og matrikulering).

Eftir hesum er neyðugt at víðka kostnaðarkarmin úr kr. 38 mió v/mvg til kr. 47,5 mió v/mvg, tvs. ein fíggjartørvur á kr. 9,5 mió. Slík løgujáttan er ikki tøk á grein 4 í fíggjarætlanini.

Mest týðandi í løtuni er at tryggja, at bygningurin verður liðugur til tíðina umframt avtaluna við KFUK, har fíggjartørvurin tilsamans er kr. 5 mió. Støðutakan til endaliga lendisprojektið og fígging av tí verður at taka upp seinni.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at játta kr. 5 mió av tøkum peningi 2023 til liðugtgerð av skúlabygninginum og keyp av lendinum sum eykajáttan til løgukontu L41018 Hádeild Sankta Frans skúli og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið til tvær viðgerðir.

**Trivnaðarnevndin 26. januar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið til tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2024:** Málið útsett.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2024:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um fíggjartørv.

**Trivnaðarnevndin 11. mars 2024:** Samtykt at beina málið í fíggjarnevndina so at fígging verður tøk sambært tíðarætlanina.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2024:** Málið útsett.

**Ískoyti:**
Í sambandi við, at kommunan byggir nýggjan skúlabygning á matr.nr. 807b, Tórshavn, hevur kommunan tørv á at fáa vegatkomu til matr.nr. 807g, har gerast skal parkeringspláss til skúlan og til matr.nr. 807b.

Sambært hesi avtalu keypir kommunan netto 372 fermetrar av lendi til veg og parkering burtur av matr.nr. 807a, og selur samstundis uml. 92 fermetrar til KFUK, sum verða lagdir afturat matr.nr. 807a, við verandi KFUK bygningi.

KFUK fær í hesum sambandi tinglýstan óskerdan atkomurætt eftir vegnum til KFUK-húsið og nýtt parkeringsøki á egnum matrikkli. Ætlandi verða matrikklarnir 807b, 807g og teir umleið 372 fermetrarnir,

sum kommunan keypir burtur úr matr.nr. 807a, lagdir saman í ein matrikkul. Samstundis keypir KFUK umleið 92m², sum verða lagdir aftur at matr. 807a, har verandi KFUK bygningur stendur.

Umframt gjald fyri keypt lendi, sum er kr. 756.000 uttan tinglýsingarkostnað, fevnir avtalan eisini um ymisk arbeiði, sum kommunan ger og rindar, t.e. parkeringspláss og almenna gøtu.

Býráðið hevur við fyrstu viðgerð samtykt játtan til at keypa lendið, men krevur tvær viðgerðir. Aðrir partar av avtaluni eru í ikki fíggjaðir, sum kunnað varð um á fundi 11. mars 2024.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at góðkenna avtaluna við KFUK.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Víst verður til fíggjartørv kr. 9,5 mió til býráðsfundin 29. februar, har játtaðar vórðu kr. 5 mió. Eisini verður víst til samtyktu avtaluna við KFUK.

Skotið verður upp at hækka játtanina við kr. 4 mió til at gera verkætlanina lidna.

Tað vil siga, at samlaði játtaðarkarmurin verður kr. 47 mió, og at verkætlanin tillagar seg hesa upphædd. Mett verður, at tað ber til treytað av, at arbeiðstakarin sleppur í gongd beinanvegin, so at arbeiðið er liðugt til skúlaársbyrjan.

Skotið verður upp at fíggja tær kr. 4 mió soleiðis:
- L23002 Tannlæknamiðstøð kr. 1 mió
- LK27013 Eldradepil í Kollafirði kr. 1 mió
- LK61027 Sjóvinnuhúsið kr. 1 mió
- LK81043 Parkeringstunnil kr. 1 mió

Upphæddin at játta til løgukontu L41018 Hádeild Sankta Frans skúli.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at játta kr. 4 mió sambært uppskotinum omanfyri til liðuggerð av byggingini, og at beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 23. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 79/24 Framleigusáttmáli við Tórshavnar Golffelag um felagshús á Glyvursnesi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.04.2024 | 80/24 | 24/02073-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 79/24 | 24/02073-1 |

**Upprunin til málið**
Framleigusáttmáli.

**Lýsing av málinum**
Sum liður í sáttmálanum um endurgjald fyri lendi til golfvøll millum kommununa, Búnaðarstovuna og festaran frá 2019 er í grein 2 ásett, at Búnaðarstovan letur til kommununa ognarrættin yvir seyðahúsinum. Festarin er farin av lendinum og úr húsinum.

Kommunan hevur sambært leigusáttmálanum um lendi rætt til at framleiga seyðahúsið til virksemi, sum er heimilað í galdandi byggisamtykt og øðrum myndugleika ásetingum. Búnaðarstovan skal geva kommununi loyvi at framleiga bygningin frammanundan. Búnaðarstovan hevur upplýst, at tey eru til reiðar at geva loyvið til framleigusáttmála.

Ætlanin við húsinum er fyrst og fremst knýtt at golfvøllinum og sum felagshús hjá golffelagnum.

Talan er um ein uml. 400 m2 stóran bygning, har størsti parturin er fjós og annað knýtt at landbúnaði. Bygningurin tørvar ávísar ábøtur. Streymur er ikki lagdur til bygningin, men ætlanin er at leggja leiðing til húsið sum part av golfvallarverkætlanini (uml. 400 m frá vegnum).
Golffelagið hevur ætlan um at seta hol á ætlan um at gera seyðahúsið á Glyvursnesi um til felagshús íroknað venjingarumstøður, sí umsókn í máli 22/01726. At fáa hesar umstøður hevur týdning, so at golfítróttin kann mennast og limirnir trívast so hvørt golfvøllurin verður bygdur.

Í uppskotinum til avtalu er eisini ásett, at kommunan kann hava høli í húsinum til útgerð og tilfar v.m. í sambandi við við røkt og viðlíkahald av golfvøllinum og kringumstøðum annars.

Vísandi til, at felagið næstu árini fer at dagføra og umbyggja húsið til virksemið, er uppskot, at eingin leigukostnaður verður ásettur tíðarskeiðið fram til 1. januar 2034, tá ið framleigusáttmálin eftir ætan skal takast uppaftur. Felagið rindar orkuútreiðslur.

Longd leigumálsins er sambært uppskotinum frá 1. mai 2024 til 1. januar 2034.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Sáttmáli millum Tórshavnar kommunu, Búnaðarstovuna og festara um endurgjald fyri lendi á Glyvursnesi til golfvøll.

Leigusáttmáli millum Búnaðarstovuna og Tórshavnar kommunu um lendi til golfvøll.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Golfvøllur á Glyvursnesi – byggiverkætlan, 19/04397
Tórshavnar Golffelag : Umsókn um stuðul til simulator- og venjingarhøli, 22/01726

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja uppskotið til framleigusáttmála við Tórshavnar Golffelag til felagshús og beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Jákup Dam luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

## 80/24 Útbygging - Dagstovnurin á Hamrium

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 05.07.2021 | 196/21 | 21/02924-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 11.05.2022 | 111/22 | 21/02924-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 25.10.2022 | 207/22 | 21/02924-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 26.10.2022 | 272/22 | 21/02924-1 |
| 5 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 234/22 | 21/02924-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 21.03.2023 | 69/23 | 21/02924-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.03.2023 | 95/23 | 21/02924-1 |
| 8 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 66/23 | 21/02924-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 13.09.2023 | 148/23 | 21/02924-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 219/23 | 21/02924-1 |
| 11 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 204/23 | 21/02924-1 |
| 12 Mentamálanevndin | 01.11.2023 | 180/23 | 21/02924-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 22.11.2023 | 320/23 | 21/02924-1 |
| 14 Býráðsfundur | 23.11.2023 | 273/23 | 21/02924-1 |
| 15 Býráðsfundur | 14.12.2023 | 309/23 | 21/02924-1 |
| 16 Mentamálanevndin | 14.02.2024 | 40/24 | 21/02924-1 |
| 17 Mentamálanevndin | 10.04.2024 | 57/24 | 21/02924-1 |
| 18 Fíggjarnevndin | 17.04.2024 | 81/24 | 21/02924-1 |
| 19 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 80/24 | 21/02924-1 |

**Upprunin til málið**
Økja plásskapasitetin á dagstovnaøkinum sum heild

**Lýsing av málinum**
Í 2019 var útboð um útbygging av tveimum dagstovnum – Dagstovninum á Hamrinum við tveimum stovum og Býlingshúsinum vesturi á Flat við fýra stovum. Býráðið samtykti í tí umfarinum bert at byggja út Býlingshúsið vesturi á Flat.

Stór útstykkingarætlan er í umbúna oman fyri Argjahamar. Í uppskoti hevur verið at byggja nýggjan stovn við síðuna av Dagstovninum á Hamrinum, men annar møguleiki er at taka uppaftur verkætlanina og tilboðið, sum Búsetur vann, um at byggja út Dagstovnin á Hamrinum tó broytt til fimm stovur, ið økir plásskapasitetin við 76 plássum (36 vøggustovupláss og 40 barnagarðsstovupláss).

Lýsing av plásstørvi
Gjørd er nýggj greining av plásstørvinum í Tórshavnar kommunu her og nú og komandi árini, sí skjal. Tilflyting og høg burðatøl seinastu árini gera, at átrokandi tørvur er á fleiri vøggu- og barnagarðsstovuplássum í kommununi bæði her og nú og komandi árini.

Í juni 2021 eru umleið 1.780 stovnspláss í Tórshavnar kommunu 0-6 ár. Talan er um umleið 560 vøggustovupláss og 1.220 barnagarðsstovupláss.

Sbrt. greiningini er tørvurin her og nú á 100-120 fleiri vøggustovuplássum og 90-100 fleiri barnagarðsstovuplássum. Tá er talt við, at á fleiri stovnum eru ov nógv børn inni enn stovnurin er bygdur til, at nógv børn eru 1,5-2 ár, áðrenn tey byrja á stovni (hava bíðað eftir plássi), og aftur onnur, sum eru á ynskilista uttan yvirhøvur at bílagt pláss í skipanini.

Verða hesi stovnsplássini útvegað afturat, hevði plásskapasiteturin verið 660-680 vøggustovupláss (560 í dag) og 1.310-1.320 barnagarðsstovupláss (1.220 í dag).

Um burðatølini árini 2022-2027 vera sum undanfarnu árini uml. 300 um árið og við somu tilflyting uml. 1,5% um árið, so veksur plásstørvurin eitt vet aftrat.

Aftrat avbjóðingini við plásstroti er starvsfólkatrot.

Útbyggja plásskapasitetin
Við Miðstovninum koma nýggj pláss aftrat væntandi um ársskiftið ella stutt eftir. Eftir summarfrítíðina lata nakrar stovur upp í Hoydølum, sum tó er tíðaravmarkað loysn.

Umframt verkætlanina á Hamrinum og seinni Dagstovninum á Argjum, eru aðrir dagstovnar, sum kunnu tillagast og byggjast út til tess at økja plásskapasitin. Hetta verður lýst nærri eftir summarfrítíðina eisini í hvønn mun tað loysir seg í mun til íløguna.

Stóri vøksturin í Hoyvík ger tað tó eisini alneyðugt at byggja nýggjan og helst ríkiliga stóran dagstovn har komandi árini.

Viðvíkjandi útbyggingarætlanini Dagstovnurin á Hamrinum er uppskot um at fáa í lag samráðing um heildararbeiðstøkusáttmála við Búsetur um broytta útbyggingarætlan við støði í tilboðnum frá 2019, sí kostnaðarmeting (skjal).

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Útstykkingarætlanin oman fyri Argjahamar
Vegatkoma frá rundkoyringini Glyvursvegur/Hamarin
Dagstovnurin á Argjum
Útbygging av Dagstovninum á Hamrinum

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Upprit um tørvin á dagstovnaplássum nú og framyvir
Kostnaðarmeting/tilboð útbygging á Hamrinum

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>24. april 2024 | Blað nr.: 341<br><br>Formansins merki: |

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/læættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla nevndini til at heimila umsitingini at taka upp samráðingar um heildararbeiðstøkusáttmála við Búsetur um broytta ætlan at byggja út Dagstovnin á Hamrinum við støði í tilboðnum frá 2019 at leggja aftur fyri nevndina.

**Mentamálanevndin 05. juli 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur.

**Mentamálanevndin 11. mai 2022:** Tikið av skrá.

**Ìskoyti:**
Umsitingin hevur tikið upp samráðing um heildararbeiðstøkusáttmála við P/F Búsetur um broytta ætlan at byggja út Dagstovnin á Hamrinum við støði í tilboðnum frá 2019.

Tillagingar eru gjørdar í verkætlanini. Dagstovnurin á Hamrinum er broyttur til 3 barnagarðsstovur og 3 vøggustovur, felagsøki og køk, starvsfólkarúm í miðjuni í bygninginum. Støddin er uml. 1.297m2, 6 stovur tilsamans.

P/F Búsetur boðar frá, at teir klára at byggja dagstovnin fyri uppruna m2 kostnaðin við index regulering. Tá er byggingin í samsvari við byggiskrá frá 13-03-2019.

Avbjóðingar hava verið við atkomuvegi og parkeringsøki rundanum nýggja tilbygningin á Dagstovnin á Hamrinum, tí stórur hæddarmunur er á lendinum og trongt er at útbyggja verandi parkeringspláss.

Avtalað er við Búsetur at gera arbeiðsvegin niðan til komandi Dagstovnin á Hamrinum. Parkeringspláss og atkomuvegur er ikki við í hesum prosjekti, men ein heildarætlan er gjørd fyri økið, har ið hetta arbeiðið verður gjørt liðugt seinni.

Parkeringsviðurskiftini til núverandi Dagstovnin á Hamrinum eru sum nú er í minna lagi. Umsitingin mælir til, at parkerings- og trafikkviðurskiftini skulu vera nøktandi og loyst, áðrenn verkætlanin er liðug. Talan er um tvífaldan tørv av parkeringsplássum, sum fáast skulu til vega.

Uml. kr. 450.000 kr eru settar av í tilboðnum hjá P/F Búsetur til spælipláss. Hetta er ikki nøktandi til at gera eitt fullgjørt og nútíðarhóskandi spælipláss. Meiri peningur má tí setast av til hetta seinni.

Tilboð frá P/F Búsetur við indexregulering og við øllum er kr. 54.038.606,00 v/ kommunalum mvg.

Innanfyri ein samlaðan karm uppá kr. 57 mió mvg íroknað er fíggjað arbeiðsvegur, tryggingar, listprýði, íbindingar v.m.

Tó er atkomuvegur, parkeringspláss og liðugtgerð av spæliplássi ikki íroknað.

Í sambandi við útbyggingina er neyðugt at broyta byggisamtyktina fyri økið.

**Fígging**
Tøkur peningur er kr. 31.000.000 á íløgujáttan innan grein 3 Børn og ung. Møguleiki er at fíggja kr. 10.000.000 í fíggjarætlanini fyri 2023, og at játta restupphæddina uppá kr. 16.000.000 í fíggjarætlanini fyri 2024.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og leiðarin á bygningsdeildini mæla til, at:

- Samtykt verður at útbyggja Dagstovnin á Hamrinum eftir omanfyristandandi leisti.
- Umsitingin fær heimild at taka av tilboðnum og at gera heildararbeiðstøkusáttmála við P/F Búsetur um at byggja út Dagstovnum á Hamrinum.
- Játta samlaða kostnaðin á kr. 57.000.000, fíggjað soleiðis:
    - kr. 30.000.000 verða fluttar av stovnsnummar 3175, LK31011 Útbygging Dagstovnurin á Hamrinum,
    - 1.000.000 verða fluttar av stovnsnummar 3175, LK31013 Nýggjur dagstovnur á Argjum,
    - kr. 10.000.000 verða játtaðar í fíggjarætlanini fyri 2023,
    - restupphæddin kr. 16.000.000 verður játtað í fíggjarætlanini fyri 2024, og at
    - fíggingin verður flutt til nýggja verkætlan 3175, L31011 Útbygging Dagstovnurin á Hamrinum.
- Heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at viðgera broyting av byggisamtyktini fyri økið.

At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 25. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið. Koma broytingar fyri skal málið fyri nevnd aftur.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Enmælt samtykt.

**Ískoyti**
Avbjóðingar hava verið við at gera atkomu og byggipláss inn til Dagstovnin á Hamrinum. Atkoma og byggipláss liggja inni á arbeiðstøkumarkinum at gera útstykkingina oman fyri Argjahamar (ÚOA) hjá MT Højgaard Føroyar (hereftir MTH) við undirarbeiðstakaranum RTS Bygging. Atkoman og byggiplássið kunnu eftirfylgjandi gerast partur av atkomu og parkeringsøki til tann útbygda dagstovnin á Hamrinum.

Umsitingin hevur verið í samráðingum við MTH um at gera hetta arbeiðið sum eykaarbeiði við somu eindarprísum sum í verkætlanini ÚOA. Hetta er játtað og endaliga tilboðið frá MTH er kr. 1.940.252,50 við mvg.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini, leiðarin á bygningsdeildini og býarverkfrøðingurin mæla til, at:

- Samtykt verður at fylgja omanfyristandandi leisti.
- Umsitingin fær heimild at taka av omanfyristandandi tilboði hjá MTH.
- Játta samlaða kostnaðin á kr. 1.940.252,50 kr við mvg. fíggjað soleiðis:

- Verkætlan L64019, Útstykking oman fyri Argjahamar leggur út fyri omanfyri lýsta jørðarbeiðið í 2023.
- Kr. 1.940.252,50 við mvg verða játtaðar í fíggjarætlanini fyri 2024.
- Fíggingin verður flutt til verkætlan 3175, L31011 Útbygging Dagstovnurin á Hamrinum.
- L31011 Útbygging Dagstovnurin á Hamrinum endurrindar í 2024 verkætlanini L64019, Útstykking oman fyri Argjahamar fyri goldin útlegg. Verkætlanarleiðarin fyri L64019 hevur ábyrgd av at gera eina uppgerð innan 1. mars 2024 og at senda uppgerðina til fíggjardeildina.

-At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 21. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Einmælt samtykt.

Arbeiðið hjá undirarbeiðstakaranum RTS Bygging á útgrevstur, spreinging og planering fyri atkomu og byggipláss til Dagstovnin á Harminum er liðugt. Klárt er nú hjá P/F Búsetur at útbyggja Dagstovnin á Hamrinum.

Sáttmáli at útbyggja Dagstovnin á Hamrinum varð undirskrivaður 23.11.2022 millum Tórshavnar kommunu og P/F Búsetur.

Í sambandi við, at avbjóðingar hava verið við at gera atkomu og byggipláss inn til Dagstovnin á Hamrinum, krevja P/F Búsetur endurgjald fyri ampa, mistan vinning og beinleiðis útreiðslur, sum Búsetur hevur havt av, at arbeiðið ikki kundi setast í gongd sambært sáttmála um útbygging av Dagstovninum á Hamrinum, dagfestur 23.11.2022. Somuleiðis hevur tíðarætlanin forskotið seg, soleiðis at arbeiðið hjá P/F Búsetur nú verður meiri tarnað av vetrartíðini enn áður ætlað.

Umsitingin hevur verið í samráðingum við Búsetur um krav á endurgjald fyri ampa, mistan vinning og beinleiðis útreiðslur, sum Búsetur hevur havt av, at arbeiðið ikki kundi setast í gongd.

Umsitingin hevur biðið P/F Búsetur gera nýggja tíðarætlan, sum skal leggjast við í eina endurgjaldsavtalu. Semjan er treytað av, at alt yvirskotsgrót frá verkætlanini Dagstovninum á Hamrinum kann koyrast út á økið innanfyri 1 km, sum báðir partar eru samdir um. Somuleiðis er semjan treytað av, at býráðið góðkennir endurgjaldsavtaluna.

Endurgjaldsavtalan er áljóðandi 900.000 kr u/mvg, sum svarar til ein samlaðan kostnað á 956.250 kr í mvg (6,25%).

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini, leiðarin á bygningsdeildini og býarverkfrøðingurin mæla til at samtykkja endurgjaldsavtalu millum P/F Búsetur og Tórshavnar kommunu og í tí sambandi at játta kr. 956.250 íroknað mvg av fíggjarætlanini 2025 til kontu 3175 Barnaansing, L31011 Útbygging, Dagstovnurin á Hamrinum. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 13. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Leiðarin á Barna og ungdómsdeildini, leiðarin á Dagstovninum á Hamrinum og eindarleiðarin hjá B&U hava boðað frá, at flow og funktión ikki er nøktandi í verandi uppskoti á Dagstovninum á Hamrinum.

Í tí sambandi hevur umsitingin verið í samráðingum við Búsetur um at endurskoða uppskotið á Dagstovnin á Hamrinum, sum allir partar nú eru nøgdir við. Uppskotið fevnir seg í høvuðsheitum um:

- at vaksa um barnagarðsstovu til vøggustovu.
- at flyta vøggustovuna og vognrúmið í verandi bygningi saman við øllum vøggustovunum, so vøggustovur eru samlaðar og atskildar frá barnagarðsstovunum.
- at flyta køkin í útbyggingini og umbyggja og víðka verandi køk og goymslu, so at krøvini til matgerð v.m. verða uppfylt.
- at skilja vøggustovur og barnagarðsstovur við foldiveggi.
- at flyta goymslur og w.c.
- at økja um starvsfólkarúm, skrivstovu o.a.
- at vaksa um bólkarúm í vøggustovum.
- at bygningurin verður uml. 75 m² (brutto) størri.

Búsetur boða frá, at tá ið meir,- og minniveitingar eru gjørdar fyri omanfyristandandi broytingar verður samlaði kostnaður 896.194,50 uttan mvg. Hettar gevur ein prís á 11.949 kr/m². Hetta svarar til 952.207,00 kr við mvg (6,25%) í samlaðum kostnaði.

Búsetur boðar frá, at hetta uppskotið ikki kemur at ávirka tíðarætlanina, sum fyriliggur, og hesar broytingar hava við sær, at Búsetur í nógv minni mun koma at ávirka dagliga virksemi á stovninum, meðan bygt verður. Búsetur boðar eisini frá, at fyrivarni skal takast við brunatekniskum viðurskiftum og møguligum prísbroytingum hettar kann hava við sær, tá dagstovnurin verður øktur við 75 m².

Einasti tøkur løgukarmur innan grein 3 er konta 3175 LK31014 Frítíðarskúli í Kollafirði, har uml. kr. 1,6 mió eru tøkar.

Sí eisini mál 21/00499 Frítíðarskúlin í Kollafirði.

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 3175 | LK31014 | Frítíðarskúlin í Kollafirði | 3175 | L31011 | Útbygging Dagstovnurin á Hamrinum | | 952.207 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 952.207 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023-2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini, leiðarin á bygningsdeildini og eindarleiðarin mæla til

- at samtykkja uppskotið og í tí sambandi at játta kr. 952.207 íroknað mvg av løgukamri 3175 LK31014 Frítíðarskúlin í Kollafirði til løgukontu 3175 L31011 Útbygging, Dagstovnurin á Hamrinum, og.
  at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 01. november 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. november 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini við teirri broyting, at játtanin áljóðandi kr. 952.207 íroknað mvg. verður tikin av konto 6175, umsiting og røkt av fastari ogn, LK 61027 dagføring av kommunalum bygningum.

Málið beint í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 23. november 2023:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 14. desember 2023:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð. Málið avgreitt.

**Ískoyti:**
Teksur kemur.

**Mentamálanevndin 14. februar 2024:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Neyðugt er at taka støðu til leist at gera økið rundanum Dagstovnin á Argjahamri.

Umsiting hevur verið í samráðingum við verandi arbeiðstakara, P/F Búsetur, at gera eina heildarætlan er fyri alt økið rundanum Dagstovnin á Argjahamri.

Búsetur eru í gongd við at gera hetta arbeiðið saman Sp/f Hjálpirót. Hetta merkir, at alt økið rundanum Dagstovnin á Argjahamri verður lagt soleiðis til rættis, at spæliplóss, uppihaldspláss til Dagstovnin á Argjahamri og onnur viðurskifti skulu prosjekterast og síðani útinnast í samráð við umsiting og brúkarar hjá Tórshavnar kommunu.

663.839,00 kr eru settar av í tilboðnum hjá P/F Búsetur til uttanumøkið, spæliplóss og gróðurseting av trøum og runnum á 1500 m2. Hetta verður mótroknað í tilboðnum.

Búsetur hevur veitt tilboð at gera hetta arbeiðið áljóðandi:

7.233.436,00 u/mvg., sum svarar til 7.685.525,75 v/mvg (6,25%)

Ì hesum kostnaði eru m.a. soljóðandi postar:

Klatriborg til smábørn
Unitruck
Vatntunnil og borð
Fallundirlag á 300m2 - 90 m3 av sandi
Klintribani í náttúrulendinum
Rennistrongur í skráa
3 stk spælihús og viðarbular
Fimkanta reiggja
Reiggja
Rushibani í lendinum
Fjøðurdanda
Danda
Sandkassi
Laga grillstað
Bátur
Net goymslukassar
Uppsetan av verandi sólsikkureiggju
Karrusell
Søgustað
6 stk havaborð
Gróðurseting av trøum og runnum á 1500 m2
Amfiteatur
Lendisgøtur m 400
Jørðarbeiði/ lendisviðgerð, hegn portur oa.

Uppfylling Grót (mett nøgd)
Bøllugrót við veg til verandi barnag.
Prosjektering
Goymslurúm

Arbeiðið við at gera atkomu og byggipláss inn til Dagstovnin á Hamrinum er liðugt.

Verkætlanarleiðarin fyri L64019 hevur sent uppgerð til fíggjardeildina, dagfest 15.02.2024, fyri útlegg millum verkætlaninar L64019 og L31011.

Talan er um hesi arbeiðið:
Ùtgrevstur, spreinging og planering fyri byggipláss til DAH
Prosjektering v.m.
Meirveiting, spreinging og uppfylling
Prísvøkstur/Index
Hegn um arbeiðstøkumark

Kostnaður er 2.173.946,00 u/mvg., sum svarar til 2.309.817,63 v/mvg (6,25%)

Samlaði kostnaður er 9.995.343,38 v/mvg. (6,25%) Sí yvirlit niðanfyri:

| |
|---|
| |
| **Íløgujáttan í FÆ2025** |
| |
| **Samlaður kostnaður Upphædd:** |
| 7.233.436 kr. u/mvg : Tilboð frá Búsetur uttanumøkið, spælipláss |
| 2.173.946 kr. u/mvg : Uppgerð á lendisarbeiðið |
| + 6,25 mvg |
| **9.995.343,38 v/mvg. Meirkostnaður í alt** |
| |
| 58.940.000: Samlað Játtan dd. fyri verkætlan 21/02924 Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum |
| 9.995.343,38 v/mvg. : Biðið verður um afturat |
| 68.935.343,38 Samlaður kostnaður fyri verkætlan 21/02924 Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum |
| |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi) Ár: 2023-2025** |

**Fígging**
Møguleiki er at fíggja samlaðan kostnað áljóðandi í fíggjarætlanini fyri 2025 til L31011 Útbygging Dagstovnurin á Hamrinum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og leiðarin á bygningsdeildini mæla til, at:

- Gera spælipláss og økið rundanum Dagstovnin á Hamrinum eftir omanfyristandandi leisti.
- Játta samlaðan meirkostnað áljóðandi 9.995.343,38 v/mvg.
    - Kr. 9.995.343,38 v/mvg. verða játtaðar L31011 Dagstovnurin á Hamrinum í fíggjarætlanini fyri 2025.
    - Sambært uppgerð dagfest 15.02.24 frá Teknisku deild, verða kr. 2.309.817 v/mvg endurrindaðar verkætlaninini L64019 fyri goldin útlegg. Hendan upphæddin skal flytast av L31011 á L64019 í 2024.

- Beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við mentamálaevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

# 81/24 Nýggjur durur til fimleikahøllina í skúlanum á Argjahamri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 27.06.2023 | 143/23 | 23/03453-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 01.11.2023 | 196/23 | 23/03453-2 |
| 3 Mentamálanevndin | 10.04.2024 | 58/24 | 23/03453-2 |
| 4 Fíggjarnevndin | 17.04.2024 | 84/24 | 23/03453-2 |
| 5 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 81/24 | 23/03453-2 |
| 6 Býráðsfundur | | | 23/03453-2 |

**Upprunin til málið**
Í fleiri á hava avbjóðingar verið við, at íðkarar, sum skulu inn í fimleikahøllina (ítróttahøllina) í skúlanum á Argjahamri, skulu ganga í gjøgnum allan skúlan fyri at koma inn í fimleikahøllina. Borgarstjórin hevur á ástaðisfundi tann 21. mars 2023 ynskt eina loysn.

**Lýsing av málinum**
Í fleiri á hava avbjóðingar verið við, at íðkarar, sum skulu inn í fimleikahøllini í á skúlanum á Argjahamri, skulu ganga í gjøgnum allan skúlan fyri at koma inn í høllina.

Høvuðsinngongdin og høvuðsgongdin gjøgnum allan skúlan má í dag standa opin eftir skúlatíð og í vikuskiftinum. Hetta m.a. givið fylgjandi avbjóðingar:

1) Stórar avbjóðingar eru við reingerð, tí nógv ferðsla er gjøgnum høvuðsgongdina gjøgnum allan skúlan frá morgni til myrkurs.
2) Um kvøldið eru til tíðir nógvar avbjóðingar við at ungdómar gera ónáðir inni í skúlanum. Hetta er møguligt, tí at stórt økið inni í skúlanum stendur víðopið, so leingi sum aktivitetur er í høllini.
3) Stóra hølið uttanfyri fimleikahøllina verður brúkt til upphiting og køkurin, sum skúlin brúkar, verður stundum brúktur av ítróttafeløgunum. Hesi viðurskiftini eru stundum til ampa fyri skúlan.

Fyri at steðga ferðsluni í gjøgnum skúlan um kvøldarnar, er ein møguleiki at gera eina sjálvstøðuga inngongd við duri í norðara enda av høllini. Á hendan hátt skal ongin ferðsla í gjøgnum skúlan, og loysir hetta eina stóra avbjóðing.

Ein the-køkur skal eisini verða í durinum, so at neyðugt er ikki hjá ítróttafeløgunum at brúka umstøðurnar í sjálvum skúlanum.
Skúlastjóri og hondbóltsfelagið meta, at tað er eitt gott hugskot at gera durin.

Umsitingin hevur gjørt eina fyribils tekning og eina varisliga kostnaðarmeting, sum liggur sum skjal 23/03453-1 í hesum málinum.

Kostnaðarmetingin er varislig, m.a. tí at skúlin á Argjahamri er tann fyrsti bygningurin í Føroyum sum hevur eina sokallaða “brand-strategi”. “Brand-strategiin” fer útyvir vanligu bygningskunngerðina, har m.a. útlendskur brunaserfrøðingar skal góðkenna allar broytingar, út frá strategiini.

Í dag hava aðrir stórir bygningar, s.s. Glasir og Landssjúkrahúsið, eisini eina “brand-strategi”.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Tekning og varislig kostnaðarmeting liggur sum skjal 23/03453-1 í hesum málinum.
Tilboð frá ráðgevingarfyritøku liggur sum skjal 23/03453-5 í hesum málinum.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís øki í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| | | |

| **Játtast á:** | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at geva umsitingini heimild til at fyrireika byggiætlanina og at bjóða út arbeiðið at leggja aftur fyri nevnd, og at fígging verður tikin við í fíggjarætlanina 2024.

**Mentamálanevndin 27. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti 26. oktober 2023**
Bygningsdeildin hevur ikki orku í løtuni til at fyrireika byggiætlan, bjóða arbeiðið út og hava fakeftirlit við hesari verkætlanini. Bygningsdeildin hevur sostatt biðið um tilboð frá ráðgevingarfyritøku hesum viðvíkjandi. Ráðgevin er sama fyritøka, sum stóð fyri byggingini av Skúlan á Argjahamri.

Tilboðið um ráðgeving liggur sum skjal 23/03453-5 í hesum málinum.

Ein fyribils kostnaðarmeting at gera durin er umleið kr. 2.000.000.

Eingin játtan er til endamálið.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamáleiðarin mæla til at viðgera tilboðið um ráðgeving samsvarandi omanfyri standandi sum grundarlag fyri víðari støðutakan um fígging til verkætlanina í figgjarætlanini.

**Mentamálanevndin 01. november 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Bygningsdeildin hevur broytt skitsurnar, so dururin er minkaður. Í mun til fyrra uppskotið er talan um uml. 12 fermetur í mun til 27 fermetur.

Sí fylgiskjal «SkúlinArgjahamarDururFimleikahøllBroyttUppskot» Byggimálsdeildin hevur játta byggiloyvi til hesa ætlan.

Bygningsdeildin hevur verði í sambandi við heildararbeiðstakaran ÁTS, sum arbeiða í bygninginum í.s.v. serøki. ÁTS kunnu gera neyðugar arbeiðstekningar út frá skitsuuppskotinum, og byggja durin í ár. Sí viðfesta fylgiskjal «Kostnaðarmeting frá heildararbeiðstakara

Viðfest er eisini kostnaðarmeting við tilhoyrandi gjøldum, sosum MVG. Sí viðfesta fylgiskjal «HeildarkostnaðurDurur»

Mett verður at fígging kann fáast til vega av tí sum er játta til Dagstovnin á Argjahamri, men ikki verður brúkt í ár.

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 3175 | L31011 | Dagstovnurin á Argjahamri | 5775 | Nýggj verkætlan | Durur til høllina á Argjahamri | | 1.018.000 |

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin,mentamálaleiðarin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at geva umsitingini heimild at gera sáttmála við ÁTS sambært omanfyristandandi.

At játta verður 1.018 mió av L 31011 til nýggja løgukonto á 5775.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið at viðgera tvær reisir sum eykajáttanarmál.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

## 82/24 Svimjihøllin 2024 – Prísskipan og upplatingartíðir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 14.02.2024 | 42/24 | 23/06296-4 |
| 2 Mentamálanevndin | 06.03.2024 | 52/24 | 23/06296-4 |
| 3 Fíggjarnevndin | 13.03.2024 | 58/24 | 23/06296-4 |
| 4 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 55/24 | 23/06296-4 |
| 5 Mentamálanevndin | 10.04.2024 | 92/24 | 23/06296-4 |
| 6 Fíggjarnevndin | 17.04.2024 | 82/24 | 23/06296-4 |
| 7 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 82/24 | 23/06296-4 |

**Upprunin til málið**
Uppskot frá leiðaranum í Svimjihøllini til prísir og upplatingartíðir.

**Hvussu nógv vitjandi kunnu vit vænta í framtíðini**
Tá kannast skal um hvussu nógv vitjandi væntandi koma tá nýggja svimjihøllin v/vælveruøki opnar, kann tað vera ein avbjóðing.
Vit hava tøl frá verandi høll at halda okkum til, og í fyrstu atløgu mugu vit vænta, at við nýggju fasilitetunum koma fleira vitjandi. Í løtuni er einans svimjihøllin í Klaksvík sum minnir um svimjihøllina í Gundadali, og um áleið 2 ár kemur nýggjur svimjihylur í Runavík, men hesin hevur onki vælveruøki.

Í 2017 var Herning Svømmehal í líknandi støðu sum svimjihøllin í Gundadali er í dag. Tá bygdu tey ein uppíbygning við einum 50 metra hyli. Áðrenn høvdu tey eins sum í Gundadali, ein 25m hyl. Støðan innan hesa útbyggingina var, at talið á vitjandi var minkandi, og høvuðsorsøkin var, at gamli hylurin var ov lítil. Eftir útbyggingina fór árliga vitjanartalið frá 110.000 til 170.000 – t.e. er ein hækking á 55%.

Taastrup svømmehal var eisini í somu líknandi støðu 2016, men hava ikki so greið tøl sum Herning. Hetta kemst av at tey byrjaðu at renovera gomlu høllina, so skjótt sum nýggi 50m hylurin bleiv opnaður. Tó siga tey, at vøksturin á vitjandi í 2023 var 22% í mun til 2022.

Umsitingin metir, saman við við leiðaranum í svimjihøllini, at ein konservativ meting er ein vøkstur á 20% vitjandi, tá nýggi svimjihylurin við vælveruøki verður tikin í brúk.
Hendan metingin er gjørd út frá tølunum í Herning og Taastrup, sum tó hava eitt heilt annað "uppland" end Tórshavn, Tó so, so eru 91% av Føroyum bundnar saman nú, og merkir hetta hetta, at stórur partur av Føroyum liggur ½ til 1 tíma frá svimjihøllini í Gundadali.
Harumframt metir leiðarin í Svimjihølini, at borgarar ikki brúka svimjihøllina so ofta teir vildu í dag, tí høllin so ofta er full. Hesin parturin verður munandi betri við 50m hylinum.

**Kostnaðurin fyri svimjing**
Leiðarin í svimjihøllini hevur sent inn uppskot um príshækkan á svimjing (Sí skjal 23/06296-1). Í tilmælinum er ein príshækking á 5 kr. á vanliga kostnaðinum fyri svimjing.
Umsitingin hevur kannað aftur í tíð hvat hetta hevði gjørt við inntøkurnar, og hvussu endaliga rakstrarúrslitið hevði sæð út.
Um prísurin var 5 kr. hægri á vanligari svimjing fyri børn og vaksin (tvs. ikki avsláttarkort), so hevði inntøkan verið millum 6,8% og 7,4% hægri í árunum 2019-2022. Endaliga rakstrarúrslitið fyri svimjihøllina hevði batna millum 1,4% og 2,0% í árunum 2019-2022.

Prísurin á svimjing liggur millum 5 og 10 kr. hægri í Klaksvíkar svimjihøll, og gav hetta áleið 1 mió í inntøku um árið, áðrenn vælveruøkið kom. Í Klaksvík kostar tað eyka at sleppa inn í vælveruøkið, og hetta hevur gjørt, at eftir vælveruøkið kom í Klaksvík, eru inntøkurnar farnar uppum 3 mió kr. T.v.s., at vælveruøkið gevur svimjihøllini 2/3 meir í inntøku.

Sbrt. Hagstovuni, so eru prísirnir í samfelagnum hækkaðir 2,8 prosent frá november í 2022 til november í 2023. Prísvøksturin heldur sostatt fram, men prísirnir hækka ikki við somu ferð, sum teir hava gjørt. Havandi í huga nógvu príshækkanirnar í samfelagnum seinast góðu 2 árini, er umsitingin sostatt í iva um, um tað gevur meining at seta prísin upp fyri vanlig atgongumerki á svimjing, um tann stóra inntøkan heldur verður frá vælveruøkinum.
Men til hetta krevst støðutakan um vælveruøkið skal kosta eyka at koma inn í, ella um tú fær atgongd til allar fasilitetir fyri sama prís, eins og tú sær í svimjihylinum í Laugardali, Reykjavík.

Við í metingini skal eisini kunnast um, at í Gallup kanning frá 2019, vóru 71% nøgd við verandi prísstøðið í Svimjihøllini í Gundadali, og í 2017 vóru 84% nøgd við prísstøðið.

Og er tað so, at avgerð verður tikin um at vælveruøkið skal kosta eyka, so má fyrilit takast fyri, at nýggja vælveruøkið ikki fer í kapping við privatar aktørar, s.s. nýggjar spa-fasilitetir hjá hotellum. Umsitingin metir tó í fyrstu atløgu, at hetta ikki verður ein avbjóðing.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>24. april 2024 | Blað nr.: 355<br><br>Formansins merki: |

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til at Mentamálanevndin tekur støðu til, um atgongdin inn í nýggja vælveruøkið skal kosta eyka, eins og í Klaksvíkar svimjihøll, ella um prísurin skal verða tann sami fyri allar fasilitetir, eins og í Svimjihøllini í Laugardali.

Síðani verður støða tikin til endaligar prísir og upplatingartíðir á næsta fundi í Mentamálanevndini.

**Mentamálanevndin 14. februar 2024:** Samtykt at atgongdin inn í nýggja vælveruøkið skal kosta eyka.

**Ískoyti:**
**1) Aldursmark til vælveruøkið?**
Tað er ymiskt hvussu danskar svimjihallir við vælveruøki skipa seg. Í Værløse Svømmehal hava tey t.d. sett aldursmarkið til 16 ár, í Frederikssund svømmhal er aldurmark á 16 ár bert ávísar dagar, og í Frederikshavn hava tey sett 16 ára aldurmark á ávísar partar av vælveruøkinum (dampbad og sauna).

Tað er ilt at meta um hvat er besta loysnin, og tað kemur eisini ann upp á hvat tað er vit vilja. Skal vælveruøkið verða eitt stað uttan larm og spæl er nemmasta loysnin at seta aldursmark á.

Í Klaksvík eru royndir á gjørdar hesum økinum. Í desember 2018 kom nýggja vælveruøkið í Klaksvíkar Svimjihøll. Her hava tey sett aldurmarkið til 16 ár og hava tey góðar royndir við tí skipanini.

Umsitingin mælir til at byrja við góðu royndunum úr Klaksvík og seta aldurmarkið til vælveruøkið til 16 ár.

**2) Møguligur prísur á vælveruøkinum**
Hyggja vit eftir føroyskum viðurskiftum á prísum fyri at sleppa inn í vælveruøkið í svimjihøllum, so er tað bert Klaksvíkar Svimjihøll vit kunnu samanbera við. Her er tó ymiskt hvat nýggja vælveruøkið í Gundadali fer at bjóðar fram, í mun til tað sum er í Klaksvík.

Hyggja vit víðari eftir vælveruøkjum í svimjihøllum í Danmark, so er ógvuliga ymiskt hvussu tey skipa seg og hvat tey bjóða fram.

Vælvitandi um at vælveruøkir í svimjihøllum í Danmark og Klaksvík eru ymiskt skipaði, so metir umsitingin, at príssamansetingin í Klaksvíkar svimjihøll ikki er langt av leið tí prísstøðinum sum er lagt í Danmark. Sostatt metir umsitingin at tað er hóskiligt, at brúka somu prísir sum í vælveruøkinum í Klaksvík, og eru teir fylgjandi (við svimjing):

- Morgun 70 kr.

- Seinnapart 100 kr.
- Vikuskifti 110 kr.
- Pensionistar 50 kr.

Havast skal í huga, at í mun til vælveruøkið í Klaksvík, so verður vælveruøkið í Gundadali i tveimum seperatum rúmum. Hetta gevur okkum møguleikar, at differentiera prísirnar seinni, tá vit hava fingið meiri føling við, hvat tey vitjandi eftirspyrja.

**3) Prístals javnan – hvør háttur kann brúkast?**
Tá talan er um prístalið, so er ymiskir hættir, ið kunnu nýtast. Eitt er at brúka tað generella prístalið, og eitt annað er at brúka prístalið í ymisku "vørubólkunum", ið ávirka raksturin hjá Svimjihøllini. Hetta kundi t.d. verið orka og lønir.

Men fyri ikki at enda á onkrum undarligum krónutali fyri eitt atgongumerki, s.s. 47,50 kr., so skal í fyrsta lagi avgerð takast um hvussu vit runda upp/niður. Í øðrum lagi kundi t.d. umsitingin fylgt við gongdini prístalinum, og tá tað t.d. nærkast einari 5 krónu í generellum vøkstri, so verður prísurin settur upp.

**4) Verandi prísur**
Leiðarin í Svimjihøllini mælir til, at verandi prísur vanligum atgongumerkjum til svimjihøllina hækkar 5 kr. fyri bæði børn og vaksin. Sjálvt um hetta ikki gevur tað heilt stóra útslagið á inntøkusíðuni, so skapar tað eitt insitament hjá borgarum, at keypa sær avsláttarkort. Flestu borgarar í dag brúka avsláttarkort, og skapar tað minni umsiting.

Ein leivd frá gamla svimjihylinum í Gundadali (við badmintonhøllina), er at børn skulu gjalda sum vaksin eftir kl. 18.00. Orsøkin til hetta var, at so kundi vaksin svimja meira fyri seg um kvøldið. Nógv er broytt síðani, og vit hava fingið fleiri hyljar, og nú fáa vit skjótt langhylin. Nú verður somikið nógv vatn í høllini, at leiðarin í svimjihøllini mælir til at børn gjalda barnaprísin eisini eftir kl. 18.

Vísandi til at fíggjarligu umstøðurnar hjá lesandi væl kunnu sammetast við tær hjá pensionistum, so mælir leiðarin í svimjihøllini eisini til, at lesandi gjalda sama prís sum pensionistar..

**5) Upplatingartíðir**
Her verður víst til skjal 23/06296-1 í hesum málinum, viðv. upplatingartíðum. Leiðarin í svimjihøllini mælir til at upplatingartíðirnar vera hesar:

| | |
|---|---|
| Mánadag: | 06.15 til 09.00 og 14.00 til 20.00 |
| Týsdag til fríggjadag: | 06.15 til 20.00 |
| Leygardag og sunnudag: | 08.00 til 16.00 |

Orsøkin til at tað verður mælt til at verða opið til kl. 20.00 dagligdagar er tí, at tað merkir at borgarin sleppur inn til klokkan 20, men skal vera úti klokkan 21. Fólk verða sostatt rópt upp úr hylinum klokkan 20.30.

Sum er ber illa til at hava longri opið út á kvøldið, uttan at tað gongur út yvir virksemi hjá feløgunum, men við nýggja langhylinum verður tó betri pláss.

Viðmerkjast skal, at longda upplatingartíðin hevur øktar rakstrarútreiðslur við sær, og samstundis skulu fleiri lívbjargarar o.l. setast í starv, tá langhylurin opnar.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og leiðarin í Svimjihøllini mæla mentamálanevndini til fylgjandi:

a) At sett verður eitt aldursmark á 16 ár til vælveruøkið, og endurmeta skipanina á summri 2025.

b) At TK leggur prísin fyri vælveruøkið á sama støðið sum í Klaksvík, og endurmeta prísin á summri 2025.

c) At umsitingin javnan kannar generella brúkaraprístali í samfelagnum, sbrt. Hagstovuni, og tillagar prísin á teimum veitingunum sum eru í Svimjihøllini.

d) At prísurin á vanligum atgongmerkjum hækkar við 5 kr. fyri bæði børn og vaksin,
At prísurin hjá børnum eftir kl. 18. verður broyttur til vanliga barnaprísin.
At prísurin hjá teimum lesandi yvir 16 ár fylgir prísinum hjá pensionistunum

e) At mentamálanevndin umrøður upplatingartíðrnar fyrst og tekur støðu á næsta fundi, tá konkret upplegg til talið á starvsfólki er komið upp á pláss.

**Mentamálanevndin 06. mars 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við teirri broyting, at upplatingartíðin leygardagar og sunnudagar verður kl. 08.00 – 17.00.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Atkvøtt varð um uppskot frá Súnu Mørk um at beina málið aftur í nevnd við atliti til at viðgera spurningin um, hvussu aldursmarkið skal setast, nærri og í samráð við starvsfólk í svimjihøllini.

Uppskotið varð einmælt samtykt,og málið beint aftur í mentamálanevndina.

**Ískoyti:**
Á býráðsfundi tann 21. mars bleiv samtykt at beina málið aftur í nevnd, við atliti til at viðgera spurningin um hvussu aldurmarkið til vælveruøkið skal verða – tvs. pkt. a)

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við mentamálanevndini og fíggjarnevndini við tí broyting, at pkt. a) verður orðað soleiðis:

At sett verður eitt aldursmark á 16 ár til vælveruøkið, tó so, at børn undir 16 ár kunnu vera saman við vaksnum, og endurmeta skipanina á sumri 2025.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2024:** Samtykt at yngri enn 16 ár kunnu fáa atgongd til vælveruøkið saman við vaksnum ávíst tíðarskeið á degnum. Hetta verður skipað av leiðsluni í svimjihylinum og at endurmeta skipanina á sumri 2025

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

# 83/24 Bráðfeingis skiftirhølir til Hoyvíksvøllin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 10.04.2024 | 78/24 | 24/01809-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.04.2024 | 83/24 | 24/01809-2 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 83/24 | 24/01809-2 |

**Upprunin til málið**
FC Hoyvík ger vart, við at tey hava bráðfeingis tørv á at fáa fleiri skiftishøli við fótbóltsvøllin í Hoyvík. Harumframt er hevur takið á verandi lonum fingið vindskaða í vetur.

**Lýsing av málinum**
FC Hoyvík ger vart við, at vegna stóra øking í talinum av fótbóltsleikarum, av báðum kynum, nøkta núverandi umklæðingarrúm ikki dagliga tørvin, tá venjing ella dystir eru.

Tað eru ofta umleið 40 leikarar í hvørjum skiftirúmi (sum eru 2 í tali), og tað eru skiftingarrúmini alt ov lítil til.
Tá dystur og kappingar eru í vikuskiftinum vísir trupulleikin seg ofta við ov lítlum og ov fáum skiftingarrúmum. Hetta ger tað avbjóðandi fyri FC Hoyvík at fáa kabaluna at ganga upp. Eitt dømi er, tá í t.d. mannfólk spæla ein dyst fyrst, og kvinnulið skal spæla aftaná, so sleppa tær ikki inn fyrrenn mannfólkini eru liðug at skifta, tvs. at dysturin hjá kvinnunum kann blíva forskotin við tveimum tímum.

FC Hoyvík sendi borgarstjóranum skriv um hesi viðurskifti fyri jól 2023, og hevur FC Hoyvík verið á fundi við borgarstjóran, kommunustjóran og trivnaðarstjóran tann 6. februar 2024.

Á fundinum var umrøtt, at ein bingjuloysn skuldi útvegast beinanvegin. Umboð fyri FC Hoyvík hevur samskift við NCC. Upprunaliga var talan um 4 bingjur, men nú er talan um 2 bingjur.
FC Hoyvík boðar sjálvt frá, at prísurin fyri hvørja bingju er 20.000 kr. Hartil kemur kostnaðurin av flutningi til Hoyvíksvøllin og at gera bingjurnar fastar, so tær ikki fara í ódnarveðri.
Afturat sjálvum keyps- og flutningskostnaðinum koma eisini útreiðslur til endaliga innrætting so sum brúsurúm umframt el- og vatninnleggjan.

Vísandi til eitt nú mál 23/00994 (Umsókn um byggiloyvi til bingju 1 - matr. nr. 135er, Karlamagnusarbreyt 41A, Hoyvík), sum er um dómarabingjuna á Hoyvíksvølli, so skulu hesar bingjurnar eisini hava byggiloyvi.
Trivnaðarstjórin hevur avtalað við FC Hoyvík, at felagið tekur sær av samskiftinum við byggimálsdeildina um loyvir at seta bingjurnar við Hoyvíksvøllin. FC Hoyvík hevur ynski um at bingjurnar verða settar á Karlamagnussarbreyt 43, sum kommunan eigur (matr 138dy, matr.138dq og 138do).

Verandi skiftingarrúm hjá FC Hoyvík hava fingið ein vindskaða á takinum í vetur. Inn er komið tilboð at gera takið í stand aftur. Tilboðið liggur hjálagt í hesum málinum sum skjal 24/01809-3.

Kostnaðarmetingin fyri at at gera takið aftur, keypa tvær bingjur og fáa tær upp á pláss er 500.000 kr.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

| Býráðsfundur<br>24. april 2024 | Blað nr.: 359<br>Formansins merki: |
|---|---|

23/00994 Umsókn um byggiloyvi til bingju 1 - matr. nr. 135er, Karlamagnusarbreyt 41A, Hoyvík

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
24/01809-3 Innkomið tilboð.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| | | | | | | | |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta 500.000 tkr. av LK57039 (Fótbóltsvøllir Argir/Hoyvík) til konto 5717 Ítróttaanlegg.

Verkætlanin við báðum bingjunum er treytað av, at byggiloyvi fæst til at seta bingjurnar við Hoyvíksvøll.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2024:** Samtykt at taka undr við mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

# 84/24 Tillagingar av Miðstovninum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 14.02.2024 | 41/24 | 24/00702-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.04.2024 | 109/24 | 24/00702-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 84/24 | 24/00702-1 |

**Upprunin til málið**
Átrokandi tørvur á tillagingum av virkseminum á Miðstovninum

**Lýsing av málinum**
Í longri tíð hava avbjóðingar verið við at fáa virksemið á Miðstovninum at koyra námsfrøðiliga skynsamt. Hetta hevur elvt til stóra frustratión hjá bæði starvsfólkum, foreldrum og børnum.

Síðani Miðstovnurin flutti inn í bygningin í Kongagøtu hava avbjóðingar víst seg við bæði hølisviðurskiftunum og at fáa ynskta námsfrøðiliga virksemið at virka eftir vild. Virksemið á Miðstovninum hevur frá uppruna verið opið og funksjónsdeilt, tvs. við virksemisrúmum, verkstaði, sansastovu v.m., í mun til aðrar stovnar, ið eru stovudeildir.

Í samráð við og eftir ynski hjá starvsfólkum á Miðstovninum, verður tí mælt til at gera hesar tillagingar av virkseminum, ið eisini krevja tillagingar av bygningunum, mest í Kongagøtu.

Uppskotið er at býta virksemið á Miðstovninum sundur í tvey, soleiðis at ein vøggustova og tvær barnagarðsstovur verða í Realskúlanum, sum framvegis verða eftir upprunaliga konseptinum við Miðstovninum, meðan tvær vøggustovur og tvær barnagarðsstovur verða í Kongagøtu, har virksemið verður stovudeilt, eins og á øðrum dagstovnum.
Ætlanin er soleiðis at varðveita opna og funksjónsdeilda virksemið á Miðstovninum í Realskúlabygninginum, meðan virksemið í Kongagøtu verður skipað í stovum.

Uppskotið byggir á hesa sundurbýting:

**<u>Realskúlin</u>**
Vøggustova: 16 børn
Barnagarður: 24 børn
Umframt 3-5 pláss til børn við stuðulstímum
<u>Samanlagt 43-45 børn</u>

**<u>Kongagøta</u>**
Vøggustova: 24 børn (tvær stovur á 12 børn í erva)
Barnagarður: 36 børn (tvær stovur á 18 børn í neðra)
<u>Samanlagt 60 børn</u>

Alt í alt fer Miðstovnurin eftir hesar tillagingar at rúma millum 100-105 børnum. Til samanberingar eru 83 børn í løtuni innskrivaði í Miðstovnin.

**Neyðugar tillagingar av bygningunum:**
Fyri at tillaga virksemið sum lýst, er eisini neyðugt at gera tillagingar av bygningunum.

<u>Realskúlin</u>
Í Realskúlanum er talan um heilt smáar tillagingar, í høvuðsheitum viðvíkjandi vesiviðurskiftum til vøggustovubørnini. Neyðugt er at skifta tvær kummur út við barnakummur, umframt fyri trygd hjá starvsfólkum og børnum at seta ein glugga í veggin inn til eina stovu.

Garderobur og annað innbúgv er á goymslu, og tí er bert neyðugt at flyta hetta og innrætta stovurnar til ætlaða virksemið við vøggustovu- og barnagarðsbørnum.

Kongagøta
Í Kongagøtu er neyðugt við fleiri tillagingum, inni og úti. Fyri at kunna skipa vøggustovuvirksemi í erva, er neyðugt at gera nøktandi karmar til barnavesi og skiftirúm. Eftir uppskoti frá Bygningsdeildini ber til at gera tillagingar av verandi rúmum, soleiðis at eitt vesi kann gerast við tveimum barnavesum og tveimum skiftiborðum í erva.

Neyðugt er eisini at fáa vatn inn á allar stovur. Hetta manglar í dag á tveimum stovum, einari í erva og einari í neðra. Nakað av føstum inventari manglar somuleiðis, til at gera stovurnar funktionellar.

Inngongd til vøggustovurnar verður í erva, eins og starvsfólkarúm og køkur til stovnin verða varðveitt. Rýmingarhurð verður eisini sett í starvsfólkarúmið, sum starvsfólk kunnu nýta til at sleppa út til vognarnar.
Verandi høvuðsinngongd í bygningin verður at nýta sum vognrúm til vøggustovurnar. Samstundis verður trappan byrgd av fyri barnagarðsbørnunum.

Inngongd til barnagarðsstovurnar verður í neðra, har ein stova er í dag. Neyðugt er at seta tveir hálvveggir upp fyri at býta rúmið í tvey, ein part til skógvar, regn- og kavaklæðir, og ein part til garderobur, hitaskáp v.m. Garderoburnar í alrúminum verða fluttar í hetta rúmið.

Millum Kongagøtu og Realskúlan skulu gerast tvey ella trý hálvtøk at seta vognarnar til vøggustovurnar í Kongagøtu, eins og stoyptar rampur verða gjørdar við trappurnar. 24 vognar skulu rúmast undir hálvtøkunum.

Nakrir vognar til vøggustovurnar í Kongagøtu verða í vognrúminum í Realskúlanum. Neyðugt er at útvega nakrar vognar afturat til økta barnatalið í vøggustovuni í Kongagøtu.

**Kostnaðarmeting**
Kostnarmeting er gjørd fyri tillagingarnar, ið verða nevndar omanfyri. Íroknað hetta eru barnavognar til økt barnatal og fast inventar til stovurnar.
Neyðugt verður við 1,0 mió. kr. til at gera allar tær neyðugu tillagingarnar og keyp av føstum inventari og barnavognum.
1,0 mió kr. eru tøkar á LK31015 Tillagingar á dagstovnaøkinum. Mælt verður til at leysgeva hesa fígging til endamálið á løgukontu L31012 Umbygging í Kongagøtu (Miðstovnurin).

**Tíðarætlan**
Arbeiðið kann setast í gongd beinanvegin og tillagingarnar í Kongagøtu kunnu væntandi verða lidnar til 1. apríl. Møguliga verða børnini flutt úr bygninginum meðan arbeitt verður, soleiðis at arbeiðið kann gerast skjótari.

Tillagingarnar í Realskúlanum krevja munandi minni arbeiði og kunnu gerast samstundis sum virksemi er í bygninginum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, deildarleiðarin á Barna- og Ungdómsdeildini og deildarleiðarin á Bygningsdeildini mæla til at samtykkja tillagingarnar, leysgeva fígging á LK31015 til L31012 og at seta arbeiðið í gongd.

**Mentamálanevndin 14. februar 2024**: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

# 85/24 Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.06.2021 | 140/21 | 21/02624-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.06.2021 | 176/21 | 21/02624-2 |
| 3 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 184/21 | 21/02624-2 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.11.2021 | 244/21 | 21/02624-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 08.12.2021 | 330/21 | 21/02624-2 |
| 6 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 320/21 | 21/02624-2 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2022 | 28/22 | 21/02624-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 42/22 | 21/02624-2 |
| 9 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 35/22 | 21/02624-2 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.05.2022 | 106/22 | 21/02624-2 |
| 11 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.08.2022 | 158/22 | 21/02624-2 |
| 12 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2023 | 128/23 | 21/02624-2 |
| 13 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.01.2024 | 17/24 | 21/02624-2 |
| 14 Tekniska nevnd | 22.01.2024 | 4/24 | 21/02624-2 |
| 15 Fíggjarnevndin | 24.01.2024 | 16/24 | 21/02624-2 |
| 16 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 14/24 | 21/02624-2 |
| 17 Kollafjarðarnevndin | 20.03.2024 | 3/24 | 21/02624-2 |
| 18 Fíggjarnevndin | 28.02.2024 | 52/24 | 21/02624-2 |
| 19 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 85/24 | 21/02624-2 |

**Upprunin til málið**
Málið er byrjað sum eitt politiskt mál.

**Lýsing av málinum**
Sambært kommunuætlanini og bústaðarpolitikkinum fyri Tórshavnar kommunu eru visjónirnar fyri kommununa, at fleiri bústaðir skulu gerast í kommununi. Politiskt er ynski at royna aðrar leiðir fyri at nøkta tørvin á bústøðum, og tí verður farið undir at bjóða privatum mennarum at keypa part av matr. nr. 203c í Kollafirði fyri at menna til bústaðir.

Tórshavnar kommuna eigur matr. nr. 203c, og upprunaliga var ætlanin at stykkja lendið út saman við parti av matriklunum niðanfyri út til sethúsagrundir. Hendan ætlanin kom ongantíð á mál, og nú er ynski so at bjóða part av økinum út til aktørar at menna til bústaðir. Ætlanin er at selja uml. 3600 fermetrar í fríari sølu. Sí kortskjal, øki til sølu, journal nr. 21/02624-4.

Í sambandi við útboðið verður krav sett um, at tað skulu byggjast íbúðir ella raðhús. Tað er upp til tey bjóðandi at koma við uppskoti, hvussu byggingin verður skipað og hvat slag av bústøðum verða bygd. Bústaðirnir kunnu verða bygdir sum eigara- ella leigubústaðir.

Tilhoyrandi parkering og nøktandi loysnir fyri uttanumøkið er partur av loysnini.
Kommunan setir sum treyt, at tað er eitt hóskandi tal av bústøðum í verkætlanini. Tað er ein fyrimunur um byggingin er fjølbroytt og at atlit verður tikið til umhvørvið og stórfingna útsýnið. Dentur verður lagdur á, at byggingin tekur seg væl út, er dygdargóð og fellur væl inn í landslagið.

Útbjóðingin og sølan verður løgd soleiðis til rættis, at tað verður komið fram til bestu loysnina, sum tryggjar eina fjølbroytta, snøgga og dygdargóða bústaðarloysn, sum tekur seg væl út í umhvørvinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

Matrikul nr. 203c liggur í umráðispartinum A1 í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og er serstøk byggisamtykt fyri útstykking á Lygnesi í Kollafirði galdandi fyri økið, sí skjal nr. 21/02624-3.

Tá vinanndi verkætlanin verður ment, verður neyðugt at broyta byggisamtyktina samsvarandi ætlanunum fyri økið.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tað er týdningarmikið at tryggja, at innkomnu tilboðini verða gjøgnumgingin við atliti at tryggja, at tað sum ætlanin er at fara undir at byggja hóskar til umhvørvið og fellir væl inn í økið sum heild.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið hevur ikki verið hjá øðrum deildum enn.

**Skjøl**
Øki til sølu, journal nr. 21/02624-4
Serstøk byggisamtykt fyri útstykking á Lygnnesi í Kollafirði, journal nr. 21/02624-3

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á stjórnardeildini og býararkitekturin mæla til, at matr. nr. 203c verður boðin út í fríari sølu við endamálinum at menna bústaðir á ognini eins og omanfyri lýst, og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Tá freistin at lata tilboð inn 15. november 2021, kl. 12 var farin, var eitt tilboð innkomið.

Tilboðið er frá Jóan Petur Vang áljóðandi kr. 1.586.000 við Kontrast, sum ráðgeva.

Hetta tilboðið hevur ein fermetrakostnað áljóðandi kr. 350,00 fyri teir 4.480 fermetrarnar, ið er júst sama upphædd sum kostnaðarmetingin fyri lendið frá útboðstilfarinum. Tilboðið er væl lýst við einum sokallaðum skipanaruppskoti og við eini treyt um at graviloyvið verður givið soleiðis, at grevstur longu kann setast ígongd 1. mars 2022. Um hetta kann lata seg gera, fer byggingin ígongd pr. 1. juni 2022 og varðar uml. í 22 mánaðir, sí fylgiskjal *Upplegg 1.1.pdf.*

Ein nýggj serstøk byggisamtykt fyri økið skal gerast, ið loyvir bygging sambært uppskotinum. Hetta merkir, at áðrenn graviloyvi kann gevast, skal serstaka byggisamtyktin liggja til almenna hoyring í seks vikur, fyri síðan at góðkennast av Umhvørvis- og vinnumálaráðnum. Ein tílík tilgongd plagar at taka millum ein til tríggjar mánaðir. Tí fer tað ikki at bera til at ganga treytini á møti og ein samráðing skal tí takast upp við tilboðsgevaran.

Talan er um níggju raðhús og fýra punkthús við tveimum íbúðum í hvørjum.
Støddirnar á raðhúsunum eru 125 fermetrar deilt yvir tvær fullar hæddir, umframt p-kjallara. Punkthúsini hava tvær íbúðir, ið eru ávikavist 75 og 100 fermetrar.

Búeindirnar hava nøktandi p-pláss. Tó ynskir kommunan eina øðrvísi skipan av teimum, soleiðis at fleiri verða á felagsøki, til tá føðingardagar o.a. er í økinum.

Økið er væl skipað við varðveittum bøgarði. Umsitingin metir tað sum eina styrki fyri dámin í økinum, at punkthúsini standa forskotin. Hetta er ikki ein vanligur háttur at staðseta hús á bygd, men hetta gevur meining í mun til gjøgnumtrek og sólargang.
Prinsippið við at byggja høgt upp móti hamrum er nakað, ið kommunan ynskir at síggja meiri av. Bygningarnir taka ikki útsýni umframt at hamarin skapar lívd.

Sum nevnt skal nýggj serstøk byggisamtykt skal gerast fyri økið og verandi serstaka byggisamtyktin, *SB_Kollafjørður_Lygnnes_2011_2_2011*, skal avtakast. Frávik skal gerast í nýggju serstøku byggisamtyktini, ið loyvir íbúðarbygging. Hæddin er hægri enn tann, ið er loyvd í A1 økjum og tí skal frávik eisini gevast til hetta. Orsøkin til høgu byggingina er, at parkering er undir raðhúsabygningunum. Hetta hevur nakrar fyrimunir við sær, ið kommunan átti at stuðla. Lendisnýtslan verður meiri effektiv og tann parturin, ið annars hevði blivið asfalteraður til p-pláss, kann blíva lagdur sum t.d. grønt øki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at
- Jóan Petur Vang fær í boði at keypa lendið til íbúðir og raðhús fyri tilboðsupphæddina kr. 1.586.000
- farið verður undir at gera eina serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 203c í Kollafirði í samráð við keyparan av lendinum
- og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at byggingin skal fara í gongd innan 2 ár.

**Fíggjarnevndin 08. desember 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið í samband við Jóan Petur Vang um treytirnar, sum hann setir í tilboðnum um at fáa graviloyvi pr. 1. mars 2022 og at keypspeningurin fyri stykkið skal innganga í vegagerð og felagsøki, sum kommunan skal yvirtaka, tá verkætlanin er liðug. Samanumtikið kunnu vit ikki góðkenna treytir, og av tí sama hevur Jóan Petur Vang valt at trekkja tilboðið aftur.

Umsitingin hevur viðgjørt treytirnar og komin fram til hesar grundgevingar:
- Byggi- og graviloyvi kann ikki útvegast, áðrenn ein serstøk byggisamtykt er endaliga góðkend.

- Sambært kommunustýrislógini § 50, stk., ið bannar stuðli til einstaklingar, hevur kommunan ikki heimild til at gera eina avtalu, sum inniber, at keypspeningurin fyri lendið gongur inn aftur í egnu verkætlan í form av gjaldi fyri vegagerð. Hetta vildi verið at meta við at fáa lendið ókeypis. Um vit loyvdu einari slíkari treyt at inngingið í handilin eftirfylgjandi, vildi tað eisini verið í stríð við reglurnar um útboð av kommunalari fastogn tí onnur, sum møguliga høvdu í huga at bjóða upp á lendið, hava ikki fingið hendan møguleikan.

Ynskiligt er tó framvegis at fáa fleiri búeindir í kommununi og ein roynd átti at verið gjørd at bjóða lendið út umaftur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at matr. nr. 203c í Kollafirði verður boðin útaftur av nýggjum í fríari sølu og við somu treytum sum áður, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina..

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og byárskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um, at tá freistin at lata tilboð inn 30. mars 2022, kl. 12, var farin, var einki tilboð innkomið.

Kommunan eigur tí framvegis lendið matr. nr. 203c í Kollafirði.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. mai 2022:** Nevndin ynskir, at verkætlanin verður boðin út enn einaferð.

**Ískoyti**
Kunnað verður um, at tá freistin at lata tilboð inn 1. august 2022, kl. 12, var farin, var einki tilboð innkomið.

Kommunan eigur tí framvegis lendið matr.nr. 203c í Kollafirði. Ynskiligt er framvegis at fáa fleiri fjøllbroyttar búeindir í kommununi, og ein roynd átti at verið gjørd at bjóða lendið út umaftur í heyst.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. august 2022:** Samtykt at bjóða út aftur í heyst 2022.

**Ískoyti:**
Enn ein útbjóðing av matr. nr. 203c hevur verið, men hevur eingin áhugi verið fyri útboðnum, og er tískil heldur einki tilboð innkomið.

Í sambandi við at bústaðareindir mangla í Kollafirði, mælir umsitingin til at skipa økið við 10 sethúsum í staðin, soleiðis at økið í staðin fyri at byggja rað- og íbúðarhús verður til eina vanliga sethúsaútstykking.

Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til, hvussu økið kann skipast, sí skjal nr. 21/02624-22, Sethúsaútstykking á Lygnesi_Uppskot01_24aug2023. Sum sæst á tekningini, er partur av útstykkingini privat jørð. Umsitingin hevur sett seg í samband við eigararnar av matr. nr. 308, 309 og 209a, sum siga seg vera sinnaðar at selja part av sínum lendi til útstykkingina.

Mett verður, at tað er ráðiligt at fara undir hesa útstykkingina á sama hátt, sum fyri útstykkingina á Signabø, mál nr. 23/03516, sum er farið í undirhondsboð til tveir arbeiðstakarar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- At heimila umsitingini at fara undir samráðingar við privatu eigararnar av matr. nr. 308, 309 og 209a um at keypa tann partin av teirra ogn, sum er neyðugur fyri at gera útstykkingina.
- At heimila umsitingini at gera útbjóðingartilfar fyri økið og at bjóða ætlanina at gera útstykkingina út í heildararbeiðstøku sum undirhondsboð.
- At tá ið tilboðini eru komin inn og keypskostnaðurin er kendur, at leggja málið fyri nevndina aftur til endaliga støðutakan.
- At gera uppskot til serstaka byggisamtykt fyri útstykkingina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti 11.01.2024:**

Umsitingin hevur verið í samráðingum við eigararnar av matr.nr. 308, 309 og 209a, sum allir eru sinnaðir at selja lendið fyri uml. 300 kr.$m^2$

Eigarin av matr.nr. 308, hevur ynski um at keypa ein geira millum vegin, á Lygnnesi. Geirin er uml 62 $m^2$.
Endamálið við keypinum er, at hann hevur møguleika til at sundurbýta matrikulin til sethúsagrundstykki við atkomu frá vegnum.
Kommunan skal keypa uml. 172 $m^2$ frá honum, og verður tí talan um at keypa netto uml. 110 $m^2$

Tørvur á lendi.

| Matr.nr. | $m^2$ | | kostnaður. |
|---|---|---|---|
| 309 | 1030 | | 309.000,- |
| 209a | 127 | | 38.100,- |
| 308 | 172 | netto 110 $m^2$ | 33.000,- |
| Tls. | | | 380.000,- |

Kostnaður til tinglýsing og matrikulering er mettur til uml. 26.000,- og verður mettur kostnaður í alt uml. 410.000,- kr.

Inn eru komin tvey tilboð frá arbeiðstakarunum Við Sjógv Spf. og Hallur Hansen, entreprenørur Spf. upp á heildararbeiðstøku at gera upp til 10 grundstykkir byggibúgvin við tilhoyrandi infrakervi og kringumstøðum.

Í útboðnum vóru treytir upplýstar og eftir hvørjum leisti innkomnu uppskotini/tilboðini verða dømd. Her var talan um ein stiga frá 0 - 10 har:
- Prísur, vekting 60%
- Tíðarætlan, vekting 10%
- Økisskipan, vekting 7,5%
- Skipan av fríøki, vekting 7,5%
- Felags parkering, vekting 5%
- Lendistillaging í praksis, vekting 2,5%
- Lendistillaging í útsjónd, vekting 5%
- Avvatning, vekting 2,5%

Dømingin var gjørd soleiðis at:
- 0 varð givið fyri, at parturin ikki var uppfyltur
- 3 fyri at parturin var uppfyltur í avmarkaðan mun
- 5 fyri at parturin var lutvíst uppfyltur

- 8 fyri at parturin var uppfyltur, tó við smærri lýtum
- 10 fyri at parturin var uppfyltur til fulnar

Inn komu tilboð frá Hallur Hansen, Entreprenørur Spf. og Við Sjógv Spf. Kostnaðurin av tilboðunum vóru hesir:

- Hallur Hansen, Entreprenørur Spf.: kr. 5.173.420,-
- Við Sjógv, Spf.: kr. 5.450.871,-

Eftir leistinum, sum innkomnu tilboðini/uppskotini skuldu dømast kundi tilboðið frá Við Sjógv einans dømast út frá tilboð og nøgdarlista, og ikki út frá hinum parametrunum. Tí hevur døming ikki verið framd av tilboðunum báðum, men einans hevur verið eftirkannað um tilboðið frá Hallur Hansen, entreprenøri Spf., heldur tey krøv, sum eru sett fyri tilfarinum. Úrslitið er, at tilboðið heldur hesi krøv. Arbeiðstakarin metir, at arbeiðið tekur 12 mánaðir.

Samlaði kostnaðurin fyri hesa útstykking verður uml. kr. 7.000.000,-. Talan er tá um 9 grundstykki, sum so statt koma at hava ein kostprís á uml. kr. 780.000,-. Á borgarafundum í Kollafirði í 2023 kom fram, at ynski er ikki um at keypa grundstykkir fyri henda kostnað, tá tilsvarandi grundstykkir í grannakommunum kunnu fáast fyri niður í 320 tkr. Eisini vísa royndirnar frá útstykkingini á Hamrabø, at neyðugt var at lækka prísin fyri grundstykkini. Tí verður mett, at rættast er at bjóða hesi grundstykkini út fyri at staðfesta áhugan millum møguligar keyparar, áðrenn farið verður víðari við at keypa lendið og byggibúgva grundstykkini og gera veg og annað tilhoyrandi.

Neyðugt verður at játtað kr. 7,0 mio til verkætlanina sum eykajáttan, treytað av at nóg stórur áhugi er til verkætlanina.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Loka verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | | **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | Eykajáttan | 6475 | | Nýggj útstykking á Lygnnesi | | 7.000.000,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 7.000.000,- |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025/2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 30.000,- |

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at keypa lendið frá privatu eigarunum fyri ein samlaðan kostnað á uml. kr. 410.000, íroknað útreiðslur til matrikulering og tinglýsing, treytað av at nóg stórur áhugi er fyri útstykkingini.

Harumframt mæla tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin til at:

- at umsitingin kannar, um áhugi er millum borgarar at keypa stykkini til omanfyri nevnda kostnað, og at fáa heimild at selja stykkini.
- er nóg stór undirtøka til verkætlanina, verður komið aftur í nevnd at biðja um heimild at fara víðari við samráðingunum og at fyrireika verkætlanina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. januar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 22. januar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 24. januar 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Einmælt samtykt við teirri broyting, at grundstykkjakostnaðurin er kr. 500.000 kr.

Málið beint til aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
Vegna samtyktina á býráðsfundi 24. januar 2024, har samtykt varð, at grundstykkjaprísurin verður kr. 500.000,- fyri hvørt grundstykkið, skulu samanlagt kr. 2.500.000,- av samlaða kostnaðinum at gera útstykkingina fíggjast uttan um inntøkur frá keypskostnaðinum. Kunnað verður um, at hesin peningur ikki er tøkur í fíggjarætlanini fyri 2024.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2024:** Kunnað varð um málið.

**Kollafjarðarnevndin 20. mars 2024:** Kunnað varð um málið. Nevndin viðmerkti, at ynskiligt er at øll grundstykkini í Kollafirði verða útboðin samstundis, og at kunnað verður um heildarætlanina við Botnánna.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Tikið av skrá.

# 86/24 Sethúsaútstykking á Velbastað – partur av matr. nr. 51a

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2022 | 25/22 | 22/00329-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 40/22 | 22/00329-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 19.06.2023 | 112/23 | 22/00329-1 |
| 4 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 159/23 | 22/00329-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2023 | 135/23 | 22/00329-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.10.2023 | 153/23 | 22/00329-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 269/23 | 22/00329-1 |
| 8 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 247/23 | 22/00329-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.01.2024 | 19/24 | 22/00329-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 22.01.2024 | 5/24 | 22/00329-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 24.01.2024 | 20/24 | 22/00329-1 |
| 13 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 17/24 | 22/00329-1 |
| 14 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 19.03.2024 | 2/24 | 22/00329-1 |
| 15 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 86/24 | 22/00329-1 |

**Upprunin til málið**
Tórshavnar kommuna er í troti av bústøðum. Í heyst varð farið undir at broyta byggisamtyktina fyri ein part av matr. nr. 51a á Velbastað, sí viðhefta skjal 22/00329-2, Økið_broytt til bústaðarbygging.

Broytingin er grundað á ynski um at gera eina kommunala sethúsaútstykking í økinum.

**Lýsing av málinum**
Umsitingin fór í heyst undir at broyta ein part av matr. nr. 51a til økisásetingina B – Bústaðarøkið. Broytingin er enn ikki endaliga góðkend í Býarskipanarnevnd Landsins, men verður viðgjørd í nevndini fyrst í februar.

Fyri at fara undir at gera útstykkingina, er neyðugt, at kommunan ognar sær lendið, sum ætlanin er at byggja á. Harumframt skal verkætlanin projekterast og setast í verk.

Umsitingin sær fyri sær, at økið verður boðið út til arbeiðstakara at menna og byggja, og í tí sambandinum er neyðugt at fara undir at gera útbjóðingartilfarið, sum skal liggja til grund fyri verkætlanini. Kommunan ynskir at bjóða lendið út til projektering og bygging av grundstykkjum, sum kommunan síðani lutar út til privat til bygging av sethúsum.

Økið, sum talan er um at keypa, er uml. 8500 m$^2$ til støddar.

**Lógir, ásetingar o.a.**
- Løgtingslóg um landsjørð, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 194 frá 23. desember 2018
- Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn
- Reglugerð fyri útlutan av fastari ogn

**Upplýsingar frá umsitingini**
Sum eisini sæst í málinum um broyting av byggisamtyktini, so ynskir staðbundna nevndin at síggja útstykkingarætlanina, tá hon er liðug. Tískil verður mælt til, at umsitingin setir seg í samband við limir í

nevndini í sambandi við gerð av útbjóðingartilfarinum, og eigur verkætlanin at verða løgd fyri nevndina aftur, tá tilboðini eru innkomin.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
21/01258 Uppskot til broyting av byggisamtyktini fyri Velbastað fyri part av matr.nr. 51a.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
22/00329-2 Økið_broytt til bústaðarbygging

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | x | | |
| **Møgulig frávik/læ ttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at fara undir at gera útbjóðingartilfar fyri verkætlanina og at fara í samráðingar við Búnaðarstovuna um keyp av lendinum, partur av matr. nr. 51a, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og heimila umstingini at fara undir at gera útbjóðingartilfar til verkætlanina og fyrireika útbjóðing og harumframt at fara í samráðingar við Búnaðarstovuna um keyp av lendinum og at beina málið aftur í fíggjarnevndina, tá hesi viðurskifti eru avgreidd.

**Ískoyti**
Tá freistin at lata tilboð inn tann 13. mars kl. 12 var farin, vóru tvey tilboð innkomin.

| | | |
|---|---|---|
| P/F Tórhall Hansen á | kr. 6.037.839 u/mvg fyri | 17 grundstykki |
| Sp/f Plan á | kr. 11.191.071,05 u/mvg fyri | 14 grundstykki |

Útboðið var skipað á tann hátt, at tilboðsgevari gav tilboð upp á:
• Skipanaruppskot fyri økið
• Projektering íroknað myndugleikaviðgerð
• Byggibúning

Síðani er ætlanin, at kommunan lutar stykkini út til privatpersónar at byggja síni sethús á.

Í útbjóðingartilfarinum stóð, at tilboðsgevari vinnur upp á bíligasta kostnað. Sambært hesum hevur P/F Tórhall Hansen vunnið útboðið.
P/F Tórhall hansen hevur havt Sp/f Uni Patursson afturat sær sum ráðgevandi verkfrøðing.

Byggimálsdeildin og býarskipanardeildin fóru saman við vinnandi tilboðsgevaranum, P/F Tórhalli Hansen, í eina samráðingartilgongd at finna fram til mest skynsomu gagnnýtsluna av økinum í mun til kostnaðin.

Í hesi tilgongdini varð m.a. komið fram til, at stykkini í skipanaruppskotinum vóru teknað ov trong og avmarkandi til eina vanliga familju at innrætta seg á.
Eitt nú fór tað at gerast trupult at rúma einum bilhúsi á hvørjum av stykkjunum, ið var mett at hava stóran týdning, og tilboðsgevarin var tískil biðin um at tillaga ætlanina nakað. Úrslitið var, at tey 17, heldur trongligu stykkini, vórðu umskipað til 14 rúmligari grundstykkir.

Tilboðsgevarin lat so statt eitt tillagað uppskot inn 15. mai 2023 við nýggjari kostnaðarmeting fyri projektering og byggibúning av samlaðu útstykkingini av 14 grundstykkjum (á umleið 500m² hvørt), ið var tilsamans áljóðandi: <u>6.995.579 kr u.mvg.</u>

Sí viðhefta skipanaruppskot og arbeiðstøkutilboð: *Útstykking á velbastað – Broyting 15. mai 2023*, j.nr. 22/00329-21

Í sambandi við at fyrireika økið við tilføringurm, reinsiverki, drenskipan o.a. hevur Tekniska deild eisini gjørt eina kostnaðarmeting fyri «avleiddar verkætlanir». Hon er soljóðandi (u.mvg):

| | | |
|---|---|---|
| Dren av yvirflatuvatni omanfyri útstykkingina: | kr | 312.000 |
| Gøtuljós og íbinding: | kr | 250.000 |
| Reinsiverk við neyðugum leiðingum: | kr | 400.000 |
| Kloakkleiðingar: | kr | 250.000 |
| Vatnleiðing: | kr | 50.000 |
| Brandpostar: | kr | 60.000 |
| | | |
| <u>Tilsamans (u.mvg)</u> | <u>kr</u> | <u>1.322.000</u> |

Leggjast skal afturat, at í einum slíkum føri heftir SEV fyri kostnaðin, sum stendst av at tryggja neyðugu el-leiðingarnar til eina nýggja útstykking sum hesa. Í hesum sambandi nevnir SEV fleiri møguleikar í økinum, har knýtast kann í verandi el-kervið á Velbastað.

Skrivlig tilsøgn er fingin frá Búnaðarstovuni um keypið av lendinum, sum Føroya jarðargrunnur eigur.
Metti kostnaðurin fyri lendið á matr. nr. 51a á Velbastað (uml 8.500m² av dyrkingarbærum lendi í Øki 2 Velbastaður) er: kr. 1.050.000.

Samlaði kostnaðurin fyri verkætlanina er tískil:

| | | |
|---|---|---|
| Projektering og byggibúning: | kr | 6.995.579 |
| Avleiddar tekniskar verkætlanir: | kr | 1.322.000 |
| Keyp av lendi: | kr | 1.050.000 |
| | | |
| Tilsamans: | kr | 9.367.579 |
| | | |
| <u>Íroknað kommunalt mvg á 6,25% er hetta:</u> | <u>kr</u> | <u>9.953.053</u> |

Metti eindarkostnaðurin fyri hvørt grundstykki (á uml. 500m²)

verður tískil: (9.953.053 / 14): kr 710.932

Sí annars viðheftu útgreinaðu kostnaðarmetingina fyri samlaðu verkætlanina:
*Samlað kostnaðarmeting - Útstykking á Velbastað matr 51a - 13juni2023*, j.nr. 22/00329-23. *Afturat kostnaðarmetingini verður mælt til at seta 1 mió. kr av til ókent. Alt eftir hvussu nógv verður brúkt av ókendu puljuni, so kann hetta ávirka endaliga eindarkostnaðin fyri hvørt grundstykki.*

Um umsitingini verður heimilað at halda fram við verkætlanini, og samráðingararbeiðið við tilboðsveitaran kann halda fram, er hugsandi, at smærri tillagingar eiga at verða gjørdar í skipanaruppskotinum, eitt nú í mun til hvussu økið til bilparkering framman fyri útstykkingini eisini tryggjar, at koyribreytin á Ervavegnum (sum er atkomuvegurin niðanfyri útstykkingina) kann breiðkast nakað niðan ímóti grundstykkjunum. Hendan koyribreytin er heldur smøl í dag.

P/F Tórhall Hansen metir, at verkætlanin verður liðugt projekterað í summar. Og um øll neyðug loyvi vera givin í næstum at stykkja út, so kann útstykkingin standa liðug um 1,5 ár eftir, at arbeiðstøkan byrjar.

**Skjøl**
*Útstykking á velbastað – Broyting 15. mai 2023*, j.nr. 22/00329-21
*Samlað kostnaðarmeting - Útstykking á Velbastað matr 51a - 13juni2023*, j. nr. 22/00329-23

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6475 | | Byggibúning bústaðir | 6475 | | | Nýggj útstykking á Velbastað | 11.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 11.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023-24 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til,:
- at umsitingini verður heimilað at halda fram við samskiftinum við Búnaðarstovuna um keyp av lendinum.
- at umsitingini kannar um áhugi er millum borgarar at keypa stykkini til omanfyri nevnda kostnað, og at fáa heimild at selja stykkini.
- um nóg stórur áhugi er fyri útstykkingini millum borgarar, at heimilað umsitingini at halda fram við samráðingunum og gera sáttmála við P/F Tórhall Hansen
- at játtaðar verða 11 mió. kr. til verkætlanina sum eykajáttan, og at nýggj verkætlan verður upprættað til verkætlanina.
- at farast kann undir at leggja eina ítøkiliga ætlan fyri at fyrireika neyðugu teknisku leiðingarnar til ætlaðu útstykkingina, og at kostnaðurin fyri avleiddu verkætlanirnar verður goldin av játtanini.
- at beina málið í Býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. juni 2023:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Sí kunning í ískoytinum omanfyri, har greitt verður frá ætlanini um at gera eina útstykking við 14 byggibúnum grundøkjum (á uml. 500 fermetrar hvørt), til sethús á Velbastað.

Málið varð tikið av skrá, orsakað av at tilsøgnin frá Búnaðarstovuni fyrilá ikki sum endaliga skjalfest í málinum.

Fyribils tilsøgn um keyp av lendi er nú fingin frá Búnaðarstovuni, sí viðheft skjal: *Skrivlig tilsøgn um keyp av lendi frá búnaðarstovuni*, j. nr. 22/00329-27.

Sum nevnt var í ísoytinum omanfyri, er metti eindarkostnaðurin fyri hvørt av teimum grundstykkjunum uml. Kr 710.932.

Gevið gætur, at hetta er ein mettur kostnaður, og at fyrivarni skal takast fyri óvissum ella smærri tillagingum í prosjekteringini, sum skal gerast av arbeiðstakaranum í næstum. Hetta hevur væntandi við sær, at endaligi eindarkostnaðurin verður justeraður nakað.

**Skjøl**
*Útstykking á velbastað – Broyting 15. mai 2023*, j.nr. 22/00329-21
*Samlað kostnaðarmeting - Útstykking á Velbastað matr 51a - 13juni2023*, j. nr. 22/00329-23
*Skrivlig tilsøgn um keyp av lendi frá búnaðarstovuni*, j. nr. 22/00329-27.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til,:
- at umsitingini verður heimilað at halda fram við samskiftinum við Búnaðarstovuna um keyp av lendinum.
- at umsitingini verður heimilað at halda fram við samráðingunum og gera sáttmála við P/F Tórhall Hansen.
- at játtaðar verða 11 mió. kr. til verkætlanina sum eykajáttan, og at nýggj verkætlan verður upprættað til verkætlanina.
- at fáa heimild at selja stykkini.
- at farast kann undir at leggja eina ítøkiliga ætlan fyri at fyrireika neyðugu teknisku leiðingarnar til ætlaðu útstykkingina, og at kostnaðurin fyri avleiddu verkætlanirnar verður goldin av játtanini.

at beina málið í Býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2023:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Sí ískoyti til byggi- og býarskipanarnevndina 19. juni 2023 og 11. september 2023

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til:
- at umsitingini verður heimilað at halda fram við samskiftinum við Búnaðarstovuna um keyp av lendinum.
- at umsitingin kannar, um áhugi er millum borgarar at keypa stykkini til omanfyri nevnda kostnað, og at fáa heimild at selja stykkini.
- um nóg stórur áhugi er fyri útstykkingini millum borgarar, at heimila umsitingini at halda fram við samráðingunum og gera sáttmála við P/F Tórhall Hansen

- at játtaðar verða kr. 11 mió. til verkætlanina sum eykajáttan av konto 6475, Byggibúning bústaðir, og at nýggj verkætlan við heitinum Nýggj útstykking á Velbastað verður upprættað á konto 6475 til verkætlanina.
- at farast kann undir at leggja eina ítøkiliga ætlan fyri at fyrireika neyðugu teknisku leiðingarnar til ætlaðu útstykkingina, og at kostnaðurin fyri avleiddu verkætlanirnar verður goldin av játtanini.
- at beina málið í Býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
18. oktober 2023 samtykti býráðið at umsitingin skuldi kanna, um áhugi er millum borgarar at keypa ætlaðu grundstykkini á Velbastað.

22. november var lýst alment, at fólk kunnu melda til lutakast um grundstykkini á Velbastað til 20. december 2023, og sagt varð frá: *Vísir áhugin seg at vera nóg stórur, verður verkætlanin løgd fyri nevndir og býráð til góðkenningar, og tilmeldingarfreistin verður longd í 4 vikur. Vísir tað seg hinvegin, at áhugin er lítil ella eingin, verður verkætlanin endurmett og møguliga broytt ella slept.*

Tá freistin var farin, vóru tað 8, ið høvdu meldað til lutakast og latið inn váttan um fígging.

Úrslitið skal sjálvandi takast við tí fyrivarni, at royndirnar vísa, at av teimum, sum vanliga melda til lutakast um grundstykki, eru tað altíð ein rímiliga stórur partur, ið fellur frá, og í hesum føri er ongin verkætlan enn, so tað skal nokk ikki leggjast meira í úrslitið enn tað, tað er. Altso meira ein kanning av áhuga enn ein tilmelding.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | Eykajáttan | 6475 | | Nýggj útstykking á Velbastað | Nýggj verkætlan | 11.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 11.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024-25 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | - |

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til, grundað á at áhugin fyri útstykkingini er so stórur sum lýst omanfyri:

- at heimila umsitingini at halda fram við samráðingunum og gera sáttmála við P/F Tórhall Hansen.
- at farast kann undir at leggja eina ítøkiliga ætlan fyri at fyrireika neyðugu teknisku leiðingarnar til ætlaðu útstykkingina, og at kostnaðurin fyri avleiddu verkætlanirnar verður goldin av játtanini.
- at málið viðv. fíggingini sum eykajáttanarmál verður beint í býráðið til aðru viðgerð.
- at beina málið í Býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. januar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Tekniska nevnd 22. januar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 24. januar 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og játta 11 mió. kr. sum eykajáttan á konto 6475, Nýggj útstykking á Velbastað.

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Einmælt samtykt.

Annfinn Brekkstein boðaði frá, at hann er ógegingur at luttaka í viðgerðini av málinum. Býráðið tók fráboðanina til eftirtektar, og Annfinn Brekkstein fór av fundi.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 19. mars 2024:** Kunnað varð um málið. Staðbundna nevndin sendir viðmerkingar til verkætlanarleiðaran.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Annfinn Brekksteni boðaði frá, at hann er ógegnigur at luttaka í viðgerðini av málinum. Býráðið tók fráboðanina til eftirtektar, og Annfinn Brekkstein fór av fundi.

Málið einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 87/24 Lendisgøta til Stórutjørn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2024 | 60/24 | 23/03315-20 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 87/24 | 23/03315-20 |

**Upprunin til málið**
Politiskt er ynski um, at lendisgøtan, sum er í gerð og skal leiða vitjandi út í náttúruna og niðan til komandi Stórhøllina, verður navngivin.

**Lýsing av málinum**
Stórhøllin er í gerð og kemur at gagna nógvum virksemi, bæði ítróttarligum virksemi, konsertum, ráðstevnum osfr. Ikki kemst undan, at høllin í stóran mun varð sett á breddan, eftir at ítrótturin í Føroyum veruliga hevur tikið stór stig framá í altjóða høpi. Høllin kemur at vera miðdepil fyri altjóðakappingar innan alskyns ítrótt, og fegnast Tórshavnar kommuna um, at høvuðsstaðurin við høllini fer at kunna savna fólk til hesi tiltøk, umframt til onnur tiltøk og gerandisvirksemi sum heild.

Hondbólturin hevur fylt nógv seinastu tíðina, og serliga hevur Hondbóltsamband Føroya víst á manglandi umstøðurnar fyri at kunna hýsa altjóða kappingum innan teirra virksemi. Stórhøllin er tí eisini eitt beinleiðis úrslit av manglandi hentleikum til eitt nú landsdystir hjá føroyska hondbóltslandsliðnum.

Staðsetingin fyri høllina kennist í dag nakað langt burtur frá bygda umhvørvinum, og hevur kommunan tískil tikið stig til at gera eina gøtu frá Klingruni og niðan gjøgnum vátlendi, framvið Stórutjørn, heilt niðan til Stórhøllina. Eftir hesi gøtu vónar kommunan, at borgarar og vitjandi fara at njóta náttúruna niðan til Stórhøllina at venja og hyggja eftir ítrótti o.ø.

Og tá nú hondbólturin og hondbóltshetjurnar á føroyska manslandsliðnum hava fylt so nógv í hugaheiminum hjá flestu føroyingum eftir flotta úrslitið í Týsklandi í januar 2024, so er politiskt ynski komið fram um at heiðra hondbóltinum og einstaklinginum Elias Ellefsen á Skipagøtu við navngeva lendisgøtuna.

Ásannast má, at jaligi hugburðurin, atburðurin og virðini, sum ítróttarfólk sum fyrimyndir umboða, kann mynda og menna ítróttarfelagsskapin. Men tað er ikki bara innan ítróttarvirksemið tey kunnu vera við til at ávirka. Tey kunnu eisini hava stóra ávirkan á menningina hjá teimum ungu í nærumhvørvinum. Tí er tað týdningarmikið ikki bara at kunna og tosa um hesi ítróttarfólk, men eisini at heiða ítróttarfyrimyndum, soleiðis at teirra gerðir og yrki kann vera við til at læra virðismikla lívslæru. Tey kunnu vera kelda til íblástur og vegleiðing fyri nærumhvørvið og ung, sum ikki eru virkin innan ítróttin, og fáa hesi at fylgja teirra dreymum.

Elias Ellefsen á Skipagøtu og føroyska manslandsliðið í Hondbólti, hava seinastu árini verið stór fyrimynd fyri hondbóltsvirksemið í Hoyvík og í Føroyum sum heild. Elias hevur útmerkað seg innan hondbólt í altjóða høpi, sum fá onnur og hevur IHF (International Handball Federation) júst valt at tilnevna Elias til 2023 IHF Young Male World Player of the Year. Elias er tilnevndur saman við Juri Knorr og Nils Lichtlein úr Týsklandi. Elias spælir í dag fyri hondbóltsfelagið THW Kiel.

Elias Ellefsen á Skipagøtu hevur saman við sínum liðfeløgum, HSF og hondbóltsfamilju sínari veruliga sett hondbóltin í Føroyum á breddan, og ynskir Tórshavnar kommuna at staðfesta og heiðra hansara persónligu góðu og merkisverdu avrik við at navngeva lendisgøtuna millum Klingruna og Stórhøllina við navninum “Skipagøta”.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tað er ikki vanligt, at navngeva lendisgøtur í kommununi, men eru tað fleiri lendisgøtur, sum við árunum hava fingið tillutað eyknevnir út frá staðarnøvnum í nærumhvørvinum ella grundað á eitt nú virksemið, sum ætlanin er at brúka gøtuna til.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Umsitingin hevur umrøtt ætlanina við at navngeva gøtuna við Sprotan, Jonhard Mikkelsen. Serliga var týdningarmikið at tryggja, at navnið "Skipagøta" ikki er vorðið brúkt til annað staðarnavn ella gøtunav. Sprotin upplýsir fyri kommununi, at navnið ikki er vorðið brúkt áður.

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at lendisgøtan verður navngivin Skipagøta, at skeltað verður við navninum, og at málið verður beint í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

# 88/24 Skipan av Dr. Jakobsensgøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2024 | 59/24 | 23/05192-3 |
| 2 Tekniska nevnd | 04.03.2024 | 20/24 | 23/05192-3 |
| 3 Ferðslunevndin | 06.03.2024 | 12/24 | 23/05192-3 |
| 4 Fíggjarnevndin | 13.03.2024 | 68/24 | 23/05192-3 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.04.2024 | 83/24 | 23/05192-3 |
| 6 Tekniska nevnd | 08.04.2024 | 31/24 | 23/05192-3 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.04.2024 | 85/24 | 23/05192-3 |
| 8 Tekniska nevnd | 22.04.2024 | 35/24 | 23/05192-3 |
| 9 Fíggjarnevndin | 23.04.2024 | 112/24 | 23/05192-3 |
| 10 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 88/24 | 23/05192-3 |

**Upprunin til málið**
Umboð fyri handilsvinnuna hava heitt á kommununa um at skipa fyri fundi um viðurskiftini í Doktara Jakobsens gøtu.

**Lýsing av málinum**
Á fundinum varð greitt frá, hvussu handilsgøtan verður upplivað, hvørjar ítøkiligar avbjóðingar eru í økinum og hugleitt varð um, hvørjir møguleikar eru í sambandi við eina dagføring og fríðkan av Doktara Jakobsens gøtu. Eisini varð umrøtt, at umboðini samskipa møgulig ynskir fyri gøtuna við handilsvinnuna/grannar í økinum og Visit Tórshavn, soleiðis at møgulig átøk verða sett í verk í samstarvi við allar partar.

Sum heild verður ynskt, at Doktara Jakobsens gøta gerst sjónligari í býarmyndini, soleiðis at handilsgøtan verður sædd og skipað á einum strekki frá Káta horninum eftir Sverrisgøtu og Doktara Jakobsens gøtu til gamla kirkjugarðin á Svínaryggi. Harumframt verður ynskt at dagføra og fríðka um í økinum fyri at skapa eina meira innbjóðandi og hugnaligari handilsgøtu fyri vitjandi í miðbýnum.

Fleiri avbjóðingar eru í økinum í dag, og serliga eru tað ferðsluviðurskiftini við tvívegis ferðslu, fólki til gongu og parkeringsviðurskiftini, ið bæði órógva trivnaðin og upplivingina hjá teimum vitjandi eins og ferðslutrygdina í økinum. Vantandi ljós, slit, viðtikið býarrúmsinnbúgv og afturlatnar framsíður og uppihaldsøki fáa handilsgøtuna at kennast myrka og óvinaliga allar tíðir á árinum.

Handilsgøtan við torgum hevur tørv á at verða dagførd, eins og miðbýarætlanin frá 2016 leggur upp til. Men fyri at seta sjøtul á arbeiðið at raðfesta handilsgøtuna hevur verið arbeitt við eini tilgongd og menning av handilsgøtuni, sum kann gerast í stigum, har talan er um skjót átøk, sum kunnu setast í verk beinanvegin, og størri inntriv, ið krevja eina framskygda menningarætlan.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Handilsgøtan liggur í 1. Grundumráði í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, ið er lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging. Harafturat er handilsgøtan fevnd av ásetingunum í serstøku byggisamtyktini fyri Dr. Jakobsens gøtu og Sverrigøtu, ið m.a. ásetur, at miðstaðabyggingin einans má vera hús, sum heilt ella lutvíst verða innrættað til handlar, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhølir og tílíkt. Niðasta hædd skal verða til útvenda nýtslu (handil ella matstovur), og gongubreytirnar skulu verða yvirdekkaðar við markisum ella karnappum.

**Upplýsingar frá umsitingini**

Umsitingin hevur hugt eftir viðurskiftunum í handilsgøtuni og hevur í hesum sambandi eisini havt eina framløgu fyri handilsvinnuni, har víst varð á nakrar hugsanir og møguleikar í økinum. Framløgan er ikki at skilja sum ein ítøkilig verkætlan, tí hendan skal endaliga tilevnast og fremjast í samráð við lokalu áhugabólkarnar. Sí framløguna Doktara Jakobsens gøta_Møgulig átøk summarið 2024.

Eftirfylgjandi er uppskot tilevnað til eina møguliga skipan av handilsgøtuni, sum fevnir um nýggja ferðsluloysn og átøk at seta í verk til summarið 2024. Átøkini fevna um dagføringar og fríðkanir av m.a. gongubreytum, gonguteigum, uppihaldsøkjum, ljósseting, býarrúmsinnbúgvi, súkkluparkering, blómubeðum og gróðurseting. Harafturat verður arbeitt við at skapa ein dám og samleika fyri handilsgøtuna við m.a. einum eyðkendum liti, list og prýði, ið skal vera við til at sameina handilsgøtuna frá Káta horninum til gamla kirkjugarðin. Sí skipanina av Doktara Jakobsens gøtu.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Verkætlanin verður tilevnað og framd í samstarvi við teknisku deild.

Áðrenn nøkur átøk verða sett í verk, so skal handilsvinnan skrivliga taka undir við ætlanunum. Nýggjur fundur er ásettur at vera við handilsvinnuna hósdagin 27.02.2024. Kunnað verður um niðurstøðurnar frá fundinum á fundinum í Byggi- og býarskipanarnevndini mánadagin 04.03.2024, og verður fundarnotat í málið til hinar nevndarfundirnar.

**Skjøl**
Doktara Jakobsens gøta_Møgulig átøk summarið 2024 (framløga), journal nr. 23/05192-5.
Skipan av Doktara Jakobsens gøtu (uppskot), journal nr. 23/05192-7.
Skeltisætlan (ferðsluloysn), journal nr. 23/05192-6.
Fundarnotat frá fundi við handilsvinnuna 27.02.2024, journal nr. 23/05192-8

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Loka verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir |
| 6275 | LK62999 | Fríðkan av býnum |

| **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | | | Átøk í handilsgøtuni, Dr. Jakobsensgøtu | 1.000.000 |
| 6275 | | | Átøk í handilsgøtuni, Dr. Jakobsensgøtu | 1.100.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 2.100.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024/2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 200.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- at farið verður undir at fríðka um í handilsgøtuni við at seta átøkini í verk, sum eru lýst í skjalinum "Doktara Jakobsens gøta_Møgulig átøk summarið 2024, treytað av at handilsvinnan tekur undir við ætlanini
- at játtaðar verða kr. 1 mió av konto 8175, LK81999, Vegaverkætlanir og kr. 1.1 mió av konto, LK62999, Fríðkan av býnum á nýggja verkætlan undir konto 6275,
- og at beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd, ferðslunevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2024:** Samtykt at senda málið til hoyringar.

**Tekniska nevnd 04. mars 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

Bjørg Dam var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Orsaka av at uppskoti leggur upp til eina nýggja skipan av Doktara Jakobsens gøtu og Sverrisgøtu, sum fevnir um broytta ferðsluloysn og dagføringar av gongubreytum, parkeringsbásum, blómubeðum og uppihalds økjum, skal málið í Ferðslunevndina

**Tilmæli:**
Ferðslunevndin tekur støðu á fundinum.

**Ferðslunevndin 06. mars 2024:** Tekur undir við tilmælinum. Dagførdur skeltiplanur skal góðkennast av ferðslumynduleikanum.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2024:** Samtykt at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina og teknisku nevnd at endurskoða.

**Ískoyti:**
Skipað varð fyri fundi fyri handilsvinnuni 29. februar 2024, har ætlanirnar fyri Doktara Jakobsens gøtu og møgulig átøk fyri summarið 2024 vórðu løgd fram.

Eftirfylgjandi varð málið sent til hoyringar hjá handilsvinnuni. 11. mars handaði umboð fyri handilsvinnuna kommununi skriv við undirskriftum frá handilsvinnuni í Doktara Jakobsens gøtu, sí j. nr. 23/05192-13, *11.03.2024_Skriv Handilsgøtan_undirskriftir*.

Sum sæst, so tekur handilsvinnan undir við ætlanunum fyri Doktara Jakobsens gøtu og so statt eisini at farið verður undir at seta ymisku átøkini í verk.

Sum sæst í skrivinum, so er tað ein handil, sp/f Kissa, sum ikki hevur skrivað undir skrivið. Grundgevingin hjá Kissa fyri ikki at skriva undir, er at viðkomandi hevur annað stríð við kommununa.

Mett verður ikki, at ætlaðu átøkini koma at ávirka handilsvirksemið hjá Kissa nakað serligt, og av tí at írestandi parturin av handilsvinnuni tekur undir við, at farið verður undir átøkini, verður mælt til, at hildið verður fast í ætlanini fyri økið.

**Skjøl:**

- 11.03.2024_Skriv Handilsgøtan_undirskriftir, journal nr. 23/05192-13,
- Doktara Jakobsens gøta_Møgulig átøk summarið 2024 (framløga), journal nr. 23/05192-5.
- Skipan av Doktara Jakobsens gøtu (uppskot), journal nr. 23/05192-7

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | | **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir | 6275 | | | Átøk í handilsgøtuni, Dr. Jakobsensgøtu | 1.000.000 |
| 6275 | LK62999 | Fríðkan av býnum | 6275 | | | Átøk í handilsgøtuni, Dr. Jakobsensgøtu | 1.100.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 2.100.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024/2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 200.000 |

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at farið verður undir at fríðka um í handilsgøtuni við at seta átøkini í verk, sum eru lýst í skjalinum "Doktara Jakobsens gøta_Møgulig átøk summarið 2024,
- at játtaðar verða kr. 1 mió av konto 8175, LK81999, Vegaverkætlanir og kr. 1,1 mió. av konto, LK62999, Fríðkan av býnum á nýggja verkætlan undir konto 6275,
- og at beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. apríl 2024:** Tikið av skrá.

**Tekniska nevnd 08. apríl 2024:** Tikið av skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 22. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

# 89/24 Umsókn til ummælis um keyp av uppískoytisstykki av matr. nr. 11a og 49a til samanlegging við matr. nr. 72, Kaldbak

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.02.2024 | 44/24 | 23/07213-2 |
| 2 Kaldbaksnevndin | 02.04.2024 | 4/24 | 23/07213-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.04.2024 | 91/24 | 23/07213-2 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 89/24 | 23/07213-2 |

**Upprunin til málið**
Samkoman Nazaret í Kaldbak hevur sent Búnaðarstovuni umsókn um møguligt keyp av lendi til eina samanlegging við matr. nr. 72, sum er ogn hjá samkomuni. Kommunan verður biðin um at ummæla málið og senda úrslitið aftur til Búnaðarstovuna.

**Lýsing av málinum**
Umsøkjari ynskir at keypa tilsamans 578m$^2$ av lendinum uttan um matr. nr. 72, har søkt verður um at keypa ávikavist 332m$^2$ og 246m$^2$ av festunum matr. nr. 11a og 49a, sum eru ognir hjá Føroya Jarðargrunni.

Ætlanir eru um at útvega fleiri parkeringspláss, men ikki er pláss til eina stórvegis øking á verandi matrikli, tí verður søkt um at keypa lendið. Matr. nr. 72 er 863 fermetrar til støddar. Sjálvur bygningurin er góðar 200m$^2$, meðan parkeringsøkið er 360m$^2$.

Stórur tørvur er á parkeringsplássum, í dagtímunum til skúlan og frítíðarskúlan, og um kvøldarnar og í vikuskiftunum til virksemið, sum er í salinum og skúlanum. Tórshavnar kommuna leigar ein part av salinum til at hýsa frítíðarskúlanum, og verður parkeringsøkið í stóran mun nýtt til uttanduravirksemið hjá frítíðarskúlanum. Hetta hevur við sær, at starvsfólk í frítíðarskúlanum og skúlanum verða noydd at parkera aðrastaðni nærindis. Harafturat eru eisini ov fá parkeringspláss, tá størri tiltøk eru, og tarnar hetta ofta ferðsluni, herundir busskoyringini. Eisini skal havast í huga, at um boð skuldu verið eftir neyðsendarakførum, tá tiltøk eru í økinum, so er møguligt at hesi verða tarnað, ella at forðað verður beinleiðis fyri atkomuni til økið eins og ovara og uttara part av bygdini.

Um ein møgulig søla gerst veruleiki, so er ætlanin at binda parkeringsøkini omanfyri salin saman, soleiðis at bert ein atkoma verður til parkeringsøkið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Lendið, ið ynskist til keyps, er fevnt av økisásetingini B í serstøku byggisamtyktini fyri Kaldbak. Umráðisparturin B verður kannaður almennum endamálum, skúla, kirkju, samkomuhúsum v.m. og útiøki, ið hevur samband við tílík endamál.

Ætlaða endamálið rúmast so statt innan fyri galdandi byggisamtykt.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Arbeitt verður í løtuni við eini heildarætlan fyri miðstaðarøkið í Kaldbak, ið eisini fevnir um umrødda lendið og virksemið. Grundað á nógva virksemið í økinum, hevði eitt víðkað parkeringspláss verið til gagns fyri øll virkandi í økinum, og hevði soleiðis eisini bøtt um verandi parkeringsviðurskiftini. Ein møgulig víðkan av parkeringsplássinum hevði eisini samsvarað við heildarætlanina.

Umframt at ein víðkan hevði bøtt um parkeringsviðurskiftini í økinum, so er gott samstarv millum Tórshavnar kommunu og samkomuna í sambandi við virksemið í økinum. Mælt verður tískil til at selja samkomuni lendið sambært kortskjalinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Kaldbak - Heildarætlan fyri miðstaðarøkið, journal nr. 24/00190.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Kortskjal_Víðkan av parkeringsøki í Kaldbak, journal nr. 23/07213-3.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

Málið er sent til kommununa at umrøða, og tekur Búnaðarstovan sær av eini møguligari sølu.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at selja samkomuni lendið sambært kortskjalinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. februar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í staðbundnu nevndina til ummælis.

**Kaldbaksnevndin 02. apríl 2024:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

# 90/24 Fríðkan av býnum, Kongaminni o.a.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.04.2024 | 86/24 | 24/02102-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.04.2024 | 110/24 | 24/02102-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 90/24 | 24/02102-1 |
| 4 Býráðsfundur | | | 24/02102-1 |

**Upprunin til málið**
Politiskt er ynski at uppraðfesta fríðkanina av býnum.

**Lýsing av málinum**
Tað eru fleiri økir í býnum, sum tørva ábøtur og dagføringar.

Sum dømi kann nevnast, at økið kring Kongaminnið er rættiliga illa farið, og treingir tað til dagføringar. Atkomuviðurskiftini eru sera vánalig, umframt at tað hevði gagnað økinum, at tað varð ljóssett, soleiðis at tað gjørdist meiri trygt og hugnaligt at vitja í myrku árstíðini.

Somuleiðis er ynski at planta fleiri trø í býnum, umframt at raðfesta aðra fríðkan av býnum.

Ynskiligt er tískil at seta fígging av til at raðfesta fríðkanina í býnum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
Játtanin til Fríðkan og viðlíkahald, Lendisliðið, kt. 6212, er sera sperd, og tískil røkkur hendan ikki til at dagføra og viðlíkahalda býin, sum við árunum er vaksin heilt nógv.

Játtanin til Fríðkan av býnum, kt. 6210, nýggj átøk, verður í stóran mun játtað út til ymisk átøk kring allan býin, eigarafeløg, bóltvallir osfr.

Skal miðbýurin uppraðfestast, so er neyðugt við eini eykajáttan til hesi átøk.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>24. april 2024 | Blað nr.: 388 |
| | Formansins merki: |

| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☐

Eykajáttan ☒

Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 6175 | LK61027 | Dagføring kommunalir bygningar | 6210 | | Fríðkan og viðlíkahald | | 1.000.000 |
| 6275 | LK62996 | Miðbýarætlan | 6210 | | Fríðkan og viðlíkahald | | 2.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 3.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 200.000 |

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- at seta arbeiðið í verk at uppraðfesta miðbýin við endurbøting, planting og dagføringum av ymiskum økjum í býnum,
- at játtaðar verða kr. 1 mió. av kt. 6175, LK61027, Dagføring kommunalir bygningar á kt. 6210, Fríðkan og viðlíkahald,
- at játtaðar verða kr. 2 mió. av kt. 6275, LK62996, Miðbýarætlan á kt. 6210, Fríðkan og viðlíkahald
- at beina málið umvegis fíggjarnevndina til tvær viðgerðir í býráðnum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>24. april 2024 | Blað nr.: 389 |
| | Formansins merki: |

# 91/24 Byggiverkætlan á matr. nr. 40g, 40h, 40i og 42i, Argir, Heiðagøta

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.02.2024 | 34/24 | 23/03517-6 |
| 2 Tekniska nevnd | 12.02.2024 | 12/24 | 23/03517-6 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.04.2024 | 86/24 | 23/03517-6 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 91/24 | 23/03517-6 |

**Upprunin til málið**
Umsøkjarin, sum arbeiðir við eini verkætlan til dupulthús, ynskir at gera gerðabýti við lendi hjá kommununi, soleiðis at verkætlanin kann fremjast.

**Lýsing av málinum**
Eigarin av matr. nr. 42i á Argjum ynskir í sambandi við eina byggiverkætlan at gera eitt gerðabýti við Tórshavnar kommunu, soleiðis at hann fær lendi burtur av matr. nr. 200a og 200e hjá kommununi, móti at kommunan fær lendi frá honum, burtur av matr. nr. 42i.

Hann hevur latið eina byggiverkætlan inn, sum umfatar matr. nr. 42i, matr. nr. 40i og 40h, sum hann eisini eigur.

Sambært ætlanini fær umsøkjarin 579m² av matr. nr. 200a og 200e frá kommununi, meðan kommunan fær 903m² av matr. nr. 42i frá umsøkjaranum, sí kort 23/03517-5 nevnt gerðabýti.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ognirnar liggja í umráðispartinum A1 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini hjá Tórshavnar kommunu.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Við hesum gerðabýti, kemur kommunan at eiga ánna, og tað verður uml. 5 m frá ánni til matrikkulin hjá umsøkjaranum.

Ovari partur av matr. nr. 42i er brattlendi og er ikki partur av byggiverkætlanini hjá umsøkjaranum. Hetta øki eigur at verða lagt sum fríøki ella lendi, sum ikki seinni kann byggjast á.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
j.nr. 23/03517-7 Tekningar
j.nr. 23/03517-5 Støðumynd - Gerðabýtið

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggimálsdeildini mæla til at ganga umsóknini á móti, treytað av, at ovari partur av matr. nr. 42i verður lagur sum fríøki, sum ikki seinni kann byggjast á og annars við treytum sum umsitingin setir, og at beina málið í teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. februar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 12. februar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

## 92/24 Útstykking á Hamrabø matr. nr. 91a, Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.05.2015 | 133/15 | 15/00969-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.06.2015 | 149/15 | 15/00969-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.06.2015 | 134/15 | 15/00969-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.08.2015 | 153/15 | 15/00969-1 |
| 5 Kollafjarðarnevndin | 19.10.2015 | 9/15 | 15/00969-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.10.2015 | 193/15 | 15/00969-1 |
| 7 Kollafjarðarnevndin | 23.11.2015 | 16/15 | 15/00969-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 248/15 | 15/00969-1 |
| 9 Býráðsfundur | 29.10.2015 | 184/15 | 15/00969-1 |
| 10 Býráðsfundur | 19.11.2015 | 221/15 | 15/00969-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 02.03.2016 | 32/16 | 15/00969-1 |
| 12 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2016 | 67/16 | 15/00969-1 |
| 13 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.04.2016 | 132/16 | 15/00969-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.05.2016 | 134/16 | 15/00969-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 19.05.2016 | 188/16 | 15/00969-1 |
| 16 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 147/16 | 15/00969-1 |
| 17 Kollafjarðarnevndin | 05.09.2016 | 13/16 | 15/00969-1 |
| 18 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.11.2023 | 192/23 | 15/00969-1 |
| 19 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.04.2024 | 70/24 | 15/00969-1 |
| 20 Tekniska nevnd | 08.04.2024 | 33/24 | 15/00969-1 |
| 21 Fíggjarnevndin | 17.04.2024 | 89/24 | 15/00969-1 |
| 22 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 92/24 | 15/00969-1 |

**Málslýsing**:
Býarskipanardeildin hevur gjørt eitt skipanaruppskot fyri ognina matr.nr. 91a, Hamrabøur í Kollafirði. Eftir uppskotinum er pláss til umleið 21 grundstykkir millum 510 og 600 $m^2$ til sethús plus 2 grundstykkir fram við á Homrum. Grundstykkini hava tvørfall uppá millum 6 og 8 metur. Útstykkingin hevur umleið 330 m av vegi, 16 eyka p-pláss og gøtusamband til á Homrum. Vegurin er 8 m breiður, harav 1 m gongubreyt á hvørjari síða.

Umsitingin hevur gjørt kostnaðarmeting (sí skjal 1).

Skjal nr. 1. Kostnaðarmeting.
Skjal nr. 2. Støðumynd.
Skjal nr. 3. Skurðir
Skjal nr. 4 Longdarskurður

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við uppskotinum, at kunna teknisku nevnd um ætlanina og at útvega fígging til gerð av projektuppskoti.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina at útvega fígging til projektuppskot.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at játta kr. 100.000 av konto 6175, keyp og søla, til projekstuppskot.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur bjóðað gerð av dispositionsuppskoti út millum 5 ráðgevarafyritøkur. Lisitation varð hildin 15. juli 2015. 2 boð komu inn.

| | |
|---|---|
| HMP | 69.000 kr. u.MVG |
| RAM consult | 88.700 kr. u.MVG |

HMP hevði soleiðis lægsta boð og hevur 13.08.2015 latið inn dispisitionuppskot. Uppskotið hevur verið til ummælis í umsitingini og smávegis rættingar eru gjørdar.

HMP hevur latið inn kostnaðarmeting. Sambært kostnaðarmetingini verður kostnaðurin, av byggibúningar arbeiðinum fyri 23 grundstykkir á miðalvídd uppá 550 $m^2$, mettur at verða 4.561 mió.u.MVG. Roknað er við eini byggitíð uppá 8 mánaðar.

Samlaði fíggjartørvurin íroknað prosjektering, eftirlit, ókent og MVG,verður sostatt kr. 6,89 mio. v.MVG, svarandi til ein $m^2$ prís uppá 542 kr/$m^2$ v.MVG og ein prís fyri eitt 500 $m^2$ grundstykki uppá 270.788 kr. v.MVG. Hesin kostnaðurin er tó treytað av at:

1. TK eigir fríøkini.
2. Útreiðslur til ráðgevara verður minkað niður í 7% av anlegsútreiðslunum.
3. Avgrevstur verður lagdur í Kollafirði í staðin fyri í Villingadali.
4. Burturbeining av fjósi verður tikið úr prosjektinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna omanfyri nevndu treytir fyri at minka um kostnaðin av grundstykkjunum og at umsitingin arbeiðir víðari við gerð av høvudsprojekti.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. august 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin metir, at kostnaðurin í sambandi við projektering og útbjóðing verður 190.000 kr. v.MVG.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta 190.000 kr. til projektering og útbjóðing.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Kollafjarðarnevndin 19. oktober 2015:** Borgarstjórin greiddi frá málinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at játta kr. 190.000 til projektering og útbjóðing av konto 6475 og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Einmælt samtykt.
**Ískoyti**:
Víst verður til samtyktirnar í býráðnum 22. juni 2015 og 29. oktober 2015,
sum skulu staðfestast við aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 19. november 2015:** Einmælt samtykt.

**Kollafjarðarnevndin 23. november 2015:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur latið ráðgevan HMP-Consult gjørt høvuðsprosjekt og útbjóðingartilfar av verkætlanini. Fyri at fáa eitt so álítandi útbjóðingartilfar sum møguligt, hevur byggiharrin latið gjørt jørðbotnskanningar av lendinum. Tað er ráðgevin Munin, sum hevur gjørt sokallaðar Georadarakanningar av grevstrarøkinum. Eisini eru gjørdar grevstrarroyndir fyri at staðfesta, um hesar kanningar svara til hvørja aðra.

**Umhvørvisárin**
Umsitingin er í gongd við at senda eina umsókn til Yvirfriðingarnevndina fyri Streymoyar Sýtslu um loyvi til at fara í gongd við verkætlanina.

**Tekningar**
TK j. nr. 15/04774-1

**Gransking**
Umsitingin hevur granskað heildarverkætlanina.

Tekniska nevnd tekur støðu til tekniska prosjektið so sum vegaprofil, skráningar, parkeringsøkir og tekniskar leiðingar.

Byggi- og býarskipanarnevndin tekur støðu til, um øll verkætlanin skal bjóðast út, ella bert ein partur av henni, har atlit verða tikin til eftirspurningin eftir grundøkjum í Kollafirði. Eisini skal nevndin taka støðu til, hvør útbjóðingarhátturin skal verða.

**Tilmæli til teknisku nevnd:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at góðtaka tekniska prosjektið.

**Tilmæli til byggi- og býarskipanarnevndina:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at bjóða alt arbeiðið út í innbodnari lisitatión til fimm arbeiðstakarar og at leggja málið aftur fyri byggi- og býarskipanarnevndina fyri at taka støðu til innkomnu tilboðini.

**Tekniska nevnd 02. mars 2016:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og vísir á, at treytir skulu setast grundstykkjaeigarunum um grevstur uppat kommunalum vegi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur heitt á HMP-Consult um at bjóða arbeiðið út til fimm arbeiðstakarar sum innbodna lisitatión.
Lisitatiónin verður hildin 26. apríl, kl. 15.00 á teknisku deild hjá Tórshavnar kommunu.

**Viðkomandi skjøl**

| | |
|---|---|
| TK j. nr. 15/04774-3 | Tekningar stemplaðar góðkendar av býarverkfrøðinginum |
| TK j. nr. 15/04689-1-5 | Innkomin tilboð |
| TK j. rn. 15/04689-6 | Lisitatiónsprotokoll |
| TK j. nr. 15/04713-3 | Samlað kostnaðarmeting |

**Tilmæli kemur til fundin.**

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. apríl 2016:** Útsett.

**Ískoyti:**
Lisitatión hevur verið, og innkomnu tilboðini vóru hesi.

1. Tórhallur Hansen Sp/f kr. 7.713.712,-
2. IR Lastbilar áljóðandi Sp/f kr. 6.888.882,-
3. J&K Petersen P/f kr. 9.743.618,-
4. Við Sjógv Sp/f kr. 6.457.158,-
5. Við Sjógv Sp/f – Alternativt boð kr. 6.141.908,-

**Kostnaðarmetingar**
Ráðgevin, HMP-Consult, hevur gjørt eina kostnaðarmeting fyri anlegdsarbeiðið á kr. 6.200.000,-, sí j.nr. 16/04713-1.

Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting við støði í alternativa tilboðnum frá Sp/f við Sjógv. Kostnaðarmetingin er íalt áljóðandi kr. 7.450.000. Hetta er tó treytað av at loysn kann finnast uppá at sleppa av við avgrevsturin í nærumhvørvinum. Um ikki, er kostnaðurin uml. kr. 300.000,- hægri. Hjálagt er kostnaðarmeting.
Arbeiðið er mett at taka 15 mánaðir og verður væntandi liðugt í oktober 2017.
Áður eru játtaðar kr. 290.000,-. Fíggjartørvurin er sostatt kr. 7.160.000,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka av tilboðnum frá Sp/f við Sjógv og heimila umsitingini at gera sáttmála um arbeiðið og bjóða fakeftirlitið út.
Mælt verður til, at verkætlanin verður fíggjað við at flyta kr. 3.312.000,- frá játtanini til útstykking á Lygnesi, og restin, kr. 3.848.000,-, verður fíggjað við sølu av grundøkjum í 2017.
Eisini verður mælt til at heimila umsitingini at taka upp samráðingar við arbeiðstakaran Sp/f við Sjógv, gera sáttmála og bjóða fakeftirlitið út í innbodnari lisitatión millum 5 ráðgevar.
Málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. maj 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

**Kollafjarðarnevndin 05. september 2016:** Umboð frá teknisku deild greiddi frá málinum.

**Ískoyti**
Sáttmáli um útstykkingararbeiðið varð gjørdur við Sp/f Við Sjógv tann 7. juli 2016. Útstykkingararbeiðið gekk væl, og var útstykkingin handað kommununi tann 31. mai 2018.
Verkætlanin L64007 Útstykking á Hamrabø Kollafirði hevur eitt avlop á kr. 1.380.000.

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja**
**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☒

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |

| Upphædd |
|---|

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6475 | L64007 | Ùtstykking á Hamrabø | 6475 | L00002 | Framfluttur løgukarmur, ógreinað | | | 1.380.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at avlopið av verkætlanini L64007 Útstykking á Hamrabø á kr. 1.380.000 verður flutt til L00002 løgukarmur fyri Byggibúning til bústaðir í 2022, og at verkætlanin L64007 verður lokað, at málið verður beint í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. november 2023:** Útsett.

**Ískoyti**
Í sambandi við at borgarafundir hava verið í Kollafirði, er víst á ónøgd við, at eingin gongubreyt er gjørd á útstykkingini. Av tí at verkætlanin annars er liðug við einum avlopi á kr. 1.380.000 er møguleiki fyri at gera gongubreyt frá Bøgøtu 14 og úteftir í niðara borði innanfyri verkætlanina.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til, at arbeiðið at gera gongubreyt í útstykkingini á Hamrabø verður boðið út og framt innan fyri játtanina, ið er eftir á L64007 Útstykking á Hamrabø.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 08. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

## 93/24 Útstykking á Kongavarða til grundstykkir á matr. nr. 255a, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 73/14 | 14/05161-3 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.02.2015 | 41/15 | 14/05161-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 11.03.2015 | 57/15 | 14/05161-3 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.03.2015 | 97/15 | 14/05161-3 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.04.2015 | 92/15 | 14/05161-3 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.10.2015 | 190/15 | 14/05161-3 |
| 7 Tekniska nevnd | 04.11.2015 | 133/15 | 14/05161-3 |
| 8 Fíggjarnevndin | 11.11.2015 | 279/15 | 14/05161-3 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.02.2016 | 55/16 | 14/05161-3 |
| 10 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 63/16 | 14/05161-3 |
| 11 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 61/16 | 14/05161-3 |
| 12 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.03.2016 | 79/16 | 14/05161-3 |
| 13 Fíggjarnevndin | 17.03.2016 | 119/16 | 14/05161-3 |
| 14 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 91/16 | 14/05161-3 |
| 15 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2016 | 166/16 | 14/05161-3 |
| 16 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 217/16 | 14/05161-3 |
| 17 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 175/16 | 14/05161-3 |
| 18 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.09.2016 | 220/16 | 14/05161-3 |
| 19 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 324/16 | 14/05161-3 |
| 20 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 256/16 | 14/05161-3 |
| 21 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.11.2023 | 193/23 | 14/05161-3 |
| 22 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.04.2024 | 69/24 | 14/05161-3 |
| 23 Tekniska nevnd | 22.04.2024 | 36/24 | 14/05161-3 |
| 24 Fíggjarnevndin | 23.04.2024 | 118/24 | 14/05161-3 |
| 25 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 93/24 | 14/05161-3 |
| 26 Býráðsfundur | | | 14/05161-3 |

**Málslýsing**:
Tórshavnar kommuna hevur keypt ognina undir Kongavarða, matr. nr. 255a, Argir, frá Valbjørn Dalsgarð.

Sambært uppruna ætlanini fyri Kongavarða skuldi ovasti parturin av økinum nýtast til raðhúsabygging, men kommunan hevur ætlanir at útstykkja økið til sethúsagrundstykkir.

Neyðugt er at gera skipanarætlan fyri alt økið.

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin mælir til, at nevndin heimilar umsitingini:

- at umsitingin, saman við ráðgeva, ger eitt skipanaruppskot fyri alt økið, sum umfatar byggiøki, felags- og fríøkir, atkomuviðurskifti, vegir og gøtur v.m. og at gera eina fyribils kostnaðarmeting.
- at arbeiði, sum er mett at kosta kr. 100.000, í fyrsta umfari verður fíggjað av serkønari hjálp á teknisku fyrisitingini 1313.
- At skipanaruppskotið verður at leggja fyri nevndina aftur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur gjørt eitt skipanaruppskot fyri fyri ognina undir Kongavarða. Eftir uppskotinum er pláss til 30 raðhús, 4 íbúðarhús og 50 grundstykkir til sethús.Fyri at náa einum talið uppá 50 grundøkir til sethús, er tó neyðugt at gera eitt makaskifti uppá uml. 1500 m$^2$ við Búnaðarstovuna, soleiðis at teir fáa uml. 1500 m$^2$ burtur av matr. nr. 255a fyri uml. 1500 m$^2$ av matr. nr. 4a Kirkjubøhagi Fyri Handan, Poul Müller festari.

Atkomuvegurin niðan til tey 50 sethúsagrundstykkini er uml. 375 m, max hall er 120 promillu. Hesin vegurin er mettur at kosta uml. 6,5 milliónir. Hesin vegurin kann verða atkoma til fleiri grundstykkir, um kommunan fær ognað sær meira lendi burtur av matr. nr. 4a.

Grundstykkini eru uml. 400 m$^2$ til støddar.

Tað ber ikki til at gera eina kostnaðarmeting út frá verandi tilfari.

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin mælir til at taka undir við skipanaruppskotinum, at abeiða víðari við at gera eina kostnaðarmeting og løgdeildin tekur samráðingar upp við Búnaðarstovuna um makaskiftið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 11. marts 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt víðari við skipanaruppskotinum og gjørt tilhoyrandi kostnaðarmeting. Fyri at minka um hallið á býlingsvegnum, eru smávegis broytingar gjørdar í ætlanini. Fyri at fáa so gott útsýni sum møguligt frá hvørjum grundstykki sær, verður arbeitt við fastløgdum planeringskotum . Sí skjal nr. 4 og 5.

1. Býlingsvegur til 4 íbúðarblokkar og p-pláss til 24 íbúðir. Býlingsvegurin er 200 m langur og pláss er fyri 2 bilum til hvørja íbúð.
2. Býlingsvegur til útstykking við 50 grundstykkjum. Býlingsvegurin er umleið 345 m langur, og gongubreyt er uttarumegin vegin. Partar av vegnum krevja nógv fyrireikandi lendisarbeiði. Hægsta veghall er umleið 120 promilli.
3. Sethúsavegur við 50 grundstykkjum. Vegurin er 490 m langur, 9 m breiður, og 1,5 m breið gongubreyt er báðumegin. Hægsta veghall er umleið 100 promilli.

Viðheft er kostnaðarmeting við mettum kostnaði á
Skjal nr. 1. Býlingsvegi til íbúðarblokkarnar
Skjal nr. 2. Útstykking undir Kongavarða
Skjal nr. 3. Býlingsvegi til útstykkingina undir Kongavarða
Viðheft er eisini
Skjal nr. 4. Útstykking og atkomuvegur.
Skjal nr. 5. Útsýni

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at seta í gongd projektering av projektuppskoti við kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri nummar 2. Býlingsveg til útstykking, og nummar 3. Sethúsaveg við 50 grundstykkjum, at uppskot til serstaka byggisamtykt verður gjørt, at leggja fyri nevndina aftur og at beina málið í teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. mars 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
LBF hevur gjørt útbjóðingartilfar til útstykkingina við 48 grundstykkjum. Afturat uppruna uppskotinum er gjørt 2 felags parkeringspláss í útstykkingini og gongubreyt og súkklubreyt báðu megin atkomuvegin. Projektið er granskað og góðkent við smávegis broytingum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at bjóða útstykkingina út í almennari lisitatión og at innkomnu boðini verða løgd fyri byggi- og býarskipanarnevndina skjótast gjørligt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, men at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión.

**Ískoyti:**
Tekniska nevndin skal taka støðu til vegaføringina og teknisku veitingarnar í sambandi við útstykkingarætlanina.

**Tekniska nevnd 04. november 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá býararkitektinum og tekniska stjóranum til fundin í byggi- og býarskipanarnevndini 2. oktober 2015. Nevndin hevur tó hesar viðmerkingar:

- Býlingsvegur til íbúðarblokkarnar (skjal 1) skal hava gongubreyt á báðum síðum.
- Útstykking undir Kongavarða (skjal 2) – vegurin skal hava gongu- og súkklubreyt á báðum síðum.
- Býlingsvegur til útstykkingina undir Kongavarða (skjal 3) – skal hava gongubreyt á báðum síðum.

Nevndin tekur ikki støðu til útbjóðingarhátt.

**Ískoyti:**
Fíggjarnevndin skal taka støðu til samtyktina hjá Byggi- og býarskiparnevndini 02. oktober 2015 og samtyktina hjá Teknisku nevnd 04. november 2015.

**Fíggjarnevndin 11. november 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur, samsvarandi samtykt byggi- og býarskipanarnevndarinnar tann 2. oktober 2015 og eftirfylgjandi býráðsnevndarsamtyktum, boðið arbeiðið at gera atkomuvegin og útstykkingina út í innbodnari lisitatión.

Inn komu fylgjandi tilboð og tilboðsupphæddir:

| | |
|---|---|
| Sp/f TG Verk: | kr. 25.966.157,-. |
| P/f Articon: | kr. 16.644.779,-. |
| P/f J. & K. Petersen: | kr. 19.619.450,-. |

Ráðgevi kommununnar hevur eftirkannað tilboðini og mælir til at taka av tilboðnum frá P/f Articon.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka av tilboðnum frá P/f Articon og heimila umsitingini at samráðast við P/f Articon um sáttmála um arbeiðið, at leggja fyri nevndina aftur saman við samlaðari kostnaðarmeting av arbeiðinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur latið gera samlaða kostnaðarmeting, við støði í uppskoti til sáttmála við P/F Articon (sí j. nr. 14/05161-73), har prosjektering, forkanningar, byggileiðsla, fakeftilit, fyrisiting, óvæntað og MVG v.m. er íroknað.

Við grundarlag í nevnda sáttmálauppskoti við P/f Articon metir umsitingin, at útstykkingararbeiðið kann gerast fyri kr. 26.284.793,- tá allar útreiðslur eru íroknaðar (sí j. nr. 14/05161-72) har væntað verður, at helvtin av upphæddini fellur til gjaldingar í 2016.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararktekturin og býarverkfrøðingurin mæla til, at góðkenna uppskotið til sáttmála og játta kr. 26.284.793,- til gerð av útstykkingini.
Mælt verður til at helvtin av játtaðu upphæddini 13 mió. verður fíggjað við ávegisgjøldum í sambandi við sølu av grundøkjum í 2016 og restfíggingin verður tikin upp við endaliga áseting av søluprísi og íløguætlan kommununnar í 2016 og 2017.
Eisini verur mælt til at heimila umsitingini at útvega prosjekt og tilboð uppá at planera grundøkini.
Málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. mars 2016:** Samtykt at góðkenna uppskotið til sáttmála og at játta kr. 21.554.795,- til gerð av útstykkingini. Eisini verður mælt til at heimila umsitingini at útvega projekt og tilboð uppá at planera grundstykkini.
Málið verður beint í figgjarnevndina og býráðið.

**Fíggjarnevndin 17. marts 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og játta kr. 21.554.795 av konto 6475, ið verður fíggjað við gjøldum í sambandi við sølu av grundøkjum í 2016. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
P/F Articon hevur eftir áheitan latið kommununi tilboð uppá at planera grundøkini, sum koma at liggja fram við útstykkingarvegnum, við skitsum frá býarskipanardeild kommununnar sum fyrimynd.
Tilboðið frá P/F Articon i hevur støði í tekningum, nøgdarútrokningum, metingum v.m. sum P/F Articon sjálvi hava útvegað. Umsitingin hevur ikki havt umstøður at eftirkanna nøgdir o.a. og má tí endaligi kostnaðurin takast við fyrivarni um, at nøgdirnar sum P/F Articon hevur roknað seg fram til, eru røttu og endaligu nøgdirnar sum eru, tá arbeiðið er liðugt.

Tilboðið frá P/F Articon (sí j. nr. 14/05161-89) fyri at planera tey 48 grundøkini er uppá kr. 4.952.255,- uttan MVG.

Umsitingin hevur latið gera samlaða kostnaðarmeting, við støði í tilboðnum frá P/F Articon, har trygging, byggileiðsla, fakeftilit, fyrisiting, óvæntað og MVG v.m. er íroknað.

Við grundarlag í nevnda tilboði frá P/f Articon metir umsitingin, at arbeiðið at planera grundøkini kann gerast fyri kr. 6.473.816,-, tá allar útreiðslur eru íroknaðar (sí j. nr. 14/05161-88), har væntað verður, at helvtin av upphæddini fellur til gjaldingar í 2016.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararktekturin mæla til at heimilað verður umsitingini at gera sáttmála við P/F Articon um planering av gundøkjunum, við støði í tilboði teirra og innanfyri samlaða fíggjarkarm á kr. 6.473.816,- og at játtaðar verða nevndu kr. 6.473.816,- til arbeiðið.
Mælt verður til at helvtin av játtaðu upphæddini 3,2 mió. verður fíggjað við ávegisgjøldum í sambandi við sølu av grundøkjum í 2016 og restfíggingin verður tikin upp við endaliga áseting av søluprísi og íløguætlan kommununnar í 2016 og 2017.
Eisini verur mælt til at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Eftirspurningurin eftir grundstykkjum hevur víst seg at vera størri enn tey 48 stykkini, sum verandi útstykking, sum er í gerð Undir Kongavarða, kann nøkta.

Fyrisiting kommununnar hevur tí fyrireika ávegis uppskot til framhald av útstykkingini vestureftir við umleið 45 grundstykkjum omanfyri verandi bygging Undir Kongavarða, við íbinding í verandi atkomuvegi í gerð (sí j.nr. 14/05161-96).

Fyrisitingin hevur somuleiðis fyrireika sáttmála við ráðgeva um prosjektuppskot og høvuðsprosjekt fyri kr. 275.000,- í sambandi við framhald av útstykkingini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at játtaðar verða kr. 275.000,- til at prosjektera framhald av útstykkingini Undir Kongavarða, fíggjað við ávegisgjøldum í sambandi við sølu av grundøkjum í 2016, og restfíggingin verður tikin upp við endaliga áseting av søluprísi og íløguætlan kommununnar í 2016 og 2017, og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Sáttmáli um útstykkingararbeiðið varð gjørdur við Pf Articon tann 2. mai 2015.
Útstykkingararbeiðið gekk væl, og varð útstykkingin handað kommununi tann 21. juni 2017.
L64008 Útstykking á Kongavarða til grundstykkir hevur eitt avlop á kr. 3.809.000.

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja**
**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☐ |
| Eyka játtan | ☐ |
| Loka verkætlan | ☒ |

| | **Býráðsfundur**<br>24. april 2024 | Blað nr.: 401<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6475 | L64008 | Útstykking á Kongavarða til grundstykkir | 6475 | L00002 | Framfluttur løgukarmur, ógreinað | | 3.809.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at avlopið av verkætlanini L64008 Útstykking á Kongavarða til grundstykkir á kr. 3.809.000 verður flutt til L00002 løgukarmur fyri Byggibúning til bústaðir, og at verkætlanin L64008 verður lokað, at málið verður beint í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. november 2023:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, men at avlopið verður flutt á konto 8112 Asfalt.

**Ískoyti**
Við avgerðini hjá Byggi- og býarskipanarnevsnini frá 8. apríl 2024, har samtykt er, at verkætlanin verður lokað, og avlopið flutt á konto 8112 Asfalt, er talan um eykajáttan, sambært játtanarreglunum. Slík mál krevja tvær viðgerðir í býráðnum.

**Tekniska nevnd 22. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð og beint víðari til aðru viðgerð.

# 94/24 Hosufóðring av kloakkum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.05.2021 | 30/21 | 21/01680-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.05.2021 | 123/21 | 21/01680-5 |
| 3 Býráðsfundur | 27.05.2021 | 151/21 | 21/01680-5 |
| 4 Tekniska nevnd | 22.08.2022 | 52/22 | 21/01680-5 |
| 5 Fíggjarnevndin | 24.08.2022 | 198/22 | 21/01680-5 |
| 6 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 184/22 | 21/01680-5 |
| 7 Tekniska nevnd | 05.06.2023 | 32/23 | 21/01680-5 |
| 8 Fíggjarnevndin | 14.06.2023 | 171/23 | 21/01680-5 |
| 9 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 161/23 | 21/01680-5 |
| 10 Tekniska nevnd | 08.04.2024 | 29/24 | 21/01680-5 |
| 11 Fíggjarnevndin | 17.04.2024 | 90/24 | 21/01680-5 |
| 12 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 94/24 | 21/01680-5 |

**Upprunin til málið**
Eftir gjøgnumgongd av støðulýsingunum, ið blivu gjørdar í 2018, har 14 km av kloakk bleiv filmað, varð úrslitið, at sera stórir partar av kloakkunum mugu umvælast.

**Lýsing av málinum**
Tað er sera dýrt og tíðarkrevjandi at endurnýggja kloakkir, tískil mugu vit hugsa alternativt. Í DK hava veitarar í meira enn 40 ár arbeitt við at fóðra kloakkir, t.v.s. umvælt kloakkirnar innanífrá, soleiðis at vit sleppa undan at grava vegir, gongubreytir og kantsteinar upp, men heldur byggja eitt nýtt rør, undir jørðini. Hetta er nógv bíligari, og til lítlan og ongan ampa fyri borgaran - við tað at arbeiðið verður avgreitt uttan graviarbeiði og tað verður gjørt uttan longri tíðarbil við uppgrivnum vegum, ið tarna ruskinnsavnan og annars kann verða til ampa fyri borgaran. Fleiri av teimum strekkjum ið blivu filma treingja til ábøtur, og liggja leiðingar her m.a. undir bygningum og yvir um høvuðsvegir. Tey strekkir, sum verða fóðrað, eru uml. 1,3 km samanlagt og mettur kostnaður er kr. 3 mió.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Arbeiðið verður avgreitt sambært sáttmála, har veitari heldur seg til Abt93.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Rakstrarstøðin hevur staðið fyri samskifti við Aarsleff

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | Minni umsiting, | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | Minni dálking | | | |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>24. april 2024 | Blað nr.: 403<br>Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | Skjótt og bíligt í mun til grevstur | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**

Peningurin uppá 3,0 mió. verður fíggjaður av konto 6875, og talan er um eitt strekki uppá 1,3 km.

| | **Rakstrarjáttan** | **Løgujáttan** |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 3.000.000 |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk 3.000.000 |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato mai-aug. 2021 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| | **Á** | | | **Av** | | | **Lokað** | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk 3.000.000 | 6875 | nýggj | | 6875 | L00001 og L00002 | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk 1.911.000 | 6875 | nýggj | | 6875 | L00001 | | | |
| Dkk 1.089.000 | 6875 | Nýggj (sama) | | 6875 | L00002 | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at:

- Upphædd uppá kr. 1.911.000 verður játtað av konto 6875, L00001, Løgukarmur fyri árið 2021
- Upphædd uppá kr. 1.089.000 verður játtað av konto 6875, L00002, framfluttur løgukarmur 2020
- Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 10. mai 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. mai 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. mai 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**

Royndirnar við hosufóðring í 2021 hava verið góðar. Tað blivu uml. 1,2 km av kloakkleiðing filmað og spulað, síðani fóðrað, og at enda aftur filmað til tess at skjalprógva arbeiðið. Kostnaðurin var uml. 3 mió kr, og gevur hetta ein kostnað á í miðal kr. 2.500 fyri meturin. Her er tá talan um leiðingar, sum í flestu førum liggja undir bygningum, á privatum øki ella undir vegum við nógvari ferðslu. Afturat sjálvari fóðringini komu eyka arbeiðir í sambandi við, at nakrir verandi brunnar á leiðingunum máttu umvælast ella skiftast, og í onkrum førum máttu nýggir brunnar etablerast. Harasturat vóru kostnaðir í samband við kunning til borgarar o.l. Hesar eyka útreiðslur vóru tá uml. kr 400.000.

Ætlanin er at halda fram við hesum arbeiðinum í september 2022, og verður í tí sambandinum tørvur á kr. 3.400.000 til at fremja arbeiðið í august-september 2022. Her er ætlanin, at 1,1 km av kloakkleiðing verður fóðrað, og avleidd arbeiðir verða gjørd. Á konto 6875 Kloakkir (íløgur), L68040 Hosufóðring av kloakkum, eru í løtuni kr. 508.000. Tí er tørvur á, at játtaðar verða kr. 2.892.000 til hesa løgukontu.

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir | 6875 | L68040 | Hosufóðring av kloakkum | | 2.892.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 3.400.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2022/2022 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og Býarverkfrøðingurin mæla teknisku nevnd til, at játtaðar verða kr. 2.982.000 á konto 6875 Kloakkir (íløgur) av løgukarminum LK68999 Kloakkir á løgukontuna L68040 Hosufóðring av kloakkum undir somu konto 6875 Kloakkir (íløgur). Eisini verður mælt til at játta umsitingini at gera sáttmála við arbeiðstakarar um arbeiðið at hosufóðra kloakkirnar og gera avleidd arbeiðir í hesum sambandi. Mælt verður til, at málið verður beint umvegis fíggjarnevndina í Býráðið.

**Tekniska nevnd 22. august 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 24. august 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Royndirnar við hosufóðring í 2021 og 2022 hava verið góðar. Í 2022 blivu uml. 1,1 km av kloakkleiðing filmað og spulað, síðani fóðrað, og at enda aftur filmað til tess at skjalprógva arbeiðið. Kostnaðurin var uml. kr. 3,1 mió., og gevur hetta ein kostnað á í miðal kr. 2.820 fyri meturin. Her er tá talan um leiðingar, sum í flestu førum liggja undir bygningum, á privatum øki ella undir vegum við nógvari ferðslu. Leiðingarnar, sum eru lagdar í 2022, eru við størri dimensiónum enn tær, sum blivu lagdar í 2021. Hetta hevur viðført ein hægri eindarkostnað enn í 2021. Afturat sjálvari fóðringini komu eyka arbeiðir í sambandi við, at nakrir verandi brunnar á leiðingunum máttu umvælast ella skiftast, og í onkrum førum máttu nýggir brunnar etablerast. Harafturat vóru kostnaðir í samband við kunning til borgarar o.l.

Ætlanin er at halda fram við hesum arbeiðinum í august/september 2023, og verður í tí sambandinum tørvur á uml. kr. 3.300.000 til at fremja arbeiðið í august-september 2023. Her er ætlanin, at 0,9 km av kloakkleiðing verður fóðrað, og avleidd arbeiðir verða gjørd. Í hesum umfarinum verður serligt fokus á leiðingar við stórum dimensiónum (Ø500-Ø800). Á konto 6875 Kloakkir (íløgur), L68040 Hosufóðring av kloakkum, eru í løtuni kr. 330.000. Tí er tørvur á, at játtaðar verða kr. 3.000.000 til hesa løgukontu til fóðring og avleidd arbeiðir í 2023.

Arbeiðið, at fóðra leiðingarnar er grundað á filming av leiðingunum í 2018, tá 14 km av leiðingum blivu filmaðir. Út av hesum 14 km eru, tá 2023 er farið afturum, 3.2 km av leiðingum fóðraðir. Tí er nú tørvur á, at tryggja, at grundarlag framhaldandi er fyri at velja røttu strekkini komandi árini. Hetta verður tryggjað við nýggjum filmingum, hesa ferð við største fokus á miðbýin. Tá filmað verður, verða leiðingarnar um somu leið spulaðar, har tørvur er á hesum, fyri at filmingin skal eydnast. Væntandi kann á leið sama longd av leiðingum, sum í 2018, verða filmað fyri eina upphædd á kr. 1.000.000.

Viðmerkjast skal, at báðar hesar ætlanir longu eru samtyktar í kloakkætlanini fyri 2023, tá við tí fyrivarni, at játtanin verður samtykt serskilt.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☒ |
| Eyka játtan | ☐ |
| Loka verkætlan | ☐ |

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK68999 | Kloakkir | 6875 | L68040 | Hosufóðring av kloakkum | | 4.000.000,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 4.000.000,- |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | - |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at játtaðar verða kr. 4.000.000,- á konto 6875 Kloakkir (íløgur) av løgukarminum LK68999 Kloakkir á løgukontuna L68040 Hosufóðring av kloakkum undir somu konto 6875 Kloakkir (íløgur). Eisini verður mælt til at játta umsitingini at gera sáttmála við arbeiðstakarar um arbeiðið at hosufóðra kloakkirnar og gera avleidd arbeiðir í hesum sambandi. Mælt verður til, at málið verður beint umvegis fíggjarnevndina í Býráðið.

**Tekniska nevnd 05. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. juni 2023:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Royndirnar við hosufóðring seinastu 3 árini hava verið góðar. Í 2023 blivu uml. 850 metur av kloakkleiðing filmað og spulað, síðani fóðrað, og at enda aftur filmað til tess at skjalprógva arbeiðið. Samlaði kostnaðurin fyri alt arbeiði í 2023 var uml. kr. 3,25 mió., og gevur hetta ein kostnað á í miðal kr. 3.820 fyri meturin. Her er talan um leiðingar, sum í flestu førum liggja undir bygningum, á privatum øki ella í vegi við nógvari ferðslu. Fleiri av leiðingunum sum blivu endurnýggjaðar í 2023 vóru av størri dimensión, og avspeglast hetta í eindarkostnaðinum. Afturat sjálvari fóðringini komu eyka arbeiðir í sambandi við, at nakrir verandi brunnar á leiðingunum máttu umvælast ella skiftast, og í onkrum førum máttu nýggir brunnar etablerast. Harafturat vóru kostnaðir í sambandi við kunning til borgarar o.l.

Ætlanin er at halda fram við arbeiðinum í august-september 2024, og verður í tí sambandi tørvur á uml. kr. 3.000.000 til at fremja arbeiðið í august-september 2024. Lagt er upp til at áleið 1050 metrar av

kloakkleiðing verður hosufóðrað, og eisini verða avleidd arbeiðir gjørd. Í hesum umfarinum verða leiðingar við bæði størri og minni dimensiónum fóðraðar.

Tilboðið frá arbeiðstakara ljóðar uppá kr. 3 mió. í alt við kommunu-mvg.
At filma nýggj økir við eldri kloakkum í 2024 kostar aðrar kr. 500.000.

Á konto 6875 Kloakkir (íløgur), L68040 Hosufóðring av kloakkum, eru í løtuni kr. 467.334. Tí er tørvur á, at játtaðar verða kr. 3.032.666 afturat verandi játtan til hesa løgukontu til fóðring og avleidd arbeiðir í 2024

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir | 6875 | L68040 | Hosufóðring av kloakkum | | 3.032.666 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 3.500.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Teknkiski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- at játta umsitingini at gera sáttmála við arbeiðstakara um arbeiðið, at hosufóðra kloakkirnar og gera avleidd arbeiðir í hesum sambandi.
- at avlopið á konto L68040 Hosufóðring av kloakkum í 2023 áljóðandi kr. 467.334 verður flutt fram til 2024.
- at játtaðar verða afturat kr. 3.032.666 av konto 6875 Kloakkir (íløgur), løgukarmur LK68999 Kloakkir á konto 6875 Kloakkir (íløgur), løgukonta L68040 Hosufóðing av kloakkum
- og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 08. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

## 95/24 Ferðslutrygd við gonguteigar kring Skúlan við Løgmannabreyt - og við gonguteigin á Kongabrúnni

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.02.2024 | 14/24 | 23/05952-4 |
| 2 Ferðslunevndin | 06.03.2024 | 11/24 | 23/05952-4 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.04.2024 | 88/24 | 23/05952-4 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 95/24 | 23/05952-4 |

**Upprunin til málið**
Skriv frá eigarafeløgunum Hoyvíkshædd, Eystan Gil, og Oman Gil, har tey heita á kommununa um at betra um ferðsluviðurskiftini kring Skúlan við Løgmannabreyt.

**Lýsing av málinum**
Ásannandi tørvin á at endurskoða ferðslutrygdina kring Skúlan við Løgmannabreyt, hevur umsitingin gjørt eitt uppskot til loysn. Uppskotið fevnir um at betra um viðurskiftini við verandi gonguteigar kring skúlan, eitt nú við at seta ljós niður í gonguteigarnar, hesi lýsa, tá ein ætlar sær yvir um vegin.

Uppskotið hevur verið til hoyring hjá eigarafeløgunum, og tóku tey undir við uppskotinum.

Talan er um at uppstiga tríggjar gonguteigar við gonguljósi í hvítu teigunum og við sokallaðum toronto-ljósum, sambært skjali 23/05952-5.

Í sama viðfangi er ætlanin at royna somu loysn á gonguteigin við Kongabrúnna.

Arbeiðið fyri allar hesar fýra gonguteigar er mett at kosta 550.000 kr. v. k-MVG.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
23/05952-5 Uppskot.pdf

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

| | **Býráðsfundur**<br>24. april 2024 | Blað nr.: 408<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | | Játtast á: | | | | | Upphædd |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | | Upphædd |
| 8175 | LK81999 | Vega-verkætlan | | 8175 | | | Ferðslutrygd við gonguteigar | | 550.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- At játtaðar verða kr. 550.000 av konto 8175, Vegagerðir, LK81999, Vegaverkætlanir, á konto 8175, nýggj verkætlan "Ferðslutrygd við gonguteigar"
- At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina og ferðslunevndina.

**Tekniska nevnd 12. februar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Sambært ásetingunum í ferðslulógarkunngerðini er tað ferðslumyndugleikin, sum tekur avgerð í slíkum málum við samtykki frá vegamyndugleikanum.

Her hevur málið verið fyri í Teknisku nevnd, áðrenn tað hevur verið viðgjørt av ferðslumyndugleikanum.

Um ferðslumyndugleikin tekur undir við avgerðini hjá teknisku nevnd, verður niðurstøðan hjá Teknisku nevnd at staðfesta sum samtykki til avgerðina hjá ferðslunevndini, og málið verður ikki neyðugt, at leggja aftur fyri teknisku nevnd.

**Tilmæli**
Mælt verður ferðslunenvdini til at samtykkja tilmælið til teknisku nevnd.

**Ferðslunevndin 06. mars 2024:** Tekur undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og ferðslunevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>24. april 2024 | Blað nr.: 409<br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 96/24 Fleiri koyritímar til bussleiðina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 13.02.2024 | 9/24 | 24/00552-1 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 12.03.2024 | 11/24 | 24/00552-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 22.04.2024 | 37/24 | 24/00552-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 22.04.2024 | 21/24 | 24/00552-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 23.04.2024 | 116/24 | 24/00552-1 |
| 6 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 96/24 | 24/00552-1 |
| 7 Býráðsfundur | | | 24/00552-1 |

**Upprunin til málið**
Í umhvørvispolitikkinum hjá Tórshavnar kommunu, Grøna Leiðin, er samtykt, at arbeitt verður fram ímóti eini grønari kommunu. Bussleiðin er ein týðandi liður í arbeiðinum hjá Tórshavnar kommunu at minka um $CO_2$-útlátið og ovurstóru ferðsluna, sum er í Tórshavnar kommunu. Endamálið við ókeypis bussleiðini, ella eini bussleið uttan ferðaseðlar, er at økja um nýtsluna av bussunum og samstundis flyta fólk frá bilinum yvir í kollektivu ferðsluna.

**Lýsing av málinum**
Fleiri fólk brúka dagliga bussleiðina í Tórshavnar kommunu, og bussleiðin er í dag hjá mongum eitt alternativ til egnan bil. Bussleiðirnar eru ymiskar alt eftir fólkagrundarlagnum, men t.d. leið 1, sum koyrir millum Argir og Hoyvík gjøgnum Steinatún, koyrir upp til 4 ferðir um tíman gerandisdagar kl 07-16. Leið 1 er eisini tann mest brúkta farleiðin. Bussleiðin hóskar væl til dagliga ferðing hjá skúlabørnum og øllum, sum hava ørindi í dagtímunum, og er eisini væl egnað hjá teimum, sum búgva nakrar kilometrar frá arbeiðsplássinum.

Fyri at enn fleiri skulu nýta buss, er neyðugt, at bussleiðin verður útbygd við fleiri túrum eftir vanliga arbeiðstíð, um kvøldið og í vikuskiftinum. Fyri tann einstaka hevur tað týdning, at bussur er sambærligur við egnan bil, og gerst hann tað, fara fleiri at velja at brúka buss.

Fleiri broytingar eru seinastu árini gjørdar í bussleiðini. Í 2008 gjørdist tað ókeypis at nýta buss, í 2011 øktist túratali og í 2019 øktist túratalið uppaftur og bussarnir fóru aftur at koyra bæði leygardag og sunnudag í Havn. Í 2023 komu tveir elbussar uppí busshópin.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6177 | | Umsiting og røkt av byningum, Orkuátøk | 7510 | | Bussleiðin | | 2.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til:

- at flyta kr. 2 mió. av kontu nr. 6177 Umsiting og røkt av bygningum, Orkuátøk, inn á kontu 7510, Bussleiðin.
- at beina málið í fíggjarnevndina umvegis teknisku nevnd og síðani í býráðið til tvær viðgerðir.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 13. februar 2024:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Skal bussleiðin veruliga gerast eitt val í mun til bilin, so má bussleiðin koyra fleiri túrar longur út á dagin, serliga um kvøldið og í vikuskiftinum, hetta er nakað, sum nógv fólk hava gjørt vart við, og tí verður skotið upp, at bussleiðin fær 2 mió. kr. eyka at koyra fyri restina av 2024.

Umsitingin hevur hugt eftir, hvar hesin peningurin kemur at gagna flest brúkarum av bussleiðini, har "flest fáa mest".

Leið 1, er tann nógv mest brúkta farleiðin hjá bussleiðini. Henda leiðin koyrir frá Hamaranum á Argjum, gjøgnum býin, niðan í Hoyvík og Inn á Gøtu, og út aftur til Hamaran. Leiðin koyrir framvið landssjúkrahúsinum, skúlum, kirkjum, samkomuhúsum og ítróttaøkjum. Tí er besta loysnin at seta fleiri eykatúrar inn á hesa leiðina, bæði gerandisdagar, leygardag og sunnudag.

Uppskotið er:

<u>Gerandisdagar: Mánadag til Fríggjadag</u>
Leið 1, sum byrjar á Hamaranum kl. 06:50, kemur nú at koyra ein túr longur út á dagin og endar kl. 17:36 ístaðin fyri kl. 16:36.

Sum nakað nýtt, kemur leið 1, sum byrjar at koyra kl. 07:35 av Hamrinum, at koyra til kl. 23.21. Tað vil siga, at 2 bussar koma at koyra á leið 1 um kvøldið, soleiðis at teir koyra hálva hvønn tíma.

Leið 2, sum byrjar av Norðasta Horni kl. 06:45, koyrir ein túr longur út á dagin og endar at koyra kl. 17:31, í staðin fyri sum nú kl. 16:31.

Leið 4, sum byrjar við Glasir kl. 07:50, koyrir eisini ein túr longur út á dagin og endar at koyra kl. 18:36, í staðin fyri sum nú kl. 17:36.

Leygardagar
Leið 1, sum byrjar kl. 10:05, kemur at byrja ein túr fyrr um morgunin kl.09:05, koyra ein túr longur um kvøldið og endar at koyra kl. 23:51, í staðin fyri sum nú kl. 22:51.
Sum nakað nýtt, kemur ein bussur afturat at koyra á leið 1 frá kl. 09:35 til kl. 23:21. Hetta merkir, at bussur koyrir tvær ferðir um tíman á leið 1 leygardag, í staðin fyri sum nú eina ferð um tíman.

Leið 2 koyrir ein túr longur um kvøldið og gevst kl. 23:51, í staðin fyri sum nú kl. 22:51

Leið 3 koyrir ein túr longur um kvøldið og gevst kl. 23:26, í staðin fyri sum nú kl. 22:26.

Sunnudag
Leið 1, leið 2 og leið 3 koyra allar 2 túrar longur út á kvøldið og enda ávíkavist kl. 20:51, kl. 20:51 og kl. 21:26, ístaðin fyri sum nú áleið kl. 19:00.

Samlaða tímatalið fyri omanfyri nevndu koyring er 2019 effektivir koyritímar, sum verða býttir soleiðis:

| **Ferðaætlan eykakoyring 2024:** | **Tímar** |
|---|---|
| Eykakoyring vanligar dagar - 1. april til 31 des. | 1242:00 |
| Eykakoyring leygardag - 1. apríl til 31 des. | 554:40 |
| Eykakoyring sunnudag - 1. apríl til 31 des. | 222:40 |
| Eykakoyring, tímar íalt: | 2019:20 |

Núverandi tímatakstur er 823,35 kr.u/mvg. Við núverandi uppskoti til eykakoyring, verður lagt upp fyri, at tímataksturin verður prístalsviðgjørdur 1. apríl 2024.

Við núverandi prísi gevur hetta íalt kr. 1.662.344, uttan mvg, afturat hesum koma mvg og prístalsregulering.

Viðmerkjast skal, at kostnaðurin omanfyri er fyri tíðarskeiðið 1. apríl - 31. desember 2024. Um hesar broytingar skulu halda fram í 2025, má rakstrarjáttanin á konto 7510, Bussleiðin, tillagast samsvarandi.

**Skjøl:**
24/00552-3 Uppskot til nýggja ferðaætlan frá 1. apríl 2024
24/00552-4 Núverandi ferðaætlan.pdf

**Tilmæli:**
Víst verður til tilmælið til fundin tann 13. februar 2024.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 12. mars 2024:** Samtykt at heita á teknisku nevnd um at taka málið upp og finna fígging.

**Ískoyti**
Hetta málið varð lagt fyri náttúru- og umhvørvisnevndina, men átti helst at verið byrjað í teknisku nevnd. Tí verður sama mál nú lagt fyri teknisku nevnd.

Harumframt er politiskt ynski um at skifta ein ella fleiri av verandi diesel-bussum út við ein ella fleiri nýggjar el-bussar. Í tí sambandi er neyðugt at taka upp samráðingar við HZ Bussar. Tá ið avtala hesum viðvíkjandi er komin uppá pláss, verður vent aftur um fígging.

Í sambandi við at innkomuvegurin verður liðugur 1. november 2024, skal bussleið skipast eftir innkomuvegnum og til Oyggjarvegin, og í tí sambandi skal verða heimilað HZ Bussum at gera uppskot til bussleið eftir hesum strekki. Hædd skal seinni takast fyri fígging til nýggju bussleiðina eftir Innkomuvegnum til Oyggjarvegin fyri mánaðirnar november og desember 2024.

**Tilmæli**
Teknisk stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at økt verður um túratalið hjá bussleiðini, sum lýst omanfyri,
- at hetta verður fíggjað við at flyta 2 mió kr. sum eykajáttan av kontu 6177, LK61705 Orkupolitikkur, á konto 7510,
- at heimila umsitingini at fara í samráðingar og at gera avtalu við HZ Bussar um at skifta ein ella fleiri dieselbussar út við ein ella fleiri el-bussar, og tá avtalan er komin uppá pláss at leggja málið aftur fyri teknisku nevnd í sambandi við fígging,
- at heimila HZ Bussum at gera uppskot til bussleið eftir innkomuvegnum og til Oyggjarvegin, og at støða seinni verður tikin til fígging fyri hesa leið fyri november og desember 2024,
- og at beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis náttúru- og umhvørvisnevndina og fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 22. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 22. apríl 2024:** Ein meiriluti, Bjørg Dam og Súna Mørk, tekur undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 23. apríl 2024:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Annika Olsen og Jákup Dam, tekur undir við teknisku nevnd og meirilutanum í náttúru- og umhvørvisnevndini og beinir málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Annfin Brekkstein, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

# 97/24 Útstykking á Signabø

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 19.06.2023 | 113/23 | 23/03516-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.06.2023 | 201/23 | 23/03516-2 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.01.2024 | 16/24 | 23/03516-2 |
| 4 Tekniska nevnd | 22.01.2024 | 3/24 | 23/03516-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 24.01.2024 | 15/24 | 23/03516-2 |
| 6 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 13/24 | 23/03516-2 |
| 7 Kollafjarðarnevndin | 20.03.2024 | 4/24 | 23/03516-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 28.02.2024 | 53/24 | 23/03516-2 |
| 9 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 97/24 | 23/03516-2 |

**Upprunin til málið**
Á seinasta borgararfundi í Kollafirði tann 18. apríl 2023 bleiv nógv umrøða um manglandi møguleikar fyri at seta búgv í Kollafirði, tí onki tøkt byggilendi er í bygdini.

**Lýsing av málinum**
Tekniski stjórin hevur í hesum sambandi fingið fyrispurning frá Betri Banka, um Tórshavnar kommuna er sinnað at keypa eina trøð á Signabø. Talan er um matr. Nr. 283a og matr. Nr. 283d, íalt 12.842 fermetrar, fyri ein fermetraprís á 200 kr, sum gevur ein samlaðan kostnað uppá kr. 2.568.400.

Tann parturin av matrikul nr. 283a, sum liggur omanfyri vegin, og sum hevur eina vídd uppá 10.218 $m^2$, er vælegnað til sethúsaútstykking. Kostnaðurin fyri henda partin av trøðni er kr. 2.043.00.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Tann parturin av matr. Nr. 283a, sum liggur omanfyri vegin, liggur í almennu byggisamtyktini í umráðispartinum A1, sum er til lága bústaðarbygging. Har er ásett, at grundstykkini skulu vera í minsta lagi 500 $m^2$ til víddar, og um serstøk byggisamtykt verður gjørd, í minsta lagi 400 $m^2$ til víddar.

Tann parturin av matr. Nr. 283a, sum liggur niðanfyri vegin, og matr. Nr. 283d, liggja í almennu byggisamtyktini partvíst í umráðispartinum N (ella F), sum er neystaøki og partvíst í 4. grundumráði, sum í høvuðsheitum verður nýtt til landbúnað og alment frílendi og tilíkt.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin hevur hugt eftir møguleikanum at útstykkja tann partin av matr. Nr. 283a, sum liggur omanfyri vegin. Tað ber til at fáa upp til 18 grundstykkir, sum verða góðar 400 $m^2$ til víddar.

Vegir, parkering, fríøki og annað skal skipast sambært ásetingunum í almennu byggisamtyktini og eini komandi serstakari byggisamtykt.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- Fyrispurningur frá Betri Banka

- Støðuætlan – Kort yvir matrikul 283a

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| | | |

| **Játtast á:** | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir nevndini til:

- At heimila umsitingini at fara undir samráðingar við Betri banka um at keypa tann partin av matr. Nr. 283a, sum liggur omanfyri vegin til at stykkja út.
- At heimila umsitingini at gera útbjóðingartilfar fyri økið og at bjóða ætlanina at gera útstykkingina út í heildararbeiðstøku sum undirhondsboð.
- At tá ið tilboðini eru komin inn, at leggja málið fyri nevndina aftur til endaliga støðutakan.
- At gera uppskot til serstaka byggisamtykt fyri økið, at leggja fyri nevndina aftur og umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og heita á umsitingina um at fáa til vega tilboð, har øll stykkini eru byggibúgvin, og at lýsa stykkini til sølu fyri at síggja, hvørt áhugi er.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir við byggi- og býarskipanarnevndini og mælir til, at annaðhvørt raðhús ella tvíhús verða bygd í ovaru helvt av trøðni.

Annika Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti**
Tveir arbeiðstakarar eru bidnir um at geva boð upp á at gera umrøddu útstykkingina í heildararbeiðstøku.

Í útboðnum vórðu treytir upplýstar og eftir hvørjum leisti innkomnu uppskotini/tilboðini verða dømd. Her var talan um ein stiga frá 0 – 10 har:

- Prísur, vekting 60%
- Tíðarætlan, vekting 10%
- Økisskipan, vekting 7,5%
- Skipan av fríøki, vekting 7,5%
- Felags parkering, vekting 5%
- Lendistillaging í praksis, vekting 2,5%
- Lendistillaging í útsjónd, vekting 5%
- Avvatning, vekting 2,5%

Dømingin var gjørd soleiðis at:

- 0 varð givið fyri, at parturin ikki var uppfyltur
- 3 fyri at parturin var uppfyltur í avmarkaðan mun
- 5 fyri at parturin var lutvíst uppfyltur
- 8 fyri at parturin var uppfyltur, tó við smærri lýtum
- 10 fyri at parturin var uppfyltur til fulnar

Innkomu tilboð frá Hallur Hansen, Entreprenørur Spf. Og Við Sjógv Spf. Kostnaðirnir av tilboðunum vóru hesir:

- Hallur Hansen, Entreprenørur Spf.: kr. 7.966.384,-
- Við Sjógv, Spf.: kr. 9.251.878,-

Eftir leistinum, sum innkomnu tilboðini/uppskotini skuldu dømast, var úrslitið hetta:

- Hallur Hansen, Entreprenørur Spf.: 7,8
- Við Sjógv, Spf.: 7,4

Í høvuðsheitum fekk verkætlanin hjá við Sjógv betri met fyri økisskipan, skipan av fríøki, felags parkering, lendistillaging – bæði í praksis og í útsjónd – og í mun til avvatning. Men av tí at prísur og tíðarætlan eru vektað við til samans 70%, so verður úrslitið, at verkætlanin hjá Halli Hansen verður dømd hægri.

Verkætlanin hjá Halli Hansen, entreprenøri Spf., hevur tó sambært tilboðnum ein kostnað á 442.577 kr. Fyri hvørt av teimum 18 grundstykkjunum umframt kostnaðin av eftirliti og byggiharraveitingum annars og keyp av lendi. Hetta kann koma til samans at verða uml. 700 tkr. Fyri hvørt stykki.

Á borgarafundum í Kollafirði í 2023 kom fram, at ynski er ikki um at keypa grundstykkir fyri henda kostnað, tá tilsvarandi grundstykkir í grannakommunum kunnu fáast fyri niður í 320 tkr.

Eisini vísa royndirnar frá útstykkingini á Hamrabø, at neyðugt var, at lækka prísin fyri grundstykkini. Niðurstøðan er tí, at mælt verður til, at rættast er at bjóða hesi grundstykkini út fyri at staðfesta áhugan millum møguligar keyparar, áðrenn farið verður víðari við at keypa lendið og byggibúgva grundstykkini og gera veg og annað tilhoyrandi.

Neyðugt verður at játtað 12,7 mio til verkætlanina sum eykajáttan av konto 6475, um nóg stór undirtøka verður til útstykkingina.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Loka verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | | **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | Eykajáttan | 6475 | | Nýggj útstykking á Signabø | | 12.700.000,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 12.700.000,- |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024/2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 50.000,- |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til:

- at umsitingini verður heimilað at keypa lendi frá Betri banka fyri kr. 2.043.000,-kr., treytað av at nóg stórur áhugi er fyri útstykkingini
- at umsitingin kannar, um áhugi er millum borgarar at keypa stykkini til omanfyri nevnda kostnað, og at fáa heimild at selja stykkini.
- er nóg stór undirtøka til verkætlanina, verður komið aftur í nevnd at biðja um heimild at fara víðari við samráðingunum og at fyrireika verkætlanina.
- at beina málið í Býráðið til tvær viðgerðir umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. januar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 22. januar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 24. januar 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býrskipanarnevndini og teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Einmælt samtykt við teirri broyting, at grundstykkjakostnaðurin er kr. 500.000 kr.

Málið beint til aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
Vegna samtyktina á býráðsfundi 24. januar 2024, har samtykt varð, at grundstykkjaprísurin verður kr. 500.000,- fyri hvørt grundstykkið skulu samanlagt kr. 3.700.000,- av samlaða kostnaðinum at gera útstykkingina fíggjast uttan um inntøkur frá keypskostnaðinum. Kunnað verður um, at hesin peningur ikki er tøkur í fíggjarætlanini fyri 2024.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2024:** Kunnað varð um málið.

**Kollafjarðarnevndin 20. mars 2024:** Kunnað varð um málið. Nevndin viðmerkti, at ynskiligt er at øll grundstykkini í Kollafirði verða útboðin samstundis, og at kunnað verður um heildarætlanina við Botnánna.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Tikið av skrá.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>24. april 2024 | Blað nr.: 418<br><br>Formansins merki: |

# 98/24 Umbøn um eykajáttan til kontu 7110

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 12.03.2024 | 18/24 | 24/01451-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.03.2024 | 66/24 | 24/01451-1 |
| 3 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 59/24 | 24/01451-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 98/24 | 24/01451-1 |

**Upprunin til málið**
Tekniska fyrisitingin hevur gjørt uppskot um at endurskoða og skipa burturkastøkið í Tórshavnar Kommunu av nýggjum. Um politiska skipanin tekur undir við uppskotinum og ynskir at seta partar av tilmælunum í verk í ár, so er tørvur á fígging, sum ikki er tøk á rakstrinum á tekniska økinum í 2024. Tí verður biðið um fígging við hesi eykajáttan.

**Lýsing av málinum**
Tórshavnar Kommuna og IRF hava í longri tíð arbeitt við at leggja virksemið hjá Kommunalu brennistøðini (KB) og virksemið hjá IRF saman, men hesar ætlanir eru nú endaliga sleptar, og Tórshavnar Kommuna hevur ístaðin valt at dagføra og brynja renovatiónina í kommununi út til framtíðar avbjóðingarnar á grønu leiðini.

Í hesum sambandi hevur Tekniska fyrisitingin í Tórshavnar kommunu gjørt frágreiðing við heitinum: *Uppskot til broytingar á burturkastøkinum,* jnr. 24/01098-2. Víst verður til hesa frágreiðing, har allir partar av ætlanini at dagføra og brynja renovatiónina í kommununi til framtíðina eru lýstir nærri.

Ætlanirnar um at leggja saman virksemið hjá KB og IRF hava m.a. havt við sær, at Tórshavnar kommuna ikki hevur raðfest íløgur og útbyggingar á KB hesi seinastu árini. Støðan við maskinum og útbúnaði á KB er tí afturúrsigld, og hetta hevur tyngt raksturin á konto 7110, Renovatión, nógv við fleiri óvæntaðum og størri útreiðslum hesi seinastu árini. Stór meirnýtsla hevur tí verið á hesi konto tey seinastu árini. Í 2023 var meirnýtslan góðar 4,2 mió. kr., sum verður framflutt til 2024.

Tað ber tí longu nú til at staðfesta, at konto 7110 ikki fer at megna at halda játtanina á 28.9 mió. kr. í 2024. Meirnýtslan á 4,2 mió. kr. í 2023 má tí fíggjast við eykajáttan í ár.

Harumframt má fígging eisini útvegast til at dagføra fyrisitingina á KB. Hetta verður mett til 800 t.kr. í 2024. Ein arbeiðsbólkur at gera uppskot til, hvussu økini á Hjalla og á Sundi kunnu nýtast, innrættast og rekast, verður mettur at kosta 300 tkr. í 2024.

Fyri at kunna fara í holt við at fremja broytingarnar á burturkastøkinum beinanvegin verður so statt samanlagt biðið um 5,6 mió. kr. til konto 7110 við hesi umbøn um eykajáttan.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Onki.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Víst verður til frágreiðing: *Uppskot til broytingar á burturkastøkinum*, jnr. 24/01098-2.

Eykajáttanin uppá kr. 5,6 mió sum biðið verður, um er til at fíggjað:

1) Meirnýtsla 2023 kr. 4.250.000
2) Dagføring av fyrisitingini kr. 800.000
3) Arbeiðsbólkur, serkøn hjálp kr. 300.000

4) Sjálvsábyrgd fyri skaða kr. 250.000

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Í sambandi við ætlanina eru hesi mál stovnað:
- 24/01098 Skipan av virkseminum á Hjalla og á Sundi
- 24/01097 Leiga av øki á Sundi
- 24/01095 Bygnaður á Brennistøðini

Felags skjøl liggja í máli nr. 24/01098.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongin.

**Skjøl**
Uppskot til broytingar á burturkastøkinum, jnr. 24/01098-2.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur | 7110 | | | | 4.000.000 |
| 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur | 7110 | | Framflutt frá 2023 | | 1.600.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, sum eisini er virkandi umhvørvisleiðari, mælir til, at kr. 4,0 mió. verða fluttar av játtanini fyri orkupolitikkin 2024, umframt kr. 1,6 mió. av framfluttum avlopi til orkupolitikkin 2023, sum verður avgreitt í mai 2024 í sambandi við góðkenning av kommunala roknskapinum á konto 7110, til at dekka meirnýtslu og fyri at arbeiða víðari við ætlanini "*Uppskot til broytingar á burturkastøkinum*", jnr. 24/01098-2.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 12. mars 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2024:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini við teirri broyting, at játtaðar verða kr. 4.250.000 av konto 6177 LK61705 á konto 7110 og at beina málið í býráðið til tvær viðgerðir sum eykajáttanarmál og við teirri viðmerking, at játtanarreglurnar skulu haldast.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Tikið av skrá.

## 99/24 Orkupolitikkur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 05.10.2017 | 46/17 | 17/03154-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 252/17 | 17/03154-1 |
| 3 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 07.06.2018 | 37/18 | 17/03154-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.04.2019 | 14/19 | 17/03154-1 |
| 5 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 07.10.2019 | 44/19 | 17/03154-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 281/19 | 17/03154-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 27.11.2019 | 333/19 | 17/03154-1 |
| 8 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 287/19 | 17/03154-1 |
| 9 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 30.11.2020 | 48/20 | 17/03154-1 |
| 10 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 12.02.2021 | 11/21 | 17/03154-1 |
| 11 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 30.11.2021 | 47/21 | 17/03154-1 |
| 12 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 329/21 | 17/03154-1 |
| 13 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 08.03.2022 | 15/22 | 17/03154-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 79/22 | 17/03154-1 |
| 15 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 68/22 | 17/03154-1 |
| 16 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 16.08.2022 | 32/22 | 17/03154-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 24.08.2022 | 201/22 | 17/03154-1 |
| 18 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 190/22 | 17/03154-1 |
| 19 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 07.03.2023 | 8/23 | 17/03154-1 |
| 20 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 11.04.2023 | 14/23 | 17/03154-1 |
| 21 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 102/23 | 17/03154-1 |
| 22 Fíggjarnevndin | 27.04.2023 | 134/23 | 17/03154-1 |
| 23 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 99/23 | 17/03154-1 |
| 24 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 20.06.2023 | 27/23 | 17/03154-1 |
| 25 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 10.10.2023 | 44/23 | 17/03154-1 |
| 26 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 275/23 | 17/03154-1 |
| 27 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 251/23 | 17/03154-1 |
| 28 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 09.01.2024 | 5/24 | 17/03154-1 |
| 29 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 22.04.2024 | 20/24 | 17/03154-1 |
| 30 Fíggjarnevndin | 23.04.2024 | 113/24 | 17/03154-1 |
| 31 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 99/24 | 17/03154-1 |

**Málslýsing:**

**Uppskot til leist**
Í umhvørvispolitikkinum 'Grøna leiðin' hjá Tórshavnar kommunu eru mál ásett fyri útlát, orkunýtslu og varandi orkukeldur.

Umráðandi er at ítøkiliggera hesi mál, t.v.s. hvussu kommunan minkar um nýtsluna av fossilari orku, leggur um til varandi orku og hvørji orkusparandi átøk, ið kommunan eigur at fremja.

Ætlanin er tí at seta ein arbeiðsbólk og ein stýrisbólk til at útgreina hetta arbeiðið. Arbeiðsbólkurin ger uppskot til arbeiðssetning og tíðarætlan, sum tekur støði í teimum málum, sum eru sett í umhvørvispolitikkinum, og hvørji átøk kommunan skal seta í verk fyri at røkka tess málum innan orkuøkið.

Arbeiðsbólkurin skal viðgera einstøku málini og gera ítøkilig uppskot til átøk/tiltøk fyri hvørt einstakt mál innan orku. Hetta verður gjørt í einum breiðum samstarvi millum deildir í teknisku fyrisiting. Arbeiðsbólkurin verður mannaður við á leið 4-5 umboðum úr fyrisitingini, herímillum umboð frá húsaumsitingini, teknisku deild, býarskipanardeildini og byggi- og umhvørvisdeildini. Starvsfólk á byggi- og umhvørvisdeildini samskipar arbeiðið og er skrivari hjá bólkinum.

Aktørar og intressentar, sum eru í samfelagnum innan orku, verða eisini ein partur av arbeiðinum, og verða hesir tiknir uppá ráð og innkallaðir til fund, tá arbeiðsbólkurin hevur tørv á hesum.

Arbeiðsbólkurin hevur fundarvirksemið á leið 2-3 ferðir um mánaðin. Ávegis í arbeiðinum verða fundir við stýrisbólkin, á leið 6. hvørja viku. Stýrisbólkurin verður mannaður við trimum umboðum fyri politisku skipanina, deildarleiðara á byggi- og umhvørvisdeildini og tekniska stjóra.

Yviskipaður leistur:

1. Arbeiðs- og stýrisbólkur verður settur.
2. Arbeiðsbólkur orðar arbeiðssetning fyri orkupolitikk, ið er grundaður á mál sett í umhvørvispolitikkinum.
3. Útgreinað núverandi orkunýtslu: hagtøl, status anno 2016/2017, grønur roknskapur v.m.
4. Arbeiðsbólkur ger uppskot til raðfesting av átaksøkjum og íløgum innan orkuøkið - skjótt syftir seiðir, tað tunga takið.
5. Hitaætlan og útbygging av fjarhitakervinum í Tórshavnar kommunu – víðari leistur
6. Uppskot til orkupolitikk við átøkum verður viðgjørt í politisku nevndunum.
7. Átøk/tiltøk skulu setast í verk - ábyrgdarøki og íløgur verða heimilað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin samtykkir:

1. uppskot til leist at gera orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu, sum útgreinar hvørji átøk skulu setast i verk fyri at røkka teimum málum, sum eru sett fyri orkuøkið í umhvørvispolitikkinum.
2. at beina málið í býráðið, sum tilnevnir 3 politisk umboð sambært §36 í kommunustýrislógini at sita í stýrisbólkinum, t.e. forkvinnan í náttúru- og umhvørvisnevndini, forkvinnan í byggi- og býarskipanarnevndini og eitt umboð úr fíggjarnevndini.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 05. oktober 2017:** Ein meiriluti, Turið Horn, Gunvør Balle og Bergun Kass, samtykti at taka undir við tilmælinum og at formaðurin í teknisku nevnd eisini verður í stýrisbólkinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, tekur undir við tilmælinum, men mælir til at ein frá minnilutanum í náttúru- og umhvørvisnevndini eisini verður í stýrisbólkinum.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt og at velja Hallu Samuelsen, Turið Horn og Jákup Dam í stýrisbólkin.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at gera orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu byrjaði í januar 2018. Arbeiðsbólkurin hevur higartil havt sjey arbeiðsfundir, og tríggir fundir hava verið við stýrisbólkin.

Arbeiðið hjá arbeiðsbólkinum hevur higartil í størstan mun verið at gera eina støðulýsing av orkunýtsluni og CO2-útlátinum hjá kommununi (2016 og 2017), ið verður útgreinað fyri hesi økir:

- bygningar
- vatnverk
- gøtuljós
- pumpuskipanir
- bilar/akfør/maskinur
- bussleiðin
- Brennistøðin
- Tórshavnar havn

Nógv arbeiði liggur aftanfyri at fáa hagtøl til vega fyri orkunýtsluna hjá Tórshavnar kommunu. Eitt nú hevur praktikantur á teknisku deild havt nógv arbeiði við at fáa hagtøl til vega fyri bilar/akfør/maskinur og pumpuskipanir. Í verandi løtu verður ein frágreiðing skrivað um orkunýtsluna og CO2-útlátið hjá Tórshavnar kommunu.

Skipað varð eisini fyri einum temadegi um orku tann 20. apríl. Luttakarar á degnum vóru arbeiðsbólkurin og stýrisbólkurin fyri orku í Tórshavnar kommunu, umboð frá SEV og umboð frá Fjarhitafelagnum. Endamálið við degnum var at fáa eina lýsing av orkuøkinum, har verandi støða og framtíðarætlanir hjá øllum pørtum varð væl lýst.

Á degnum vóru áhugaverdar og upplýsandi framløgur frá øllum pørtum og mett varð, at temadagurin eydnaðist væl. Ætlanin er, at partarnir framyvir javnan møtast til arbeiðsfundir at umrøða ymiskar orkuspurningar og ætlanir á økinum.

Næsta stig í arbeiðinum hjá arbeiðsbólkinum er at útgreinað potentialið fyri orkusparing innan ymisku økini í kommununi og at gera meting og raðfesting av ymiskum orkuátøkum og -verkætlanum, herundir íløgu- og rakstarkostnaður.

Somuleiðis liggur eitt umfatandi arbeiði fyri framman at menna kommunalu heimasíðuna viðvíkjandi kunning mótvegis borgaranum um orkunýtslu og orkusparing.

Yvirskipaða tíðarætlanin fyri orkupolitikkin er, at arbeiðið skal verða liðugt í februar/mars 2019.

Arbeiðsbólkurin hevur umrøtt, at neyðugt er við meiri arbeiðsorku at gera ymiskt arbeiði í sambandi við gerð av orkupolitikkinum. Tískil ynskir arbeiðsbólkurin, at lýst verður eftir fólki til verkætlanarsett starv í ½ ár at einans arbeiða við ymiskum, ið hevur við gerð av orkupolitikkinum og orkuøkinum annars í Tórshavnar kommunu.

Hetta varð eisini umrøtt á fundi við stýrisbólkin tann 17. mai, og tók stýrisbólkurin undir við uppskotinum hjá arbeiðsbólkinum.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og virkandi leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin tekur undir við, at kr. 250.000 verða játtaðar av konto 6610 til verkætlanarsett starv í ½ ár, har viðkomandi skal arbeiða við orkuspurningum og gerð av orkupolitikkinum hjá Tórshavnar kommunu.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 07. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við arbeiðið at gera ein orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu, hevur fólk verið í verkætlanarsettum starvi á umhvørvisdeildini síðan 1. november 2018. Verklætlanarstarvið varð tá ásett til 6 mánaðir. Í hesi tíðini er nógv arbeiði gjørt – arbeiðsbólkurin hevur fingið góð hagtøl um orkunýtslu v.m., sum avgerðir og tilmæli kunnu byggjast á. Somuleiðis er nógv neyðug kunning fingin til vega um ymiskt innan orkuøkið í síni heild.

Tó metir arbeiðsbólkurin, at enn er týdningarmikið arbeiði at útgreina, áðrenn arbeiðsbólkurin kann koma á mál við sínum tilmælum í sambandi við ein orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu.

Tí ynskir arbeiðsbólkurin, at verkætlanarstarvið verður longt við tveimum mánaðum, t.v.s. fram til 30. juni 2019.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til, at verkætlanarstarvið í sambandi við gerð av orkupolitikki hjá Tórshavnar kommunu verður longt við tveimum mánaðum, t.v.s. fram til 30. juni 2019, og at peningur til løn í 2 mðr. verður játtaður av konto 6610.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Arbeiðsbólkurin fyri orkupolitkk hevur síðan byrjanina av 2018 gjørt drúgt greiningararbeiðið viðvíkjandi orkunýtslu og $CO_2$-útláti hjá Tórshavnmar kommunu. Hetta greinaingararbeiðið er komið á mál, og hevur arbeiðsbólkurin gjørt nøkur  høvuðstilmæli, sum ein almennur orkupolitikkur hjá Tórshavnar kommunu eigur at byggja á.

Arbeiðsbólkurin hevur havt nógvar innanhýsis fundir og eisini fundir við ymsikar interessentar, m.a. SEV, Orka, Fjarhitafelagið, Tórshavnar Havn.

Ávegis í arbeiðinum hava somuleiðis verið 6 fundir við stýrisbólkin fyri orkupolitikk, har kunna hevur verið um tilgongdina og úrslit hjá arbeiðsbólkinum.

Í høvuðsheitum hevur arbeiðsbólkurin útgreinað orkunýtsluna hjá Tórshavnar kommunu fyri árini 2016 (sum er støðisár í umhvørvispolitkkkinum), 2017 og 2018. Arbeiðsbólkurin hevur gjørt orkufrágreiðingar og tilhoyrandi CO2-rokniskap fyri hesi trý árini.

Arbeiðsbólkurin hevur síðan útgreinað potentialið fyri orkusparing innan ymisku økini í kommununi, t.e. bygningar, vatnverk, pumpuskipanir, akfør/maskinur, gøtuljós, bussleiðin v.fl. Út frá hesum hevur arbeiðsbólkurin gjørt eina meting og raðfesting av ymiskum orkuátøkum og -verkætlanum, herundir eisini íløgu- og rakstrarkostnað.

Arbeiðsbólkurin hevur lagt dent á, hvussu kommunan kann gerast ein grøn kommuna og spara $CO_2$, har vit fáa mest fyri íløguna í mun til sparing í orkuútreiðslum og minking í $CO_2$. Somuleiðis er dentur lagdur á átøk, sum hava høgt signalvirði mótvegis borgaranum.

Arbeiðsbólkurin hevur serliga lagt dent á, hvussu Tórshavnar kommuna kann skerja útlátið av vakstrarhúsgassi hjá Tórshavnar kommunu við 50% í 2025 í mun til 2016, sum er mál í umhvørvispolitikkinum.

Arbeiðsbólkurin hevur gjørt ítøkilig uppskot tilhvørjar orkuverkætlanir og orkuátøk kommunan eigur at seta í verk. Í høvuðsheitum eru tilmælini frá arbeiðsbólkinum fyri tey komandi 6 árini (2020-2025):

1. at ein miðvís orkuumlegging verður framd í bygningum hjá kommununi, tvs. skifta frá olju til fjarhita, jarðhita ella hitapumpu.
2. at øll gøtuljós verða skift til LED
3. at leið 70-80 bilar hjá kommununi verða el-bilar í hesum tíðarskeiðinum.
4. at bussleiðin verður elektrifiserað.

Við hesum verkætlanum og átøkum innan orkuøkið ber til at røkka fleiri av orkumálunum í umhvørvispolitikkinum, m.a. at Tórshavnar kommuna skal skerja útlátið av vakstrarhúsgassi við 50% í 2025 í mun til 2016.

Arbeiðsbólkurin hevur fyri hvørt orkuátak gjørt eina tilhoyrandi kostnaðarmeting, sum vísur, at við eini játtan á 13,5 mió. kr. árliga til orkuátøk komandi 6 árini (2020-2025), so ber til at røkka málinum í umhvørvispolitikkinum.

Víst verður til viðheftu framløgu, sum greiðir nærri frá hesum tilmælunum, hvør $CO_2$- sparingin er, og hvør íløgukostnaðurin er fyri hvørt økið.

Fyri at síggja orð í verki, tvs. um Tórshavnar kommuna skal gerast ein grøn kommuna og liva upp til egin mál í umhvørvispolitikkinum, so er neyðugt at penningur verður játtaður á fíggjarætlanini til verkætlaninr og átøk innan orku, áðrenn Tórshavnar kommuna fer út við einum almennum orkupolitikki, sum byggir á tilmælini hjá arbeiðsbólkinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin samtykkir at seta í verk orkupolitikkin, soleiðis at arbeiðið kann byrja eftir summarfrítíðina og at játta 5,0 mió. í 2020 og restina javnt yvir komandi 6 árini.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 07. oktober 2019:** Samtykt at heita á fíggjarnevndina at útvega fígging, soleiðis at orkupolitikkurin kann setast í verk.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Samtykt at taka málið upp í sambandi við fíggjarætlanararbeiðið fyri 2020.

**Fíggjarnevndin 27. november 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum hja tekniska stjóra og leiðaranum á umhvørvisdeildini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson.

**Ískoyti:**
Í seinasta ískoyti og framløgu varð nevnt, at fortreytin fyri at fáa eina grønari kommunu við 50% lægri $CO_2$-útláti í 2025 er, at kommunan játtar 13,5 mió. kr. um árið, umframt tað sum er játtað á rakstri og íløgu, íalt 15 mió. kr. hvørt ár í 6 ár 2020-2025, ella í alt 90 mió. kr.

Í 2020 vórðu játtaðar 5,0 mió. kr., harav 1,5 mió. kr. til viðlíkahald og orkuátøk í bygningum, tað vil siga, at 3,5 mió. kr. vóru beinleiðis til orkupolitikkin.

Í uppskotinum til fíggjarætlan 2021 lækkar upphæddin til 4,0 mió. kr., harav 1,5 mió. kr. fara til viðlíkahald og orkuátøk í bygningum, tað vil siga, at 2,5 mió. kr. fara beinleiðis til orkupolitikkin.

Uppskotið til almenna orkupolitikkin (tekstur), ið byggir á upprunaligu ætlanina, at minka $CO_2$-útlátið 50%, er næstan klárt. Tó er áramálið nú bert 4 ár fram til 2025, og tí má árliga upphæddin til íløgur verða samsvarandi størri, uml. 22 mió. kr. um árið í 4 ár 2022-2025, um málið skal røkkast.

Ætlanin er at seta í verk gerð av faldara, við uppseting, tekningum og prenti og at fíggja hetta av rakstri, kontu 6610.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at arbeiðið at gera faldara, ið byggir á upprunaligu ætlanina í Orkupolitikkinum og Grønu leiðini, verður sett í verk og fíggjað av rakstri, konto 6610.

Eisini verður mælt til, at nevndin tekur støðu til, um málið at lækka $CO_2$-útlátið við 50% í 2025 skal leingjast, vísandi til at neyðugur peningur ikki er settur av í 2020 og 2021.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 30. november 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at leingja málið at lækka $CO_2$-útlátið við 50% til 2027.

**Ískoyti:**
Elsa Berg, nevndarlimur, hevur biðið um at fáa málið lagt fyri náttúru- og umhvørvisnevndina aftur. Hon vísir á, at á fyrsta fundi í náttúru- og umhvørvisnevndini fekk nevndin eina frágreiðing frá umsitingini um umhvørvis- og orku politikkin hjá Tórshavnar kommunu. Har varð staðfest, at vit fara beint øvugtan veg í mun til okkara útlátsmál, í og við at útlátið enn er í øking og at neyðugt er við sterkari átøkum og meira fígging.

Elsa Berg ynskir at nevndin viðger støðuna, og hvat skal til av átøkum og pengum, fyri at vit røkka málinum.

Hetta varð lýst, tá málið bleiv samtykt, men má dagførast.

Kunnað verður um málið og framløga.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 12. februar 2021:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Sambært orkupolitikkinum hjá Tórshavnar kommuna skal $CO_2$ útlátið hjá kommununi minka við 50% í 2027 í mun til 2016, og hetta skal gerast við at leggja dent á 3 høvuðsmál:

1. GRØN UPPHITING: ALLAR OLJUFÝRINGAR HJÁ TÓRSHAVNAR KOMMUNU ERU BURTUR Í 2027
2. LED GØTULJÓS: ØLL GØTULJÓS SKULU VERA SKIFT TIL LED Í 2027
3. EL-AKFØR: ALLIR PERSÓN- OG VØRUBILAR HJÁ TK VERÐA ELRIKNIR Í 2027

Á leið 90 mió. kr. skulu fram til 2027 brúkast á orkuøkinum, um hesi mál skulu røkkast.

Umsitingin hevur gjørt uppskot til eina ætlan fyri 2022, fyri hvørt av teimum trimum orkumálum, sum skal tryggja, at ferð kemur á grøna orkuskiftið í kommunala geiranum. Harumframt verður uppskot lagt fram um, hvussu umsitingin kann skipa seg í arbeiðsbólk og arbeiða víðari við mannagongdum og ársfrágreiðingum fram til 2027.

Útgangsstøði er tikið í eini samlaðari játtan á 8. mió. kr. til orkuátøk í 2022. Tað letur seg ikki gera at røkka orkumálunum við umrøddu játtanini, men kann hon vera fyrsta stig til at raðfesta orkuøkið hægri komandi árini.

*ORKUMÁL 1 – GRØN UPPHITING: ALLAR OLJUFÝRINGAR HJÁ TÓRSHAVNAR KOMMUNU ERU BURTUR Í 2027*
Upphiting og streymnýtsla í bygningum umboða meira enn helmingin av samlaða $CO_2$-útlátinum av virkseminum hjá Tórshavnar kommunu.

Sambært orkupolitikkinum skulu á leið 17 oljufýringar hjá TK skiftast til grøna orku á hvørjum ári frá 2021. Í 2021 vóru 8 oljufýringar skiftar út við fjarhita ella hitapumpu, og kommunan setir ikki nýggjar oljufýringar upp.

Fjarhitaskipanin hjá kommununi er undir útbygging. Hon kann nýta orku frá alskyns orkukeldum, og kann hon samvirka við aðrar partar av orkuinfrakervinum t.d. taka ímóti avlopsorku frá vindmegi og aðrari elframleiðslu, sum verður alsamt meiri týðandi í framtíðar grøna orkuinfrakervinum. Fjarhitanetið verður nýtt til at binda orkuframleiðslu og nýtsluna saman í kommununi og at gagnnýta orku, sum annars fer til spillis. Tí mælir umsitingin til at raðfesta íbinding í fjarhitanetið í 2022.

Eisini eru størri verkætlanir, ið umsitingin metir eiga at verða raðfestar komandi árini.

**Umsitingin ætlar at brúka 3,9 mió. kr. til at knýta 7 almennar bygningar í fjarhitaskipanina umframt 1,5 mió. til eitt orkuátak sambært fylgiskjali 1.**

*ORKUMÁL 2 – LED GØTULJÓS: ØLL GØTULJÓS SKULU VERA SKIFT TIL LED Í 2027*
Gøtuljós umboða áleið 8% av samlaða $CO_2$-útlátinum hjá kommununi. Um gøtuljós nýta LED-ljós, minkar hesin parturin av el-nýtsluni á leið ein triðing, umframt at útreiðslan av hesari íløguni av tí sama verður spard aftur eftir fáum árum.

Sambært orkupolitikkinum skulu á leið 1.100 gøtuljós skiftast til LED hvørt ár. Tórshavnar kommuna eigur uml. 9.000 gøtuljós, av hesum eru áleið 2.600 skift til LED.

Higartil eru 710 gøtuljós skift í 2021.

**Umsitingin ætlar at brúka 1,6 mió. kr. til at skifta 570 gøtuljós til LED í 2022 sambært fylgiskjali 1, umframt at skifta gøtuljós fyri ta íløguupphædd frá 2021, sum ikki verður brúkt í ár, væntandi á leið kr. 500.000,-.**

*ORKUMÁL 3 - EL-AKFØR: ALLIR PERSÓN- OG VØRUBILAR HJÁ TK VERA ELRIKNIR Í 2027*
Bilar og maskinur umboða 11% av samlaða $CO_2$-útlátinum hjá Tórshavnar kommunu. Sambært orkupolitikkinum skulu á leið 15 bilar skiftast til el hvørt ár frá 2021.

Í 2020 vóru 9 elbilar í kommununi. Í dag eru 13. Harafturat eru 2 elbilar skiftir út við nýggjar elbilar. Uml. 22 bilar skulu eftir ætlan skiftast í 2022. Aloftast stendst ein eykaútreiðsla av at skifta til el-bil heldur enn til ein bil riknan við steinolju, m.a. til løðistøðir o.a.

**Umsitingin ætlar at brúka 1 mió. til eykaútreiðslur av at skifta 10 akfør til el í 2022 sambært fylgiskjal 1.**

*Ætlan 2022-2027*
At gera mannagongdir, útlátsrokningar- og framskrivingar krevur nógva tíð og orku. Um kommunan verður betri til at skapa virði burturúr dáta um orkunýtslu- og framleiðslu kunnu vit seta í verk loysnir, sum tryggja at arbeiðið ber á mál.

Tórshavnar kommuna arbeiðir við at skráseta orkudáta í Energykey, sum er ein skipan til at samla dáta og hava eftirlit við orkuøkinum í kommununi. Tá skipanin er klár, kann hon m.a. brúkast til at gera

støðulýsingar og ætlanir fyri, hvussu kommunan fær sum mest burturúr sínum orkuíløgum, og geva innlit í, hvar tað er mest átroðkandi at minka um $CO_2$-útlátið og orkunýtsluna.

**Umsitingin ætlar at raðfesta at fáa Energykey klárt í fyrru helvt av 2022, so skipanin kann brúkast til at gera eina støðulýsing umframt eina ætlan fyri 2023-2027.**

Áðrenn Energykey verður klárt, verður neyðugt at dagføra útlátstølini fyri 2019, 2020 og 2021. Harumframt krevst eyka arbeiði at fáa øll dátu skrásett í Energykey, soleiðis at skipanin fevnir um alt orkuøkið og ikki, sum støðan er nú, bert bygningar. Umsitingin hevur í hesum sambandi umrøtt, at neyðugt er við meiri arbeiðsorku. Tískil ynskir arbeiðsbólkurin, at eitt fólk verður sett í eitt verkætlanarsett starv til útiloðkandi at arbeiða við at dagføra útlátstølini og skráseta í Energykey.

Fyri at koma á mál við orkupolitikkinum er eisini neyðugt at menna samstarvið millum deildirnar. Fyrst og fremst eru tað bygningsdeildin, verkstaðið, vatn- og gøtuljósdeildin og umhvørvisdeildin sum eru beinleiðis knýtt at teimum 3 orkumálunum umvegis dagliga virksemið. Neyðugt verður at møtast regluliga fyri at fylgja støðuni, umframt at gera ætlan fyri 2023-2027.

Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini leggja hervið uppskot fram um ætlanina fyri tey trý orkumálini í 2022:
- 3,9 mió. til at knýta 7 bygningar í fjarhitaskipanina
- 1,5 mió. til orkuátak
- 1,6. mió. til at skifta 570 gøtuljós til LED
- 1 mió. til at skifta 10 akfør til el

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til, at umsitingin arbeiðir víðari við omanfyri nevndu ætlan m.a. at fáa Energykey klárt í fyrru helvt av 2022, so skipanin kann brúkast til at gera eina støðulýsing og ætlan fyri 2023-2027.

Mælt verður til at nýta kr. 200.000 av konto nr. 6610 hjá umhvørvisdeildini frá játtanini fyri 2021 til verkætlanarsett starv í uml. 4 mánaðir til at arbeiða við skráseting í Energykey og at dagføra útlátstølini.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 30. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum umframt at nýta aðrar kr. 100.000 til samskifti. Eisini verður heitt á umsitingina um at arbeiða víðari við orkuskifti í bygningum og koma aftur í nevnd við nýggjum tilmæli.

**Ískoyti:**
Elsa Berg biður um at fáa málið at skrá til komandi býráðsfund.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Fyrst varð atkvøtt um uppskotið frá Bjørg Dam um at beina málið í náttúru- og umhvøvisnendina, ið varð samtykt við 9 atkvøðum, 4 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Birita Baldvinsdóttir Iversen, Bjørg Dam,Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle og Annika Olsen.

**Ískoyti:**
Fjarhitaskipanin hjá kommununi er undir útbygging, og politiskt ynski er at binda fleiri kommunalar bygningar í hesa skipan. Bygningarnir í uppskoti til íbinding í 2022 eru hesir:
- Eldrasambýlið oman Hoydalar
- Tilhaldið í Tórsgøtu
- Fimi-HB-B36
- Tannlæknastovan

- Móttøkuhúsið (Listasavnið)
- Liðahúsini
- Gundadalshøllin
- Brúni skúli

Viðmerkjast skal, at Gundadalshøllin verður ikki íbundin, fyrr enn avgerð er tikin, um høllin skal umbyggjast, útbyggjast ella byggjast av nýggjum. Tryggjað verður, at klárt er at binda í høvuðsleiðina hjá fjarhitanetinum, tá avgerð er tikin hesum viðvíkjandi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Umhvørvisdeildini mæla til, at fyrisitingin fær heimild til:

At flyta 1 mió. av stovnsnummar 6177, Orkuátøk, LK61705, Orkupolitikkur, til nýggja verkætlan "Fjarhitaskipan til kommunalar bygningar" undir stovnsnummar 6177 til at gera prosjekt, kostnaðar- og tíðarmeting til útboð av at íbinda nevndu bygningar í fjarhitanetið, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 08. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini við tí ískoyti, at heimild eisini verður givin til at seta arbeiðið í gongd at binda hvønn bygning sær í fjarhitanetið. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í mars 2022 vórðu 1 mió. kr fluttar av konto 6177, LK61705, Orkupolitikkur, til verkætlanina L61707, «Fjarhitaskipan til kommunalar bygningar» undir stovnsnummari 6177 til at prosjektera, fyrireika og fara undir arbeiðið. Bygningarnir, har arbeiðið við at innleggja nýggja hitaskipan er boðið út, eru fylgjandi:

- Eldrasambýlið oman Hoydalar
- Tilhaldið í Tórsgøtu
- Tannlæknastovan
- Móttøkuhúsið (Listasavnið)
- Brúni skúli (Fríðriksgarður)
- Guli skúli (Ytri skúli)
- Liðahúsini
- Gundadalshøllin

Arbeiðið varð boðið út umvegis útboðsportalin hjá Tórshavnar kommunu, og bjóðaðu í minsta lagi tvey feløg upp á arbeiðið við hvønn av bygningunum. Tikið er av tilboðunum frá fylgjandi feløgum: HVS Tænastan, Bjørnin, Orkuloysnir, Maria Poulsen.

Tíðarætlanin fyri arbeiðið er gjørd í samráð við Fjarhitafelagið. Grevstrararbeiðið og tað at taka upp og burturbeina oljutangar verður boðið út í næstum. Eftir ætlan verður farið undir arbeiðið, so tað er liðugt í 2022. Íroknað kostnað til at gera útbjóðingartilfar, sjálvt arbeiðið við grevstri, at leggja fjarhita inn, taka burtur oljutangar, og íbindingargjald verður samlaði kostnaðurin 4,5 mió. kr. Sostatt resta tað 3,5 mió. kr í fyri at útinna arbeiðið sambært innkomnu tilboðunum.

Eisini tíðarætlanin fyri arbeiðið við at binda skúlan á Argjahamri í fjarhitanetið verður gjørd í samráð við Fjarhitafelagið. Tað arbeiðið verður væntandi boðið út í næstum, soleiðis at neyðuga tilfarið kann fáast til vega, áðrenn farast skal undir arbeiðið.

Verandi árliga oljunýtslan í omanfyri nevndu bygningum, íroknað skúlan á Argjahamri, er knappar 1.195.000 litrar. Tá $CO_2$-útleiðingin av fjarhita og elframleiðslu verður drigin frá, er útroknaða árliga

minkingin av útleiddum $CO_2$ av íløguni 284.528 kg $CO_2$ og 0,065 kg/ $CO_2$ pr. kr. pr. ár. Við verandi fjarhitakostnaði er væntandi, at útreiðslurnar til upphiting minka við o.u. kr. 190.000.

Á karminum fyri konto 6177, orkupolitikkur, eru fyri 2022 játtaðar kr. 8.000.000. Av hesum eru kr. 1.000.000 játtaðar til at fyrireika og at leggja fjarhita inn í kommunalar bygningar. Til sama endamál er tørvur á kr. 3.500.000 afturat í 2022. Verða kr. 1.500.000 játtaðar til hitaætlan fyri Tórshavnar kommunu og kr. 1.000.000 til verkætlan um heita vatnið á Lygnnesi í Kollafirði, verða sostatt kr. 1.000.000 eftir til onnur orkuátøk í 2022.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin fyri Umhvørvisdeildina og leiðarin fyri Bygningsdeildina mæla til at:
- játtaðar verða kr. 3.500.000 av konto 6177, LK61705, Orkupolitikkur, til verkætlanina L61707, "Fjarhitaskipan til kommunalar bygningar" undir stovns-nummari 6177, til at gera arbeiðið liðugt við at binda áður nevndu kommunalu bygningar í fjarhitanetið,
- at beina málið í Býráðið umvegis Fíggjarnevndina

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 16. august 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at umsitingin ger og eftirsendir nevndini tíðarætlan.

Fíggjarnevndin 24. august 2022: Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið. Nevndin viðmerkir, at tíðarætlan fyri hvønn bygning sær skal fyriliggja, áðrenn arbeiðið verður sett í verk.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á karminum fyri konto 6177, Orkupolitikkur, eru fyri 2023 játtaðar kr. 8.000.000. Av hesum verður skotið upp at flyta kr. 3,5 mió. av konto 6177, LK61705, Orkupolitikkur, til verkætlanina L61707, «Fjarhitaskipan til kommunalar bygningar» undir stovnsnummari 6177 til at prosjektera, fyrireika og útinna arbeiðstøkur fyri 2023.

Arbeitt verður við at leggja nýggja hitaskipan í niðanfyristandandi bygningar:

- Ellisheimið
- Barakk við Ellisheimið
- Umlættingarheimið
- Dagstovnurin Løkjatún

Tíðarætlan fyri arbeiðið við at binda kommunalar bygningar í fjarhitanetið er treytað av gongdini við at útbyggja fjarhitanetið og verður tí gjørd í neyvt samráð við Fjarhitafelagið. Hetta merkir, at arbeitt verður eftir at binda kommunalar bygningar í fjarhitanetið so hvørt fjarhitanetið kemur verður ført fram við og er ført fyri at veita fjarhita við hvønn bygning. Møguliga kemur onkur bygningur/onkrir bygningar afturat, um útbyggingin av fjarhitanetinum í 2023 loyvir tí.

Íroknað kostnaðin er útbjóðing, arbeiðstekningar, graviarbeiði, brekking, at leggja fjarhita inn, taka burtur oljutangar og íbindingargjald.

Arbeiðið við at taka upp og burturbeina oljutangar verður gjørt eftirfylgjandi. Eftir verandi ætlan verður farið undir arbeiðið skjótast gjørligt, so tað er liðugt í 2023. Kostnaðurin av hesum er mettur til at verða kr. 3,5 mió.

Verandi árliga oljunýtslan í omanfyri nevndu bygningum er knappar 35.000 litrar. Tá $CO_2$-útleiðingin av fjarhita og el-framleiðslu verður drigin frá, er útroknaða árliga minkingin av útleiddum $CO_2$ av íløguni 8.000 kg $CO_2$. Við verandi fjarhitakostnaði er væntandi, at útreiðslurnar til upphiting minka.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☐

Eyka játtan ☐

Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur | | L61707 | Fjarhitaskipan til kommunalar bygningar | | 3.500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 3.500.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | Ókend |

## Tilmæli:
Tekniski stjórin, leiðarin fyri Umhvørvisdeildina og leiðarin fyri Bygningsdeildina mæla til:
- at játtaðar verða kr. 3.500.000 av konto 6177, LK61705, Orkupolitikkur, til verkætlan L61707, "Fjarhitaskipan til kommunalar bygningar" undir stovns-nummari 6177, til at gera arbeiðið liðugt við at binda áður nevndu kommunalu bygningar í fjarhitanetið, og
- at beina málið í Býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 07. mars 2023:** Útsett til næsta fund.

## Ískoyti:
Umhvørvisdeildin er biðin um fleiri upplýsingar og status fyri arbeiðini, sum vórðu ætlað í 2022. Víst verður til viðløgdu skjøl.

Í stuttum kann upplýsast, at í 2022 vórðu játtaðar kr. 4,5 mió. til at binda kommunalar bygningar í fjarhitanetið. Tilboð eru fingin upp á arbeiðini.

Arbeiðið við at taka verandi hitaskipan úr bygningunum og gera arbeiðini liðug má gerast, tá fjarnitanetið er útbygt soleiðis, at tað er í nánd av bygningunum og er klárt til at kunna veita hita til teirra. Av hesi orsøk eydnaðist í 2022 bert at nýta kr. 1.711.760 av játtaða peninginum fyri 2022. Til 28.03.2023 vóru av játtanini frá 2022 harumframt brúktar kr. 217.800. Írestandi arbeiðini verða framd, so hvørt fjarhitanetið kemur fram til og kann veita hita til bygningarnar.

Hinvegin er fjarhitanetið longu nærhendis teimum bygningunum, sum mælt verður til at nýta játtan fyri 2023 at umleggja og binda í, soleiðis at tað til hesar bygningar ikki er neyðugt at bíða, men at arbeiðið kann fara í gongd sum skjótast.

Um býráðið ynskir at íbinda allar teir kommunalu bygningar í fjarhitanetið, sum liggja á leiðini ella nærhendis fjarhitanetinum, mælir fyrisitingin til, at omanfyri nevndu bygningar verða íbundnir, hóast útroknaða afturgjaldstíðin er lutfalsliga long.

Aðrar verkætlanir, sum møguliga kundu verið fíggjaðar í 2023, eru av ymiskum orsøkum ikki enn á einum búningarstigi, har kostnaðurin er kendur, ella har til ber at seta tær í gongd.

Tekniska fyrisiting er biðin um at arbeiða við, hvussu Eysturskúlin og nærhendis bygningar kunnu verða umlagdir til fjarhita ella grøna orku.

Fyrisitingin hevur fyribils kannað, um møgulig útbygging av sjóhitaskipanini við Strond til at nøkta orkutørvin hjá røktarheiminum Láargarður og býlinginum Tórsbyrgi skynsamt kundi fevnt um Eysturskúlan, Tjarnargarð og møguligar aðrar kommunalar bygningnar í Eysturbýnum. Ein stutt kanning av hesum bendir á, at aðrar loysnir tekniskt, fíggjarliga og frá einum heildarsjónarhorni høvdu verið meiri skynsamar.

**Tilmæli:**
Víst verður til tilmælið omanfyri.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 11. apríl 2023:** Ein meiriluti, Bjørg Dam, Annfinn Brekkstein og Súna Mørk, taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Gunvør Balle og Elsa Berg, mælir til, at til næsta fund kemur umsitingin við einum status av Eysturskúlanum, herundir umvælingartørv og møguligar grønar orkuloysnir.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 27. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við at fjarhiti verður lagdur til Ellisheimið, Dagstovnin við Løkjatún og Dansifrøi og játta kr. 2 mió. til endamálið.

Eisini samtykt at biðja umsitingina koma við uppskoti um, hvørjir aðrir stovnar kunnu leggja um til alternativa orku og at biðja umsitingina koma við yvirliti yvir $Co^2$ útláti og fíggjarligar avleiðingar síðani umleggingarnar.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur kannað, hvørjar møguligar loysnir eru til umlegging av Eysturskúlanum til grøna orku v.m. Víst verður til jnr. 17/03154-36 Upprit um Eysturskúlan – orkuátøk og umvælingar. Niðurstøðan av kanningini er á blaðsíðu 2 í908 uppritinum.

**Skjøl**
Jnr. 17/03154-36 Eysturskúlin – orkuátøk og umvælingar

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 20. juni 2023:** Nevndin tekur undir við loysnunum, og heimilar umsitingini at bjóða arbeiðið út, og síðani leggja málið aftur fyri nevnd.

**Ískoyti:**

<u>Verkætlanin «Orkuátøk og umvælingar í Eysturskúlanum»</u>
Vísandi til samtykt á fundinum hin 20 juni 2023 um Eysturskúlan, verður skotið upp, at flyta kr. 1,5 mió. av karminum “LK61705”, til verkætlan nevnd “Orkuátøk og umvælingar í Eysturskúlanum” og at heimila umsitingini at fyrireika og bjóða út arbeiðstøkur viðvíkjandi fylgjandi átøkum, sum eru lýst í frágreiðingini frá RAM Sp/f *(jnr. 17/03154-36 Upprit - um Eysturskúlan - orkuátøk og umvælingar)*:

- Durar/hurðar

- Stýringar
- Luft til Luft

og gera arbeiðstøkusáttmálar innan omanfyrinevnda fíggjarkarm.

Mett verður, at oljunýtslan í Eysturskúlanum lækkar uml. 30-40 % við hesum átøkum. Og metta árliga sparingin verður uml. kr 130.000,-

Hetta er samstundis fyrsta stigið í samlaðu ætlanini, at Eysturskúlin í framtíðini einans brúkar grønar orkukeldur. Úrslitið av átøkunum kemur at hava ávirkan á næsta stig. Komið verður aftur í nevndina, áðrenn næsta stig skal setast í verk.

<u>Verkætlanin «Orkuátøk og umvælingar á Lágargarði«</u>
Skotið verður upp, at flyta kr. 50.000 av karminum "LK61705", til verkætlanina nevnd; "Orkuátøk og umvælingar á Lágargarði" til fyrireikingar, eftir sama leisti, sum gjørt var í Eysturskúlanum. Umsitingin kemur aftur í nevndina við niðurstøðum og tilmæli um fíggjarkarm.

<u>Verkætlanin «LED ljós í ítróttarhøllum«</u>
Leiðarin á Ítróttaanlegg hevur fingið eina greining av ljósviðurskiftunum í ítróttarhøllum, frá donsku ráðgevingarfyritøkuni LUMA lysteknik. Sí skjal *(jnr. 17/03154-38 Revideret energirapport)*.

Greiningin er um fylgjandi hallir:

- Høllini á Hálsi, (eisini judo og borðtennishøllini í kjallaranum)
- Badmintonhøllin
- Gundadalshøllin
- Hoyvíkshøllin
- Høllin í Kollafirði

Frágreiðingin er gjørd á tann hátt, at hon lýsir, hvussu ljósviðurskiftini eru í omanfyri nevndu høllum, og hvørji krøv eru til ljósviðurskiftini til ymisku ítróttagreinarnar.

Ítróttaanlegg hevur biðið um hesa frágreiðing, tí ynskt verður at fáa lýst hesi viðurskiftir nærri:

- Hvat kostar at skifta ljósini í oman fyri nevndu høllum til LED-útgerð ( led-armatur)?
- Hvussu leingi tekur tað, áðrenn íløgan er spard inn aftur?
- Hvussu stór er sparingin í kwh?
- Hvussu nógv er sparingin í kr.?

Frágreiðingin vísir, at metta samlaða íløgan fyri at skifta til LED-útgerð í omanfyri nevndu høllum, er góðar kr. 3,0 mió. Við dagsins kwh-prísi er metta árliga sparingin áleið kr. ½ mió. og tað tekur góð 5 ár at spara íløguna inn aftur. Harafturat kemur ein stór sparing í $CO_2$ útláti.

Skotið verður upp at flyta kr. 3,5 mió. av karminum LK61705, til verkætlanina «LED ljós í ítróttarhøllum« og heimila umsitingini at fyrireika, prosjektera, bjóða arbeiðstøkur út, og fyrireika arbeiðstøkusáttmálar innan hendan fíggjarkarm.

**Skjøl**
17/03154-36 Upprit - um Eysturskúlan - orkuátøk og umvælingar
17/03154-38 Revideret energirapport

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | Býráðsfundur<br>24. april 2024 | Blað nr.: 434<br>Formansins merki: |
|---|---|---|

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Løgukarmi | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur | 6177 | | | Orkuátøk og umvælingar í Eysturskúlanum | 1.500.000 |
| 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur | 6177 | | | Orkuátøk og umvælingar á Lágargarði | 50.000 |
| 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur | 6177 | | | LED-ljós í ítróttarhøllum | 3.500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | Tilsamans 5.050.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 715.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Bygningsdeildini mæla til:

- at flyta kr. 1,5 mió. av konto 6177, LK61705, Orkupolitikkur, til verkætlanina «Orkuátøk og umvælingar í Eysturskúlanum»
- at flyta kr. 50.000 av konto 6177, LK61705, Orkupolitikkur, til verkætlanina «Orkuátøk og umvælingar á Lágargarði«

Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin, leiðarin á Bygningsdeildini og mentamálaleiðarin mæla til:
at flyta kr. 3,5 mió. av konto 6177, LK61705, Orkupolitikkur, til verkætlanina «LED ljós í ítróttarhøllum«

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 10. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælunum.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur kannað, hvørjar møguligar loysnir eru til umlegging av Lágagarði til grøna orku v.m. Víst verður til jnr. 17/03154-42 Upprit um Lágagarð – orkuátøk og umvælingar. Niðurstøðan av kanningini er á blaðsíðu 2 í uppritinum.

**Skjøl**
Jnr. 17/03154-42 Lágagarður – orkuátøk og umvælingar

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 09. januar 2024:** Kunnað varð um málið.

| | **Býráðsfundur**<br>24. april 2024 | Blað nr.: 435<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

**Ískoyti:**
Víst verður til kunning á seinasta fundi og tilhoyrandi upprit um Lágargarð – orkuátøk og umvælingar (jnr. 17/03154-42).

Lágargarður treingir til umfatandi umvælingar. Ein partur er at dagføra tær sjey ventilatiónsskipanirnar, so hesar gerast meira orkusparandi.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | | **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur | 6177 | | | Orkuátøk og umvælingar á Lágargarði | 2.000.000 |
| | | | | | | | |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðaræætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Bygningsdeildini mæla til at flyta kr. 2.000.000 av konto 6177 Umsiting og røkt av bygningum, løgukarmi Orkuátøk, LK61705, Orkupolitikkur, til verkætlanina L61712 Orkuátøk og umvælingar á Lágargarði, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 22. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

# 100/24 Parkeringstunnil

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 06.02.2023 | 4/23 | 23/00658-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 13.03.2023 | 14/23 | 23/00658-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 08.04.2024 | 34/24 | 23/00658-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 23.04.2024 | 120/24 | 23/00658-1 |
| 5 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 100/24 | 23/00658-1 |

**Upprunin til málið**
Fleiri mál hava umrøtt møguleikarnar fyri at betra parkeringsviðurskiftini í Tórshavn. Tey hava í ymiskan mun viðgjørt parkeringstunnil sum møguleika fyri loysn. Millum hesi mál eru málnr. 19/01708 "Kanningar í samband við møguligan parkeringstunnil í Havn" og málnr. 21/01260 "Uppskot til loysn á stóru parkeringstrupulleikunum í miðbýnum í Havn". Ásannandi, at til tess at seta hol á ítøkilig tiltøk á leiðini til at røkka munagóðum betringum av parkeringsviðurskiftunum í Tórshavn, er neyðugt við málrættaðari politiskari viðgerð. Tí er borið fram politiskt ynski um, at kjarnin í áðurnevndu málum verður miðsavnaður í eitt nýtt mál, sum hevur sum aðalmál, at parkeringstunnil verður gjørdur í Havn, og at tryggja, at verklagsligu, fíggjarligu og lógartengdu viðurskiftini verða nøktandi viðgjørd og førd á mál.

**Lýsing av málinum**
Stórur tørvur er á parkeringsplássum í Havn, og fleiri loysnir hava verið umrøddar. Greitt er, at verandi tøkt lendi illa kann rúma parkeringstørvinum við at nýta vanligar hættir at skipa parkeringsøkini. Neyðugt er, at skipa parkeringina í fleiri hæddum í parkeringshús, undir jørð, ella bæði. Samstundis er greitt, at tað er tørvur á at knýta býin saman við høgligum leiðum fyri gangandi.

Hetta setir krøv til at ferðslan í býnum eisini má umskipast, so sleppast kann undan pørtum av ferðsluni í miðbýnum, sum er vegna akfør, sum leita eftir tøkum parkeringsplássum. Á tann hátt kann verandi infrakervi avlastast og aftur koma á eina nýtslu, sum betri svarar til tað, sum kervið er bygt og egnað til.

Ein parkeringstunnil, ið knýtir eystara og vestara partin av býnum saman tvørtur um miðjuna kann hava júst henda virknað.

Miðbýarætlanin "Urtagarðsbýurin" í málnr. 22/03571 viðger møguleikar fyri parkeringskjallarum og/ella -húsum. Í hesi ætlan verður víst til, at inn- og útkoyringar verða til verandi vegir. Ætlandi kundi ein parkeringstunnil eisini blivið ein til- og frákoyringarleið frá hesum og øðrum parkeringskjallarum og -húsum, so ferðslan í miðbýnum ikki økist oman á jørð.

Undanfarin mál og tilhoyrandi kanningar hava víst, at hetta málið kann býtast upp í tríggjar høvuðspartar:
1. Verklagið
2. Fígging
3. Verandi møguleikar fyri gjaldsparkering

Neyðugt er, at verklagið verður staðsett í skipanaruppskoti, har atlit verða tikin til møguligar inn- og útkoyringar, ávirkan á bygningar og infrakervi omanfyri, verandi installatiónir so sum jarðhitaborðingar, og at tryggjað verður, at verkætlanin er byggibar. Tí skal skipanaruppskotið fyri verklagið eisini innihalda kostnaðarmeting, sum skal liggja til grund fyri viðgerð av, hvussu verklagið skal fíggjast.

Verklagið kann gerast sum kommunal loysn, sum privat loysn, ella sum samstarv millum privatar partar og kommununa. Í undanfarnum málum hevur tað víst seg, at um tað skal verða talan um privata luttøku í

verkætlanini, so er neyðugt, at parkeringsgjald verður álagt teimum, sum brúka parkeringsmøguleikarnar í tunlinum og á almennu parkeringsøkjunum uttan fyri munnarnar og møguligar inn- og útgongdir til tunnilin. Í løtuni er heimild ikki til at krevja parkeringsgjald á almennu økjunum, uttan so, at hesi eru í avbyrgdum øki. Tí má tað eisini verða arbeitt fyri, at hesar heimildir koma.

Í løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988 um ferðslu, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022 er ásett, at sektin fyri brot á parkeringsreglur er ásett til kr. 200. Í veruleikanum vil hetta siga, at hetta gjald í verandi støðu er mesta gjald, sum parkeringin kann hava. Hetta lógarásetta gjald má møguliga eisini broytast, um fíggjarligt grundarlag skal vera fyri einum parkeringstunli.

Í løtuni standa játtaðar kr. 994.000,- á løgukonto L81035 "Kanningar ísv møguligan parkeringstunnil", og á deild 8175 Vegir o.a. (íløgur) eru á løgukarminum LK81043 "Parkeringstunnil" játtaðar kr. 3.000.000 fyri 2023. Av tí at kostnaðirnir fyri prosjektering og forkanningar eru ógvuliga truplir at meta um, áðrenn arbeiðssetningurin undir prosjekteingsarbeiðinum er nærri greinaður saman við royndum ráðgevum innan økið, verður mett, at tað er høgligast, at heimild verður givin at arbeiða og gera sáttmálar um prosjektering og forkanningar innan hesa samlaðu upphædd sum karm fyri arbeiðinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988 um ferðslu, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31. frá 17. mars 2022.

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
19/01708 "Kanningar í samband við møguligan parkeringstunnil í Havn"
21/01260 "Uppskot til loysn á stóru parkeringstrupulleikunum í miðbýnum í Havn"
22/03571 "Miðbýarkjarnan"

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | L81035 | Kanningar ísv møguliga | 8175 | LK81043 | Parkeringstunnil | | Kr. 994.000,- |

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | parkeringstun nil | | | | | | |
| 8175 | LK81043 | Parkeringstun nil | 8175 | | Parkeringstun nil | ja | | Kr. 3.994.000,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 3.994.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 2024 |

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til, at mál nr. 19/01708 verður lokað, og játtaður tøkur peningur á løgukonto L81035, Kanningar ísv møguligan parkeringstunnil, (kr. 994.000,-) verður afturfluttur á løgukarmin LK81043, Parkeringstunnil. Harumframt verður mælt til, at arbeiðssetningurin frá sama máli verður fluttur til nærverandi mál, soleiðis at mælt verður til:

- at fyrireikingar verða gjørdar innanhýsis soleiðis:
  1. at heimild verður givin til, at sáttmáli verður gjørdur við ráðgeva at gera eitt skitsuprosjekt íroknað kostnaðarmeting av samlaða verklagnum,
  2. at heimild verður givin til at gera sáttmálar um neyðugar jarðfrøðiligar forkanningar við støði í arbeiðinum at gera skitsuprosjekt,
  3. at umsitingin orðar broytingar til Løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988 um ferðslu, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31. frá 17. mars 2022, sum geva kommunalum myndugleikum heimild at seta í verk gjaldsparkering á almennum parkeingsøkjum, og samráðast við avvarandi landsmyndugleikar um at fáa sett í gildi og framt hesar broytingar.
  4. at heita á Føroya Løgting um at broyta sektina fyri brot á parkeringásetingar í ferðslulógini til at vera samsvarandi við sektina í Danmark (p.t. kr. 795)
  5. at játta kr. 3.994.000 av løgukarmi LK81043 Parkeringstunnil undir deild 8175 Vegir o.a. (íløgur) á nýggja løgukonto “Parkeringstunnil”, sum fíggjarliga rammu til arbeiðið lýst omanfyri,
  6. at nevndin verður kunnað nærri um kostnaðir, sum eru tengdir at hesum arbeiðinum tá fyrireikandi arbeiðið er gjørt, og
  7. at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina, og til kunningar í byggi- og býarskipanarnevndini.

**Tekniska nevnd 06. februar 2023:** Samtykt at fáa eitt uppskot til linjuføring yvir ætlaða nýggja parkeringstunnilin til komandi fund í teknisku nevnd.

**Ískoyti**

Framleidd er tekning yvir uppskot til linjuføring av tunlinum, sí skjal J.nr 23/00658-3 Parkeringstunnil_0-1. Í hesum uppskotinum er arbeitt út frá hesum høvuðstreytum:

- Tunnilin hevur eitt minsta loft á 6 m.
- Skaktir kunnu verða niður til tunnilin ymisk hóskandi støð í býnum.
- Tunnilin kann eisini nýtast sum farleið tvørtur um miðbýin.

Tað er tó framhaldandi stórur tørvur á serkønari prosjektering av tunlinum fyri at fáa lýst, hvussu farast kann víðari fram.

**Skjøl**

J.nr 23/00658-3 Parkeringstunnil_0-1

**Tilmæli**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at nevndin umrøður linjuføringina og annars tekur støðu til tilmæli, ið var til fundin tann 6. februar 2023.

**Tekniska nevnd 13. mars 2023:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**
Politiskt ynski er um at fáa til vega uppskot til prosjekt og kostnaðarmeting av at gera ein parkeringstunnil millum parkeringsøkið á Skálatrøð og Jóannesar Paturssonar gøtu, undir parkeringsøkinum undir Mortanstovubrekku.

Í tekningunum (j.nr. 23/00658-5 Parkeringstunnil_3-2) er prinsipiell linjuføring víst. Her er roknað við einum tunli, sum er uml 17 m breiður. Slíkur tunnil hevur rúm fyri einvegis ferðslu, skráparkering á báðum síðum og eini gongubreyt á 2 m. Henda linjuføringin gevur onga samanrenning við jarðhitaborðingar.
Mett verður, at slíkur einsrættaður tunnil í fyrstu atløgu kann, umframt at virka sum parkeringsøki, eisini leiða ferðsluna oman á Skálatrøð, uttan um tær trongu gøturnar: Dr, Jakobsensgøta, Bøgøta, Tórsgøta og Grím Kambans gøta. Tað skal tó havast í huga, at ferðslan av Skálatrøð við hesum fer at gerast størri. Í fyrstu atløgu fer hetta at tyngja gøturnar í miðbýnum, men møguleiki er fyri at gera fleiri dekk oman á Skálatrøð, har eitt av ovaru dekkunum kann hava beinleiðis og tvívegis íbinding í niðasta part av Landavegnum.

Við støði í lýsingini omanfyri av verkætlanini vil umsitingin orða neyvari byggiskrá fyri arbeiðið.

Av tí at arbeiðið at gera slíkan tunnil er merkt av stórum vágum og óvissum, júst tí at munnarmir eru í økjum, sum longu verða brúkt, og tí at lítið loft er væntandi, verður tað mett mest skynsamt fyri Tórshavnar kommunu, sum byggiharrra at tryggja ein fastan prís, at verkætlanin verður boðin út sum heildararbeiðstøka.

Mett verður, at tað er eitt rættiliga stórt arbeiði knýtt, at tí at gera tilfarið til heildararbeiðstøkuna. Tí kann luttøka frá fleiri møguligum veitarum best tryggjast við at samsýning verður latin fyri tey innkomnu boðini, sum lúka ávís krøv fyri góðsku. Ynski er um at fáa tríggjar arbeiðstakarar at geva tilboð. Mett verður, at kr. 150.000 er hóskandi samsýning til hvønn av teimum bjóðandi fyri at lata gera tilfar í sambandi við tilboð uppá hesa heildararbeiðstøkuna. Tilsamans er sostatt ein upphædd á kr. 450.000.

Í verandi stund eru kr. 994.000 óbrúktar á løgukonto L81035 Kanningar í samband við parkeringstunnil í Havn undir konto 8175 Vegir (Íløgur). Mett verður, at endamálið fyri hesi játtan (í máli 19/01708 Kanningar í samband við møguligan parkeringstunnil í Havn) umfatar at rinda fyri omanfyri nevndu samsýningar.

**Nýggj skjøl**
23/00658-5 Parkeringstunnil_3-2

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at umsitingini verðu heimilað at:
- Gera byggiskrá fyri parkeringstunnilin.
- Bjóða út í heildararbeiðstøku móti samsýning á kr. 150.000 fyri hvørt boð.
  Kostnaðir av hesum verða fíggjaðir av løgukonto L81035 Kanningar í samband við møguligan parkeringstunnil.

**Tekniska nevnd 08. apríl 2024:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Jákup Dam, Súsanna Olsen, tekur undir við tilmælinum.

Bjørg Dam atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 23. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

## 101/24 Nýkeyp av kontu 8375 í 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.04.2024 | 119/24 | 24/01740-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 101/24 | 24/01740-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært punkt 6 í játtanarreglunum hjá Tórshavnar Kommunu viðvíkjandi konto 8375 Rakstrargøgn (íløgur), skal stjórnin leggja fram uppskot um útskifting og nýkeyp komandi fíggjarár fyri fíggjarnevndina til góðkenningar.

Hetta uppskotið snýr seg um útskifting og nýkeyp í fíggjarárinum 2024.

**Lýsing av málinum**
Í fíggjarætlanini 2024 hevur Tórshavnar Býráð játtað 3 mió. kr. til konto 8375 Rakstargøgn (íløgur).

Verkstaðið hjá kommununi hevur mett, hvat er mest átrokandi, og hvat kann fáast fyri játtanina á 3 mió. kr.

Niðurstøðan er, at Brennistøðin hevur bráðfeingis tørv á maskinum og amboðum á plássinum við Brennistøðina á Hjalla. Stóri Sennebogen kranin á Brennistøðini er gamal, útslitin og koyrir ikki í løtuni. Tað fer helst at kosta omanfyri 500 t.kr. at fáa henda kranan at koyra aftur, men tá er framvegis talan um ein gamlan útslitnan krana, sum neyvan fæst í forsvarligan stand aftur, hóast hann verður umvældur fyri meira enn hálvu milliónina.

Ein nýggjur krani av hesum slagnum kostar umleið 4,5 mió. kr., og leveringstíðin er vanliga í minsta lagi 6 mánaðir. Játtanin á 8375 í 2024 røkkur sostatt ikki til ein nýggjan krana.

Verkstaðið hevur tó fingið eitt tilboð frá veitaranum av hesum kranunum uppá ein totalrenoveraðan krana frá 2019. Kranin er sum nýggjur, og tilboðið ljóðar uppá 2,6 mió. kr. umframt levering og mvg. Hesin kranin kann sostatt útvegast fyri tær 3 mió. kr., sum eru avsettar á konto 8375 í ár. Kranin kann leverast beinanvegin.

Verkstaðið mælir tí til at keypa henda kranan fyri játtanina á 8375 í ár.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
-

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á verkstaðnum mæla til at keypa henda totalrenoveraða kranan frá 2019 fyri 2,6 mió. kr., umframt levering og mvg, av játtanina á konto 8375 Rakstrargøgn (íløgur) í ár.

**Fíggjarnevndin 23. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta 3 mió. kr. av konto 8375 Rakstrargøgn (íløgur) og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Tikið av skrá.

# 102/24 Heildarætlan fyri matr. nr. 1235a, 1378, 1233a og b

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.04.2024 | 82/24 | 22/07222-13 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 102/24 | 22/07222-13 |

**Upprunin til málið**
Kommunan hevur móttikið umsókn, dagfest 30.11.2021, um at byggja íbúðir á matriklunum 1233a og 1233b, millum Oyggjarvegin og Ringvegin. Hetta málið (journal nr. 21/05044) varð viðgjørt innanhýsis, og umsitingin mælti frá at gera serstaka byggisamtykt fyri einans hesar báðar matriklarnar, men heldur at gera eina samskipaða byggiætlan/heildarætlan, við grannaognirnar, matr. nr. 1378 og 1235a, soleiðis at økið verður býarskipanarliga samanhangandi.

Hetta málið snýr seg sostatt um at gera eitt uppskot um eina serstaka byggisamtykt fyri samlaða økið, matr. nr. 1235a, 1378, 1233a og 1233b.

**Lýsing av málinum**
Eigarin at matr. nr. 1233a og 1233b hevur nú í fleiri ár roynt at fingið kommununa at gera eina nýggja serstaka byggisamtykt fyri umrøddu matriklar. Kommunan hevur víst hesum aftur, grundað á at kommunan ynskir, at alt tað “óbygda” økið (matr. nr. 1235a, 1378, 1233a og 1233b) eigur at verða skipað í síni heild, og at dámurin so vítt møguligt kemur at hóska til útstykkingina sunnan fyri økið, sum er skipað við sethúsabygging.

Á sumri 2023 vóru eigararnir av øllum matriklunum á fundi við borgarstjóran, formannin í byggi- og býarskipanarnevndini og umsitingina. Á fundunum, sum vórðu hildnir við eigararnar, vísti kommunan á, at kommunan er sinnað at lata gera eina serstaka byggisamtykt fyri økið, sum loyvir íbúðarbygging, tó treytað av at serstaka byggisamtyktin fevnir um allar matriklarnar. Kommunan vísti somuleiðis á, at ynskiligt er, at økið verður skipað í síni heild, og at eigararnir venda aftur til kommununa við eini felags heildarætlan fyri alt økið.

Harumframt varð víst á, at ynskiligt er, at byggingin verður skipað soleiðis, at byggingin tekur útgangsstøði í dáminum í verandi bygging sunnanfyri, soleiðis at skilja, at byggingin sýnist í skapinum og vavinum at verða skipað í eindum. Tó varð mett, at byggingin kundi skipast sum raðhúsabygging í eindum, og at raðhúsini kundu innrættast við íbúðum. Fyri at byggingin ikki skuldi víkja ov nógv frá verandi bygging sunnanfyri, so varð mælt til, at ovara raðið niðan móti Oyggjarvegnum einans kundi byggjast í 3 hæddum, meðan fremra raðið oman móti Ringvegnum í mesta lagi kundi byggjast í 2 hæddum.

Síðani fundirnar í summar hava eigararnir av matr. nr. 1233a, 1233b og 1235a sent eina felags umsókn upp á skipan av økinum til íbúðabygging, (sí skjal 22/07222-10, *Uppskot - Útstykking á matr. nr. 1233a, b og 1235a)*, meðan eigarin av matr. nr. 1378 hevur sent kommununi eina umsókn um sundurbýti til tvíhús og makaskifti (sí skjal 22/07222-5, *Skriv sent Tróndur Sigurðsson, viðv. matr. 1378 og 1233a - Eyðfinnur Reinert.pdf.).* Felags umsóknin frá matr. nr. 1233a, 1233b og 1235a vísir íbúðarbygging á matr. nr. 1235a og 1233a og b, við blindum vegum frá Skotarók og Oyggjarvegnum

Skrivið frá eigaranum av matr. nr. 1378 vísir møguleikan at útstykkja til 6 tvíhús, treytað av einum gerðabýti við kommununa, har kommunala økið oman móti Vestara Ringvegi og niðan móti Oyggjarvegnum verður latið fyri ein framtíðar veg á ognini, soleiðis at matriklarnir til tvíhúsini gerast 600 m til støddar, ið er minsta kravið sambært byggisamtyktini í A1-øki. Kommunan vísir ætlanini aftur, tí økið niðan móti vegjaðaranum fram við Oyggjarvegnum er bratt lendið, og partur av sjálvum vegnum, og tí økið oman fyri vegjaðaran fram við Vestara Ringvegi er avlagt til eitt framtíðar busssteðgipláss. Somuleiðis er ikki vanligt, at kommunan ger og eigur vegir í privatum útstykkingum, men yvirtekur kommunan vanliga vegirnar í

privatum útstykkingum uttan kostnað, tá útstykkingin og vegirnir eru liðugt gjørdir. Sostatt er ikki grundarlag undir einum gerðabýti, soleiðis at 6 grundstykkir til tvíhús passa á ognina.

Av tí at tað ikki tykist, sum eigararnir av øllum matriklunum kunnu semjast um eina felags loysn, hevur umsitingin tikið stig til at skipa økið við serstakari byggisamtykt, eins og umrøtt á fundum við eigararnar á sumri 2023. Serstaka byggisamtyktin er gjørd við ásetingum, sum vórðu umrøddar á fundunum, og tískil er serstaka byggisamtyktin eitt boð upp á, hvussu kommunan metir, at økið kann verða skipað í síni heild.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Matr. nr. 1235a, 1378, 1233a og 1233b liggja í umráðispartinum A1 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har tað m.a. er ásett:
- § 5 stk. 5: Byggistigið má ikki fara upp um 0,3 og nýtslustigið 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, raðhús og íbúðir.

- § 5 stk. 7, 8 og 9: Hús mugu ikki verða bygd við meira enn tveimum hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna. Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum takið kann tann lægra síðan í mesta lagi verða 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi verða 7,5 m.

- § 5 stk. 10: Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.

Um íbúðir skulu byggjast, er neyðugt at gera eina serstaka byggisamtykt fyri økið.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tað vísir seg trupult at fáa skipað økið, eins og umrøtt á fundum við ymisku eigararnar, og tískil er einasta loysnin, at kommunan ger serstaka byggisamtykt, sum ásetur, hvat kann loyvast í økinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Umsókn um byggiloyvi til íbúðir á matr. nr. 1233a og 1233b, Oyggjarvegur 7 og 5, Tórshavn,* journal nr. 21/05044.
- *Umsókn um broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 1233, 1233b og 1235a, Tórshavn,* journal nr. 23/06369.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
- *Uppskot – Serstøk byggisamtykt millum Skotarok og Oyggjarvegin,* journal nr. 22/07222-12.
- *Fylgiskjal 2,* journal nr. 22/07222-15.
- *Fylgiskjal1,* journal nr. 22/07222-15.
- *Skriv sent Tróndur Sigurðsson, viðv. matr. 1378 og 1233a - Eyðfinnur Reinert.pdf*, journal nr. 22/07222-5
- *Uppskot - Útstykking á matr. nr. 1233a, b og 1235a,* journal nr. 22/07222-10

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| Býráðsfundur<br>24. april 2024 | | Blað nr.: 445 |
| | | Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt millum Skotarók og Oyggjarvegin, Tórshavn, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

# 103/24 Broyting av serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.04.2024 | 79/24 | 23/03101-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 103/24 | 23/03101-1 |

**Upprunin til málið**
Í 2017 móttók umsitingin umsøgn um byggiloyvi til hotellíbúðir Undir Bryggjubakka. Byggiloyvið varð útskrivað 7. juli 2021. Nærmastu grannarnir kærdu avgerðina, og 1. november 2022 fekk Tórshavnar kommuna skriv frá Føroya Kærustovni við avgerðini at ógilda byggiloyvið.

Skal byggingin lata seg gera við tí nýtslu, sum søkt er um, so er neyðugt at broyta serstøku byggisamtyktina.

**Lýsing av málinum**
Galdandi sertaka byggisamtykt er upprunaliga frá 1972 og hevur til endamáls at varðveita dámin, sum sermerkir Tinganes og gomlu Havnina, og at byggja og endurbyggja á ein hátt, sum ikki stríðir ímóti tí gamla.

Økið Undir Bryggjubakka (kallað D1 í sersøku byggisamtyktini), hevur síðani 1972 verið lýst sum byggilendið. Ætlaða byggifeltið til hotellíbúðirnar fer tó út um linjunar, soleiðis sum tær eru lýstar í fylgiskjali 4 (sí Fylgiskjal 4 - Galdandi). Byggiøkini eru upprunaliga tillagað táverandi sjólinju, men í dag er bryggjan útbygd og plássið er betur millum bygningar og bryggjukantin. í viðgerð av byggiloyvinum (sí mál 17/01760), metti byggimálsdeildin, at tað er natúrligt, at bygd verður út um byggiøki í mun til grannabygningarnar og verandi bryggju, og at byggingin fylgdi verandi bygging á staðnum.

Í mun til nýtstluna í økinum loyvir galdandi byggisamtykt, vinnulívsendamálum og ítøkiliga: skrivstovu-, umsitingar-, og handilsvirksemi, serliga tílíkum, ið hevur við havnina og fiskivinnu at gera (sí SB_Tórshavn_TinganesReyn_1972_4_2022 - Galdandi.pdf). Vinnuliga er tað serliga ferðavinnnan, ið er vaksin nógv síðani hesa áseting, og Tinganes og gamla Havnin teljast millum høvuðsferðmál í Føroyum. Umsitingin metir tað vera hóskandi at broyta ásetinginarnar fyri D eindirnar, soleiðis at hesar eisini loyva bústøðum, og at loyva gistingarhúsum í D1. Umsitingin metir, at hetta kann menna ein meira fjølbroyttan og livandi býarpart.

Málið snýr seg tí um at broyta omanfyri standandi lutir, soleiðis at ætlanir fyri hotellíbúðir undir bryggjubakka kunnu fremjast. Hetta krevur tekstligar broytingar í serstøku byggisamtyktini, sí broytingarnar við reyðum/grønum á síðu 3 í skjalinum *Eindirnar D - Við rættingum.* Hetta krevur eisini eina dagføring av fygliskjali 4 (sí *Fylgiskjal 4 - Dagført*).

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í 2. grundumráði í almennu byggisamtyktini og í eindini D1 í serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina.

<u>Í almennu byggisamtyktini er ásett í kap. 4, § 3:</u>

*2. grundumráði verður alt, sum tað er, lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging. Miðstaðabyggingin má einans vera hús, sum heilt ella lutvís verða innrættað til handlar, smáhandverk, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.*

<u>Í serstøku byggisamtyktini nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina er ásett fyri eindina D2:</u>

2. gr. Nýtsla økisins, eindirnar D: Vinnulívsendamál:

a. Eindirnar D1 og D2 skulu við teimum undantøkum, ið niðanfyri eru nevnd, einans verða nýttar til vinnulívsendamál og byggingin skal vera kannað skrivstovu-, umsitingar-, og handilsvirksemi, serstakliga tílíkum, ið hevur við havnina og fiskivinnu at gera. Eisini kann býráðið loyva at byggingin verður nýtt til goymslur og pakkhús. Uttandura goymslur kunnu bert verða gjørdar við serloyvi frá býráðnum.
b. Í ovastu húsahædd er loyvt at innrætta íbúðir.
c. Á ognunum kann ikki verða framt nakað slag av virki, sum við roki, royki, deymi, gangi ella ristingum ella sum við útsjónd síni, ella á annan hátt eftir meting býráðsins kann vera teimum, sum uttanum búgva, til ampa.
d. Í D1 økinum skal niðasta hædd í bygninginum hava útvent virksemi, t.d. kafé, matstova, handil v.m.

5. gr. Stødd og staðseting húsanna o.a., Eindirnar D

a. Byggingin skal verða løgd í tey á fylgiskjalið IV strikumerktu byggiøkini og skulu bygningarnar innan byggiøkini verða samanbygdir. Byggiøkini skulu, er tað gjørligt, byggjast fult.
b. Í eindini D1 skal hæddin á bygninginum, roknað frá hægsta jørðildi móti vegnum a-b til yvirgrindina (har húsasíðan og tak koma saman, skjøldrar ikki íroknaðir) ikki vera minni enn 3 m og ikki meira enn 4 m.
c. Í eindini D2 skal hæddin á bygninginum, roknað frá bryggjuni til yvirgrindina ikki vera meira enn 9 m.
d. Í eindini D1 skulu yvirgrindir og mønur vera javnfjarar við vegin a-b. Í báðum endunum D skal reisingin vera millum 30° og 45° reyst. Loyvt er at seta kvistar um so er at teir samsvara við vegleiðandi skurðir, sum sýndir eru á fylgiskjalið IV.
e. Ikki er loyvt á ognunum at byggja bilskúrar, úthús og onnur tílík smáhús.
f. Leiðingaløg skulu sum meginregla verða løgd í samsvari við vegleiðandi skipanina, sum sýnd er á fylgiskjalið III, ið er til skjals hjá býarverkfrøðingarskrivstovuni.

6. gr. Útsjónd húsanna

a. ......Allar lýsingar, eisini í eindunum D skulu vera góðkendar av serstaka byggiráðnum.
e. Í eindunum D1 og D2 skulu til framsíður, skjøldrar og tekjur ikki nýtast litir og tilfar, ið eftir meting serstaka byggiráðsins kann lýta økið.

## Upplýsingar frá umsitingini

## Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið

- *Umsókn um byggiloyvi til bygning á matr. nr. 168a og 156, Tórshavn. undir Bryggjubakka og Rektaragøta* journal nr. 17/01760
- *Kæra um avgerð hjá hjá TK um givið byggiloyvi á matr. nr. 168a, Tórshavn (hotellíbúðir undir Bryggjubakka/Rektaragøta)* Journal nr. 21/04171

## Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

## Skjøl

- *SB_Tórshavn_TinganesReyn_1972_4_2022 - Galdandi.pdf,* journal nr. 23/03101-5
- *SB_Tórshavn_TinganesReyn_1972_4_2022 – Dagført 28.02.2024,* journal nr. 23/03101-5
- *Eindirnar D - Við rættingum ,* journal nr. 23/03101-3
- *Fylgiskjal 4 - Galdandi,* journal nr. 23/03101-4
- *Fylgiskjal 4 - Dagført,* journal nr. 23/03101-6

## Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>24. april 2024 | Blað nr.: 448<br><br>Formansins merki: |

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta serstøku byggisamtykt nr. 5 sambært skjalinum *SB_Tórshavn_TinganesReyn_1972_4_2022 – Dagført 28.02.2024*, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

# 104/24 Bíðirúm í Hesti

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 18.03.2024 | 13/24 | 24/01596-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.04.2024 | 99/24 | 24/01596-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 104/24 | 24/01596-1 |

**Upprunin til málið**
Havnanevndarformaðurin hevur biðið um at fáa málið á skrá.

**Lýsing av málinum**
Ynski er um, at fáa eitt bíðirúm í Hesti til ferðafólk, ið skulu við ferjunum hjá SSL.
Eisini kunnu útlendingar (og føroyingar), ið koma út í Hest við seglbátum og øðrum frítíðarbátum, nýta bíðirúmið at sita í.
Tórshavnar havn hevur umbiðið tilboð upp á eitt bíðirúm, ið er sett saman av tveimum 20' bingjum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
J.nr. 24/01596-2 : Tekning av bíðirúmi.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:** Stjórin í Tórshavnar havn mælir at játta 500.000 kr. av íløguætlanini fyri bátahavnir fyri 2024 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 18. mars 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

| | **Býráðsfundur**<br>24. april 2024 | Blað nr.: 451<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

## 105/24 Ársroknskapur fyri Tórshavnar kommunu 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.04.2024 | 101/24 | 24/02032-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 105/24 | 24/02032-1 |

**Upprunin til málið**
Kommunustýrislógin inniheldur ásetingar um grannskoðan av kommununum.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**
Kommunustýrislógin:

Sambært §§ 45-47 er tað eitt krav, at kommunur hava óhefta og sakkøna grannskoðan, ið er ríkisgóðkend ella skrásett.

Sambært § 38, stk 3, nr 4 hevur fíggjarnevndin ábyrgd av at leggja grannskoðaðan roknskap saman við grannskoðanarfrágreiðingini [grannskoðanarprotokollin, red] fyri kommunustýrið til góðkenningar og undirskrivingar.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- Grannskoðanarprotokoll fyri ársroknskapin 2023
- Àrsroknskapur 2023

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:** Stjórnin mælir býráðnum umvegis fíggjarnevndina til at góðkenna grannskoðaða ársroknskapin fyri 2023.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

| | **Býráðsfundur**<br>24. april 2024 | Blað nr.: 453<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 106/24 Framflytingar fyri roknskaparárið 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.04.2024 | 102/24 | 24/02033-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 106/24 | 24/02033-1 |
| 3 Býráðsfundur | | | 24/02033-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært játtanarreglunum hjá Tórshavnar kommunu verða meir- og minninýtslur fluttar fram til komandi ár. Framflytingar skulu játtat sum eykajáttan í býráðnum, tvs. skulu hava tvær viðgerðir.

Meirnýtsla, sum í mesta lagi kann vera 5% av nettojáttanini, verður flutt til næsta ár.

Meirnýtsla skal vera burtur innan trý ár. Minninýtsla, sum í mesta lagi kann vera 10% av nettojáttanini, verður flutt til næsta ár. Um serlig viðurskifti gera seg galdandi, og ynski er at flyta meira enn 10% til árið eftir, kann ein umbøn um hetta sendast avvarðandi fyrisitingarstjóra.

**Lýsing av málinum**
Ársroknskapurin fyri 2023 er gjørdur upp, og gjørt er eitt yvirlit yvir rakstrar- og íløgujáttanir at flyta fram til 2023.

Samlaða framflytingin íroknað Tórshavnar Havn er fyri rakstur -11 mió. kr. netto og fyri íløgur 271 mió. kr., í alt 260 mió. kr., og er útgreinað soleiðis:

| | **Rakstur** | **Íløgur** |
|---|---|---|
| TK | -18,7 mió | 192,9 mió |
| TH | 7,7 mió | 78,1 mió |
| **Íalt** | **-11,0 mió** | **271,0 mió** |

Samlaða meirnýtslan á rakstrarsíðuni fyri Tórshavnar kommunu frároknað Tórshavnar havn er 18,7 mió. kr. Á § 1,2 og 4 er talan um minninýtslu, í meðan tað á § 3,5,6 og 7 er talan um meirnýtslu.

Víst verður til uppskot til broytingar í framflytingum í skjali 24/02088.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|

| **Býráðsfundur**<br>24. april 2024 | Blað nr.: 454 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| Ymiskar | | Framflutt 2023 |

| **Játtast á:** | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| Ymiskar | | Játtan 2024 | |

| **Upphædd** |
|---|
| 260,0 mió. |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir til at játtað framflyting á -11 mió. kr. til rakstur og 271 mió. kr. til íløgur. Eisini verður mælt til at gera broytingar í framflytingini sambært viðlagda skjali nr. 24/02088-1.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið at viðgera tvær reisir sum eykajáttanarmál.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð og beint víðari til aðru viðgerð.

# 107/24 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.02.2024 | 47/24 | 24/00061-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 46/24 | 24/00061-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.03.2024 | 79/24 | 24/00061-1 |
| 4 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 69/24 | 24/00061-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.04.2024 | 103/24 | 24/00061-1 |
| 6 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 107/24 | 24/00061-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2024:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2024:** Framlagt.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2024:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

## 108/24 Framtíðartryggja eldraøkið - reingerðartænastan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Heilsu- og eldranevndin | 19.06.2023 | 18/23 | 23/03546-1 |
| 2 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 148/23 | 23/03546-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 05.07.2023 | 210/23 | 23/03546-1 |
| 4 Býráðsfundur | 05.07.2023 | 187/23 | 23/03546-1 |
| 5 Heilsu- og eldranevndin | 31.10.2023 | 26/23 | 23/03546-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 15.11.2023 | 302/23 | 23/03546-1 |
| 7 Býráðsfundur | 23.11.2023 | 280/23 | 23/03546-1 |
| 8 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 108/24 | 23/03546-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Tórshavnar kommuna stendur, eins og Føroyar sum heild, yvir fyri stórum fólkafrøðiligum avbjóðingum, sum setur verandi vælferðartænastur, sum kommunan hevur ábyrgd av, undir trýst.

Á eldraøkinum eru avbjóðingarnar stórar, samansettar og vaksandi.

Talið av eldri fólki økist, fólk liva longur, viðgerðarhættir í heilsuverkinum gerast alsamt betri. Tørvurin á tænastum og búplássum frá kommununi verður tískil alsamt størri. Í tráð við, at tað gerast fleiri eldri fólk, og at livialdurin hækkar, verða eisini elsamt fleiri borgarar við ellisbrekum og varandi sjúkum, og nógvir teirra fáa tørv á persónligari og praktiskari hjálp í gerandisdegnum. Tað er týdningarmikið, at hesir borgarar fáa góða umsorgan og røkt, sum tekur stæði í tørvinum hjá tí einstaka.

Harumframt eru borgarar vorðnir meira tilvitaðir, og seta alsamt størri krøv til, at kommunan skal veita tænastur, hvørjar tænastur kommunan skal veita, hvussu tænasturnar verða veittar og til góðskuna á tænastunum.
Samstundis bendir alt á, at tað gerast færri skattgjaldarar at rinda fyri tænasturnar komandi árini.

Búskaparráðið hevur víst á, at tað er neyðugt, at neyv mál verða sett fyri, hvørjar framtíðar vælferðartænastur skulu veitast til hvørjar borgarar, um fólkafrøðiliga avbjóðingin og vantandi starvsfólkaorkan skal loysast.

Tórshavnar býráð hevur sett sær fyri at loysa avbjóðingarnar, sum síggjast á eldraøkinum og at fara undir átøk, sum skulu viðvirka til at framtíðartryggja grundleggjandi tænastur fyri borgaran í Tórshavnar kommunu.

Á fundi í Heilsu- og eldranevndini tann 5. juli 2021 varð samtykt, at seta ein arbeiðsbólk at lýsa og greina verandi avbjóðingar á eldraøkinum, og gera tilmæli til, hvussu eldraøkið í Tórshavnar kommunu verður framtíðartryggjað. Ynski var um, at bæði borgarin, fakfólk og politiski myndugleikin skuldi takast við í arbeiðið.

Sum liður í hesum arbeiði eru settir tríggir arbeiðsbólkar, sum hava viðgjørt ávíkavist tænastur til heimabúgvandi fólkapensjónistar, tænastur á eldrabústovnunum og starvsfólk, útbúgving og rekruttering. Í arbeiðsbólkunum hava limir úr øllum fakbólkum verið umboðaðir. Endamálið við arbeiðsbólkunum hevur verið, at fakfólk á eldraøkinum fáa møguleika at greiða frá teirra sjónarmiðum, at luttaka í kjaki og at koma við ískoyti til møguligar loysnir.

Í arbeiðsbólkunum verður nú arbeitt við at orðað tilmæli til, hvussu eldraøkið í Tórshavnar kommunu verður framtíðartryggjað. Í hesum sambandi hevur arbeiðsbólkurin, sum hevur viðgjørt tænastur til heimabúgvandi pensjónistar, orðað tilmæli um reingerðartænastuna.

**Lýsing av reingerðartænastuni**

Reingerðartænastan er ein tænasta fyri heimabúgvandi fólkapensjónistar, ið ikki megna at gera reint sjálvi, og sum ikki búgva saman við frískum hjúnafelaga/maka ella vaksnum yvir 18 ár, ið megna at gera reint. Játtan til reingerðartænastu er treytað av, at visitator metir, at heilsufakligt grundarlag er fyri reingerðartænastu.

Borgari, sum hevur ansara, fær ikki játtað reingerðartænastu. Í serligum førum verður reingerðartænasta játtað í avmarkað tíðarskeið. Tænastan er tilskilað einkult persóni, men í ávísum førum, t.d í samband við deysðfall, verður støða tikin til, um eftirsitandi makin hevur tørv á at varðveita tænastuna.

Visitatión til reingerðartænastu fevnir í dag ikki um eina ADL metan av borgaranum. Ein ADL metan er ein metan av, hvussu væl borgari megnar gerandis uppgávur í heiminum, til arbeiðis og í frítíðini. Hetta kunnu vera uppgávur so sum persónligt reinføri, at lata seg í/úr, at eta, fara á wc, innkeyp, matgerð og reingerð. Tað er ergoterapeutur, sum ger ADL metanina.

Reingerð verður veitt 3. hvørja viku í 2 manntímar, sum svara til antin 1 tíma ið tveimum reingerðarfólkum ella 2 tímar við einum reingerðarfólki. Tað, sum vanliga verður gjørt reint, er støvsúgving, vask av gólvum og vask av vesi og baðirúmið. Reingerðin fevnir um viðlíkahaldsreingerð. Høvuðsreingerð er ikki ein partur av tilboðnum.

Núverandi játtan til reingerðartænastu er kr. 800.000 árliga, og kostnaðurin fyri tænastuna er í dag kr. 1.663.569 v/ netto MVG. Brúkaragjaldið er á kr. 170 fyri hvørja reingerðarveiting, svarandi til í alt kr. 451.520 árliga.

Upprunaliga varð avgjørt, at 1/3 av kostnaðinum skuldi fíggjast við brúkaragjaldi. Í dag er brúkaragjaldið 27% av kostnaðinum.

Reingerðartænastan var áður ein partur av tí tænastu, sum heimatænastan veitti heimabúgvandi borgarum. Reingerð varð tikin úr hesi tænastu fyri áleið 15 árum síðani, og hevur ikki verið partur av heimatænastuni síðani.

Tórshavnar kommuna valdi at seta reingerðartænastuna inn aftur í 2019, men skipað á tann hátt, at privat reingerðarfyritøka veitti reingerðarhjálpina.

Fyrsta tíðin var royndartíð, sum varð skipað soleiðis, at tað vóru teir borgarar, sum ikki megnaðu sjálvir at gera reint og sum ikki búðu saman við persóni sum kundi gera reint, sum kundu fáa reingerðartænastu. Eftir 1 ár varð skipanin sett í verk, og tá var brúkaragjald ásett. Við støði í royndarverkætlanini var mett, at pláss skuldi vera fyri 110 borgarum í skipanini.

Í 2021, tá sáttmálin við reingerðarfyritøkuna skuldi leingjast, varð víst á, at fleiri borgarar enn væntað, vóru í skipanini, og kostnaðurin av tí sama hækkaði. Tá varð avgjørt, at kommunan bar hækkingina, og brúkaragjaldið sostatt skuldi vera óbroytt.

Tað eru í løtuni 166 borgarar, sum fáa reingerðartænastu, og 42 borgarar hava fingið játta reingerðartænastu men eru á bíðilista til reingerð.

Um reingerðartænasta skal veitast teimum 208 borgarum, sum í dag hava fingið játtað reingerðartænastu, og støði verður tikið í núverandi kostnaði, fer tænastan at kosta kr. 2.084.472 v/ netto MVG.

Sáttmálin við verandi reingerðarfyritøku er gingin út, og reingerðartænastan hevur tí júst verið í útboð. Um tikið verður av einum av innkomnu tilboðunum, fer kostnaðurin av reingerðartænastuni at hækka frameftir. Harumframt fer talið av eldri borgarum at hækka komandi árini, og tað verða tí helst fleiri og fleiri borgarar, sum fara at søkja um reingerðartænastu.

Sí viðfest um nøgdsemi við reingerðartænastuna

**Niðurstøða hjá arbeiðsbólkinum**
Arbeiðsbólkurin mælir til, at reingerðartænastan skal síggjast tí breiða høpinum, og í mun til tær avbjóðingar, sum eru fyri framman. Talið á eldri borgarum í Tórshavnar kommunu fer at vaksa skjótari komandi árini, og skal kommunan megna at veita neyðturviligar røktartænastur, verður neyðugt at raðfesta og møguliga eisini at skerja tænasturnar.

Um Tórshavnar kommuna skal raðfesta við støði í teimum tænastum, sum kommunan veitir eldri borgarum í dag, so er reingerðartænastan ein tænasta, sum kann verða avtikin. Hetta við atliti til, at hetta er ein tænasta, sum privatar fyritøkur kunnu veita borgarum, og sum borgarin tí kann keypa seg til sjálvur. Í hesum sambandi vísur nøgdsemiskanningin eisini, at reingerðarhjálp frá privatari fyritøku er á einum støði, sum er nøktandi fyri borgaran og avvarðandi.

Verður avgerð tikin um, at reingerðartænasta framhaldandi skal veitast, mælir arbeiðsbólkurin til, at skipanin verður endurskoðað og at kanna verður, um tænastan kann skipast á annan hátt.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at reingerðartænastan verður avmarkað soleiðis, at tað verða settar neyvari treytir fyri at fáa tænastuna. Tað skulu einans vera teir borgarar í skipanini, sum fáa umfatandi hjálp frá Heimatænastuni, sum kunnu fáa játtað reingerðartænastu.

Arbeiðsbólkurin mælir eisini til, at tað verður gjørd ein ADL metan, tá visiterast skal til reingerðartænastu, fyri soleiðis at tryggja, at borgarar við størsta tørvi, fáa reingerðartænastu.

Eitt uppskot er harumframt, at reingerðartænastan verður ein partur av visitatión til heimatænastu, soleiðis at skilja, at tá borgari søkir um heimatænastu, metur visitator eisini, um borgarin hevur tørv á reingerðartænastu. Um tørvur er á reingerðartænastu, kunnar visitator borgaran um, at viðkomandi kann søkja um tænastuna.

Arbeiðsbólkurin hevur somuleiðis umrøtt spurningin, um reingerðarhjálp frameftir kann veitast av starvsfólki í Heimatænastuni. Vísandi til, at hjálp í heiminum fyri tað mesta verður veitt fyrrapartar, og at tað møguliga er rúm fyri, at starvsfólk kunnu brúka tíð seinnapart til reingerð.

Arbeiðsbólkurin mælir eisini til, at í minsta lagi 1/3 av kostnaðinum av tænastuni skal fíggjast við brúkaragjaldi, og at brúkaragjaldið verður hækkað um neyðugt.

Úrslitini frá nøgdsemiskanningini tala eisini fyri hesum, tá tey vísa á, at borgarar og avvarðandi yvirskipað eru nøgd við kostnaðarstøðið á tænastuni. Eitt hægri brúkaragjald hevði tí allarhelst ikki havt stórvegis ávirkan á, um borgarin valdi tænastuna til ella frá.

Arbeiðsbólkurin mælir Heilsu- og eldranevndini til at:

- Reingerðartænastan verður avtikin.

Verður reingerðartænastan ikki avtikin mælir arbeiðsbólkurin til, at:

- Neyvari treytir verða settar fyri at fáa játtað reingerðartænastu.
- Einans borgarar í skipanini, sum fáa umfatandi hjálp frá Heimatænastuni, kunnu fáa játtað reingerðartænastu.
- ADL metan verður gjørd, tá visiterast skal til reingerðartænastu, fyri soleiðis at tryggja, at borgarar við størsta tørvi fáa reingerðartænastu.
- Reingerðartænastan verður ein partur av visitatión til heimatænastu, soleiðis at skilja, at tá borgari søkir um heimatænastu, metur visitator eisini, um borgarin hevur tørv á reingerðartænastu.
- Kanna møguleikan fyri, at reingerðarhjálp frameftir kann veitast av starvsfólki í Heimatænastuni.
- Brúkaragjaldið á reingerðartænastuni verður hækkað, um tað er neyðugt fyri at røkka 1/3 av samlaða kostnaðinum av tænastuni.

**Viðmerkingar frá fyrisitingini:**
Sambært lóg um heimatænastu og eldrarøkt er tað ikki skylda hjá kommununi at veita fólkapensionistum reingerðartænastu. Tó kann kommunan seta tilboðið í verk um hon ynskir tað.

Umsitingin metir at tørvur er á at endurskoða reingerðartænastuna. At taka støðu til um reingerðartænastan skal halda fram og í øðrum lagi at gera skipanina soleiðis at tað er borgarin við veruligum tørvi sum kann fáa tænastuna. Hetta kann vera gjørt eftir leisti sum arbeiðsbólkurin mælir til. Umsitingin metir somuleiðis at reingerðartænastan altíð eigur at vera játta tíðaravmarka og tí skal revisiterast reguliga.

Reingerðartænastan er sera tíðarkrevjandi at umsita bæði fyrisitingarligt og hjá visitatiónini. Umsitingin metur at tíðin er koman at tillaga skipanina. Hetta kann gerast í trá við uppskoti frá arbeiðsbólkinum. Um skipanin skal halda fram sum nú, verður neyðugt at økja játtanina við áleið 1.5 mio. kr. í fíggjarætlanini fyri 2024

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, Heilsu- og umsorganarstjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla heilsu- og eldranevndini til at taka undir við tilmælinum frá arbeiðsbólkinum í fyrstu syftu at reingerðartænastan skal niðurleggjast. Um nevndin ikki tekur undir við fyrsta tilmælinum so í øðrum lagi at taka undir við antin samlaða alternativa uppskotinum ella pørtum av hesum.  At leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 19. juni 2023:** Nevndin tekur ikki undir við at avtaka reingerðarskipanina.

Nevndin tekur undir við at endurskoða, tillaga og broyta reingerðartænastuna í samsvari við alternativa uppskotið hjá arbeiðsbólkinum umframt at reingerðartænastan verður játtað tíðaravmarkað og verður revisiterað regluliga.

Nevndin tekur ikki undir við at hækka brúkaragjaldið. Nevndin ynskir málið aftur í nevnd, tá ið omanfyri nevndu broytingar eru settar í verk og endaligur fíggjartørvur fyriliggur.

At beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 05. juli 2023:** Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini, og at málið verður lagt fyri eldranevndina, tá ið endaligur fíggjartørvur fyriliggur í mun til endurskoðaðu skipanina, sum alternativa uppskotið hjá arbeiðsbólkinum mælir til.

**Býráðsfundur 05. juli 2023:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Sum liður í arbeiðinum at framtíðartryggja eldraøkið, varð samtykt á fundi í heilsu- og eldranevndini tann 19. juni 2023, at taka undir við tilmæli um at endurskoða, tillaga og broyta reingerðartænastuna í samsvari við uppskoti frá arbeiðsbólkinum. Harumframt varð samtykt, at reingerðartænastan skal játtast í avmarkað tíðarskeið og revisiterast árliga.

Heilsu- og eldranevndin ynskti málið aftur í nevnd, tá ið broytingar í reingerðartænastuni vóru settar í verk og endaligur fíggjartørvur staðfestur.

Arbeiðsbólkur við umboðum frá eindarleiðsluni, heimatænastuni, visitatiónini, terapeuttoyminum og fyrisitingini hevur endurskoðað og tillagað reingerðartænastuna við støði í tilmælunum, og gjørt fylgjandi broytingar í reingerðartænastuni.

Borgarin skal fáa umfatandi heimahjálp fyri at fáa reingerðartænastu, og talan skal vera um varandi tørv – reingerðartænasta verður tí ikki játtað í styttri tíðarskeið. Umfatandi heimahjálp verður veitt borgara, sum við hjálp og stuðli kann luttaka aktivt fyri at nøkta egnan tørv, og borgara sum við fullari hjálp kann viðvirka til at nøkta egnan tørv.

Reingerðartænasta verður frameftir partur av visitatión til heimatænastu á tann hátt, at tá borgari søkir um heimatænastu, metir visitator eisini, um heilsufakligt grundarlag er fyri reingerðarhjálp. Um borgari lúkar treytirnar fyri reingerðartænastu, kunnar visitator borgara um, at viðkomandi kann søkja um tænastuna.

Reingerðartænasta verður játtað í eitt ár í senn, og revisitatión er árliga.

Reingerðartænasta verður ikki veitt í viku 30 og 51.

Ein tænastuveiting fevnir um reingerð av brúksrúmum og í mesta lagi fimm rúmum – gongd, køkur, ein stova, eitt kamar og eitt baðirúm/vesi.

Mett verður, at reingerðartænastan kann veitast av bæði heimatænastuni og uttanhýsis veitara. Um borgari fær reingerðartænastu frá heimatænastuni, útvegar borgari reingerðarútgerð.

Við støði í nýggju treytunum fyri reingerðartænastu væntast áleið 100 borgarar í skipanini. Mett verður, at heimatænastan kann veita reingerðarhjálp til 60 borgarar. 40 borgarar skulu tí hava reingerðartænastu frá uttanhýsis veitara. Við støði í hesum er metti bruttokostnaðurin fyri tænastuna kr. 750.000 árliga. Við einum brúkaragjaldið á kr. 170 svarandi til kr. 250.000 árliga, er nettokostnaðurin kr. 500.000 árliga.

Reingerðartænastan skal hava eitt loft svarandi til játtanina. Tá loftið er rokkið, verða fleiri borgarar ikki tiknir inn í skipanina.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og fulltrúi í H&U umsitingini mæla Heilsu- og eldranevndini til at taka undir við endurskoðaðu skipanini av reingerðartænastuni.

**Heilsu- og eldranevndin 31. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. november 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við heilsu- og eldranevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen og Jákup Dam, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 23. november 2023:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri, fýra blankum atkvøðum og ongari atkvøðu ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Súsanna Olsen og Bogi Andreasen.

Blankt atkvøddu: Turið Horn, Jákup Dam, Gunvør Balle og Annika Olsen.

**Ískoyti:**
Annika Olsen biður um at fáa málið á skrá til býráðsfundin 24. apríl 2024.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Atkvøtt varð um at beina málið í heilsu- og eldranevndina, ið varð einmælt samtykt.

**FUNDURIN LOKIN KL. 20:15**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen | Súna Mørk |
| Bjørg Dam | Jákup Dam | Annika Olsen |
| Birgir Nielsen | Súsanna Olsen | Turið Horn |
| | Gunnar Djurhuus | |